BÚSKAPARRÁÐIÐ

**Á vári**

# 2020

# Búskaparráðsfrágreiðing

I. Konjunkturmeting várið 2020

II. Nýskipanir í fiskivinnuni

Mars 2020

Economic report from the Economic Council of the Faroe Islands, Spring 2020, with Summary in English: (I) Economic outlook, (II) Fisheries reforms.

Redegørelse fra det Økonomiske Råd på Færøerne, forår 2020: (I) Udsigterne for konjunkturudviklingen, (II) Fiskerireformer

BÚSKAPARRÁÐIÐ

ISBN: 978-99918-3-637-9

# Búskaparráðið

Búskaparráðið hevur til uppgávu at fylgja við búskaparligum viðurskiftum í landinum og at koma við óheftari búskaparligari ráðgeving og frágreiðingum um búskaparligu gongdina. Tað er ásett í lógini fyri Búskaparráðið, at tað skal gera tvær konjunkturfrágreiðingar árliga, sum skulu verða almannakunngjørdar ávikavist tann 1. mars og 1. september.

Skrivarauppgávan hjá Búskaparráðnum er við avtalu løgd til Fróðskaparsetur Føroya at røkja.

***

Búskaparráðið gevur við hesum út konjunkturfrágreiðingina, sum eftir løgtingslóg nr. 50 frá 11. mai 2009 um Búskaparráð við seinni broytingum við løgtingslóg nr. 139 frá 20. desember 2012 skal gerast tvær ferðir um árið.

Frágreiðingin hesuferð fevnir um tveir partar:

- Kapittul I: Konjunkturmeting várið 2020
- Kapittul II: Nýskipanir í fiskivinnuni

Frágreiðingin liggur tøk at taka niður sum pdf-fílu á heimasíðu Búskaparráðsins á Fróðskaparsetrinum:

https://www.setur.fo/fo/setrid/samstarv/buskaparradid/buskaparfragreidingar/


Limir Búskaparráðsins eru:

Djóni Højgaard, cand.polit., formaður

Ester Hansen, cand.polit.

Sigurd Poulsen, cand.polit.

Skrivarar Búskaparráðsins eru:

Ólavur Christiansen, cand.polit. et scient.soc., PhD, lektari

Birita Mortansdóttir, stud.polit.

# Innihaldsyvirlit


Samandráttur ... 6

Kapittul I: Konjunkturmeting várið 2020 ... 7

I 1 Inngangur um konjunkturmeting við høvuðstølum ... 8

I 1.1 Eftirspurningurin ... 11

I 1.2 Bústaðarmarknaðurin ... 12

I 1.3 Vinnuviðkomandi bygnaðarbroytingar ... 13

I 1.4 Laksa- og oljuprísir ... 18

I 1.5 Handilsjavnin ... 19

I 1.6 Gjaldsjavnin ... 21

I 2 Innlendis eftirspurningur frá húsarhaldunum (privat nýtsla) ... 25

I 2.1 Metingar viðvíkjandi privatu nýtsluni ... 25

I 2.2 Gongdin í treystitølum (konjunkturbarometrinum) ... 26

I 3 Virksemið í privatu vinnugeirunum (privatar íløgur o.a.) og innlendis eftirspurningurin ... 28

I 3.1 Gongdin viðvíkjandi lønargjaldingum og løntakaratali ... 28

I 3.2 Gongdin í treystitølum (konjunkturbarometrinum) ... 31

I 4 Innlendis eftirspurningur frá almenna geiranum - almenn nýtsla og íløgur ... 33

I 4.1 Nýtsla hins almenna ... 33

I 4.2 Almennar íløgur – íløguútreiðslur undir almennum ræði ... 34

I 4.3 Úrslitið á almennu roknskapunum ... 35

I 4.4 Ogn og skuld í almenna tænastugeiranum ... 37

I 4.5 Konjunkturpolitikkur og fíggjarstøða landskassans ... 38

I 5 Útlendskur eftirspurningur ... 39

I 5.1 Gongdin innan alivinnuna ... 41

I 5.2 Gongdin innan uppsjóvarvinnuna ... 41

I 5.3 Botnfiskur og onnur fiskasløg ... 43

I 5.4 Samlaði fiskavøruútflutningurin ... 45

I 5.5 Gongdin í handilsjavnanum ... 46

I 6 Peninga- og fíggjarviðurskifti ... 48

Fylgiskjøl til kap. I ... 49

Fylgiskjal I 1: Fastognarprísir og prísgongdin fyri $m^2$ ... 49

Kapittul II: Nýskipanir í fiskivinnuni ... 50

II 1 Um endamálsorðingar í fiskivinnupolitikkinum ... 51

II 2 Nakrar arbeiðshypotesur um búskapargongdina ... 52
II 3 Um fatanina av tilfeingisrentu ... 54
II 4 Tvær “marknaðargrundaðar” loysnir møguligar ... 56
II 5 Ymsar metingar av stødd á tilfeingisrentu í føroyskum tilfeingisvinnum ... 60
Fylgiskjøl til kapittul II ... 66
Tilvísingar/keldur og keldutilfar ... 67
Yvirlit yvir talvur og myndir/tables and figures ... 68
Orðalisti ... 72
Tíðindaskriv og samandráttur frá Búskaparráðnum hin 2. mars 2020 ... 79
English Summary ... 80
Áður gjørdar búskaparfrágreiðingar ... 81

# Samandráttur

Fyri 2020 metir Búskaparráðið saman við Hagstovuni vøksturin í BTÚ í leypandi prísum at verða 7,0%. Harumframt hevur Búskaparráðið, sum víst í niðanfyristandandi yvirliti, endurmett vøksturin í BTÚ í leypandi prísum fyri 2019 til 9,0%. Broytta metingin er stór fyri 2019 vegna óvæntaða stóra tøku í alivinnuni. Hetta hevur samband við nýggj háttaløg, har fiskurin er størri, tá hann fer á sjógv, og at hann veksur skjótari.

| | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mettur BTÚ-vøkstur í leypandi prísum: | 6,9% | 3,3% | 3,0% | 9,0% | 7,0% |

**Nettoogn landskassans ov lítil**

Nettoogn landskassans er í 2020 mett til slakar -500 mió. kr. Tá mált verður eftir nettofíggjarogn uttan útbúnað hevur landskassin í krónum eina verri fíggjarstøðu í 2020 enn í 2007. Hetta er ein avbjóðing fyri førleika landskassans at halda eina støðuga útreiðslugongd í komandi lágkonjunkturi.

Tá talan er um fortreytir fyri at reka konjunkturpolitik, er tað fíggjarstøðan og kreditvirðið hjá landskassanum, sum hevur týdning. Landsstýrið og løgtingið hava ábyrgdina av konjunkturpolitikkinum og mugu gera tær fyriskipanir, sum eru neyðugar í hesum samanhangi. Fíggjarstøðan hjá øðrum geirum enn landsstýrinum, hevur lítið at siga fyri virkisfrælsið hjá landsstýrinum viðvíkjandi konjunkturpolitikki, tí um landsstýrið skal til aðrar geirar eftir pengum við skatti ella á annan hátt, verður keypsorka tikin frá hesum geirum, og soleiðis mótarbeiðir eitt tílíkt átak tí konjunkturpolitikki, sum rættur er at reka. Tí er fíggjarstøðan og kreditvirðið hjá landinum avgerandi fyri konjunkturpolitikkin og ikki støðan hjá øðrum geirum.

Fíggjarogn landskassans skal annaðhvørt vera so stór, at hallini kunnu berast uttan lántøku, ella skal fíggjarstøðan vera so mikið góð, at kredittvirðið er nóg gott til at læna til hallini í einum lágkonjunkturi. Í tíðarskeiðinum 2008 til 2015 økti landsstýrið skuldina við samanlagt 2,7 mia. kr. Í hesi tilgongd lækkaði metingarfyritøkan Moody’s kredittmetingina. Hetta merkir, at tað ikki var nógmikið, at nettoognin hjá landskassanum var null í 2007, beint undan fíggjarkreppuni í 2008, fyri at megna tey komandi árini við halli uttan at missa eitt stig í kredittmetingini.

Við verandi konjunkturstøðu, við metlágum arbeiðsloysi átti yvirskotið á fíggjarlógini tí at verið væl størri fyri 2020.

**Fult veiðigjald økir produktivitetin og bøtir um haldførið**

Til at fremja produktivitetsvøkstur í fiskivinnuni, er avgerandi at rindað verður fyri serrættin at fiska. Í langa siktinum er tað bert øktur produktivitetur, sum kann skapa økta vælferð í Føroyum. Tí eiga ásetingar í vinnulóggávu ikki at taka burtur kappingar-elementið, sum eggja til øktan produktivitet, men at avmarka seg til fyrisitingarmál og til at basa bágar í marknaðarmekanismuni, ið seta náttúrliga kapping úti av spælinum.

Produktivitetsvøkstur í privatum vinnum loysir vanliga ikki ein haldføristrupulleika, tí lønargongdin í almenna geiranum plagar at fylgja við lønargongdini í privata geiranum. Í fiskivinnuni er tað kortini galdandi at produktivitetsvøkstur kann minka um haldføristrupulleikan, um tilfeingisrentan verður kravd inn við gjaldi. Hetta tí fiskivinnan vegna minkaðan stuðul verður meira tilskundað til at gera kappingarfremjandi og produktivitetsmennandi íløgur, ið ikki høvdu havt hægri lønarlag við sær í fiskivinnuni, tí tilfeingisrentan tilfellur landskassan og ikki reiðaríum og manningum.

Somuleiðis er ein øktur produktivitetur avgerandi, tá vit skulu møta haldførisavbjóðingini, tí hann styðjar upp undir eitt hægri inntøku- og tænastustøði, ið kann eggja ungum fólki til at búseta seg í Føroyum, eins og produktivitetsvøksturin skapar rúmd fyri nýmenning og arbeiðsplássum í øðrum vinnum.

# Kapittul I: Konjunkturmeting várið 2020

# I 1 Inngangur um konjunkturmeting við høvuðstølum

Búskaparráðið og Hagstovan hava í felag endurmett vøksturin í BTÚ í leypandi prísum fyri 2019 og mett um 2020; BTÚ-tøl fyriliggja uppgjørd fyri árini 1998-2017. Til metingina er sum vant nýttur ein búskaparmyndil til framrokningar. Hesin myndil er mentur í Landsbankanum og síðani á Hagstovuni, og verður viðlíkahildin av Hagstovuni og Búskaparráðnum í felag. Sum ílag (input) fyri myndlanýtsluna liggja tær metingar Búskaparráðsins og Hagstovunnar av einstøku lutunum í búskaparligu gongdini, sum greitt er frá seinni í hesi frágreiðing í teksti, talvum og myndum.

Umframt nýtslu av nevnda búskaparmyndli, sum greitt frá omanfyri, hevur konjunkturmetingin við sær eina greining av dagførdu hagtølunum viðvíkjandi teimum mest týðandi tættunum í búskapargongdini. Vit meta, at ein slík greining av dagførdum tølum kann bera í bøtuflaka fyri óvissuni, ið altíð vil vera tengd at eini framskriving, sum er grundað á ein búskaparmyndil.

**Tekstkassi 1: Skipan av konjunkturfrágreiðingini í avsnitt**

Konjunkturfrágreiðingin er skipað í avsnitt eftir eftirspurnar- ella útreiðslupørtunum av BTÚ. Eftirspurningurin eftir vørum og tænastum kemur frá tveimum síðum: frá innlandi sum eftirspurningur til nýtslu og íløgur[1] og frá útlandi sum eftirspurningur eftir útflutningi. Innflutningurin er partur av innlendis eftirspurnarpørtunum og fevnir eisini um nýtslutilfar í framleiðsluni. Innflutningurin drigin frá útflutninginum gevur nettoútflutningin. BTÚ er sostatt samansett av hesum eftirspurnarpørtum: privat nýtsla plus privatar íløgur plus almenn nýtsla plus almennar íløgur plus útflutningur minus innflutningur.

Innihaldið á komandi síðum er ein samanfating av hesum greiningum og metingum av vinnuligu og samfelagsbúskaparligu indikatorunum, og samanfatingin fevnir um innlendskan og útlendskan eftirspurning, herundir útflutning og innflutning av vørum og tænastum, og um gongdina í privatu og almennu nýtsluni og íløgunum.

Hesar greiningar av konjunkturgongdini geva síðan íkastini til eina heildarmeting av búskapargongdini, sum við búskaparligu myndlanýtsluni verða samanfatað sum metti vøksturin í BTÚ í leypandi prísum fyri árini 2019 og 2020.

---

Gongdin í føroyska búskapinum seinastu árini hevur verið serlig vegna óvanliga nógv viðrák viðvíkjandi laksa- og oljuprísum, uppsjóvar-, botnfiska- og laksaprísum.

Í 2019 vaks útflutningurin aftur eftir, at lítið fall hevði verið í útflutninginum í 2018. Tøkan í alivinnuni vísti seg at vera økt upp aftur meira enn áður mett í 2019 í mun til árið fyri. Hetta er ein av høvuðsorsøkunum til, at vøksturin í BTÚ fyri árið 2019 er hægri, enn hvat mett var á heysti 2019. Aðrar orsøkir til økta vøksturin í BTÚ eru m.a. at meira varð útflutt av makreli og sild enn áður mett, umframt at øktar nøgdir av útfluttum toski og hýsu hava givið eitt positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ í 2019.

Sama nøgd av laksi væntast at verða útflutt í 2020 sum í 2019, og laksaprísurin væntast at vera støðugur í ár. Størri makrelkvota og økt veiða av botnfiskasløgunum undir Føroyum saman við uppgangandi prísum á botnfiski, er við til at dríva vøksturin í BTÚ í 2020. Harafturat geva almenna og privata nýtslan positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ í ár.

Búskaparráðið hevur sum nevnt saman við Hagstovuni endurmett vøksturin í BTÚ í leypandi prísum fyri 2019. Búskaparráðið metir vøksturin í 2019 at vera 9,0% og í 2020 at verða 7,0%.

[1] Munurin millum nýtslu og íløgur er, at íløgur, sum meginreglu, hava eina livitíð uppá meira enn 1 ár.

| | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mettur BTÚ-vøkstur í leypandi prísum: | 6,9% | 3,3% | 3,0% | 9,0% | 7,0% |

Hagstovan ger ikki tjóðarroknskapin upp í føstum prísum. Givið er tó, at stórur partur av BTÚ-vøkstrinum í leypandi prísum seinastu árini stavar frá prísbroytingum á útlendskum marknaðum, og at roknaði vøksturin í BTÚ í føstum prísum (realvøksturin í BTÚ) vildi verið nógv lægri enn roknaði BTÚ-vøksturin í leypandi prísum. Stórur prísvøkstur hevur eitt nú verið á útfluttum laksi síðan 2013 og príslækking á olju síðan 2014. Hetta hevur borið við sær eina fyri Føroyar fyrimunarliga betring av býtislutfallinum í uttanlandshandlinum. Í 2019 hevur tað verið nøgdin og ikki prísvøkstur av laksi, sum hevur drivið vøksturin í BTÚ upp. Í makrelfiskiskapinum hevur gongdin verið, at bæði nøgdir og prísur eru økt í 2019. Eisini skal havast í huga at árliga nettotilflytingin síðstu árini hevur verið um 2% av fólkatalinum. Hetta skal takast hædd fyri, um vit skulu rokna BTÚ-vøksturin fyri hvønn íbúgva.

Talva I 1 vísir BTÚ býtt á útreiðslupartar í leypandi prísum í 2013, og vísir eisini staðfestu og mettu vakstraráskoytini til BTÚ-vøksturin í leypandi prísum.

**Bruttotjóðarúrtøkan býtt á eftirspurnar-/útreiðslupartar í leypandi prísum og %-vísa árliga vakstraráskoytið til BTÚ-vøksturin** **Talva I 1**

| *2013: Mió DKK; 2014-2020 Vakstraráskoytið %* | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Privat nýtsla | 7.507 | 0,7% | 4,3% | -4,6% | 2,5% | 2,7% | 2,9% | 2,8% |
| Almenn nýtsla | 4.583 | 0,8% | 0,9% | 2,0% | 1,0% | 1,6% | 1,4% | 2,4% |
| Privatar íløgur | 2.326 | 0,6% | -0,9% | 2,8% | 0,8% | 1,2% | 2,3% | 1,0% |
| Goymslubroytingar | 119 | 0,9% | 1,1% | -1,0% | -1,1% | 2,3% | -5,0% | 0,0% |
| Almennar íløgur | 820 | 0,5% | 0,3% | 0,0% | 0,4% | 1,4% | 0,1% | 1,0% |
| Allar íløgur uttan goymslubroytingar | 3.146 | 1,1% | -0,6% | 2,8% | 1,1% | 2,7% | 2,4% | 2,0% |
| **Innlendskur eftirspurningur** | **15.356** | **3,5%** | **5,7%** | **-0,9%** | **3,6%** | **9,3%** | **1,8%** | **7,2%** |
| Útflutningur í alt | 7.874 | 2,6% | 2,4% | 7,5% | 5,3% | -3,8% | 8,7% | 4,3% |
| **Eftirspurningur tilsamans (uttan innflutning)** | **23.230** | **6,1%** | **8,0%** | **6,6%** | **8,9%** | **5,4%** | **10,4%** | **11,5%** |
| Innflutningur íalt | 8.475 | -2,4% | 2,2% | -0,3% | 5,5% | 2,4% | 1,4% | 4,5% |
| **Nettoútflutningur (útlendskur eftirspurn.)** | **-601** | **5,0%** | **0,2%** | **7,8%** | **-0,2%** | **-6,3%** | **7,2%** | **-0,2%** |
| **BTÚ (innl. eftirsp. + netto útflut.)** | **14.754** | **8,4%** | **5,9%** | **6,9%** | **3,3%** | **3,0%** | **9,0%** | **7,0%** |
| **Bruttotjóðarúrtøkan** | **14.754** | **16.000** | **16.942** | **18.103** | **18.708** | **19.269** | **21.005** | **22.481** |

**Kelda:** Tjóðarroknskaparuppgerð hjá Hagstovu Føroya til og við 2017, árini 2018-2020 eru egnar metingar.

Frágreiðingar um útrokningarhátt fyri vakstraráskoyti eru at finna í frágreiðing Búskaparráðsins á vári 2016 á síðu 11. Í hesi talvu fevna almennar íløgur um íløgur almenna tænastugeirans (S13), og privatar íløgur (S11, S12, S14 og S15) fevna um íløgur hjá privatu vinnuni og íløgur hjá fyritøkum undir almennum ræði. Sostatt eru íløgur hjá fyritøkum undir almennum ræði íroknaðar vakstraráskoytið frá privatu íløgunum í talvu I 1.

Mynd I 1 vísir vøkstur í BTÚ í leypandi prísum býttan á innlendskan og útlendskan eftirspurning. Síðan 2010 hevur BTÚ í leypandi prísum verið í stórum vøkstri aftaná negativan vøkstur í 2008 og 2009.

**BTÚ vøkstur í leypandi prísum skift á útreiðslur (vakstrarískoyti), 1999-2020** **Mynd I 1**




**Kelda:** Útreiðslusíðan av framleiðslu er gjørd upp av Hagstovu Føroya til og við 2017, BTÚ er uppgjørt til og við 2017. Onnur viðurskifti eru metingar til og við 2020.

Um roknað varð í føstum prísum, vildu einans broytingar í nýttu oljunøgdunum og broytingar í útfluttu laksa- og makrelnøgdunum talt við í fastprís-uppgerðini. Fyri 2013 stavaði til dømis nærum helvtin av BTÚ-vøkstrinum uppá 7,6% frá alivinnuni, og hesin vøkstur stavaði aftur frá príshækkingum í útflutninginum av alifiski (og ikki frá tøkunøgdini, ið hetta árið fall).

Tað sæst, at tað serliga eru sveiggini í uttanlandshandlinum, sum ger at BTÚ sveiggjar. Stóri vøksturin í útflutninginum í 2016 kemst serliga av prísvøkstri á alifiski, meðan fallið í útflutninginum í 2018 stavar frá minni kvotum og minni tøku. Vøksturin í 2019 kemur serliga frá størri tøkunøgd av laksi.

**Tekstkassi 2: Uppgerð av BTÚ í leypandi prísum og ikki í føstum prísum**

Í Føroyum gera vit bert BTÚ upp í leypandi prísum. Hetta merkir, at vit í Føroyum ikki kenna reala búskaparvøksturin, sum er árligi vøksturin í BTÚ í føstum prísum. Útrokningin í føstum prísum vísir reala (nøgdarliga) búskaparvøksturin. Hesin gevur ábendingar um produktivitetsvøksturin í búskapinum. Vit noyðast tí at halda okkum til BTÚ í leypandi prísum, tá vit (í kapittul I í frágreiðingini) skulu meta um framtíðar búskapargongdina í tí stutta siktinum.

At meta um framtíðar gongdina í BTÚ í leypandi prísum er truplari enn at meta um BTÚ-gongdina í føstum prísum. Harumframt hevur talið fyri vøksturin í BTÚ í leypandi prísum eitt avmarkað nýtsluvirði. Prísgongdir í uttanlandshandlinum (innflutningi og útflutningi) hava seinnu árini stórliga ávirkað uppgjørda BTÚ-ið í leypandi prísum. Lutføll millum ymiskt tilfar og framleiðslu í vinnugreinum eru meira støðug í føstum prísum. Tí eru nakrir samanhangir lættari at halda skil á í føstum prísum. Føroyski búskapurin sveiggjar nógv, tað er tí lættari at gera metingar við tjóðarroknskapinum í føstum prísum.

At gera metingar av framtíðar prísgongdum í m.a. uttanlandshandlinum er sera trupult, og hetta ger eisini metingina av BTÚ-vøkstrinum í leypandi prísum meira óvissa. Ein uppgerð av BTÚ-vøkstrinum í føstum prísum hevði gjørt tað møguligt at mett um trendin í búskapargongdini í langa siktinum og sveiggini rundan um hendan trend í stutta siktinum. Ein slík uppgerð hevði eisini minkað um óvissuna í metingunum, tí vit tá kundu sæð burtur frá prísbroytingum í m.a. uttanlandshandlinum.

# I 1.1 Eftirspurningurin

Mynd I 2 vísir gongdina í innflutningi og útflutningi av vørum og tænastum, BTÚ og brúkaraprístali. Av myndini sæst, at útflutningurin, innflutningurin og BTÚ í leypandi prísum eru vaksin stórliga seinnu árini. Myndin bendir eisini á, at ein realvøkstur er hendur í BTÚ, við tað at vøksturin í brúkaraprístalinum er nógv minni enn vøksturin í hinum støddunum. Støddina á hesum realvøkstri kenna vit tó ikki, tí føroyska BTÚ-ið verður, sum áður nevnt, ikki gjørt upp í føstum prísum.

**Útlendskur eftirspurningur, BTÚ og brúkaraprístali 1998-2020, indeks 1998=100** **Mynd I 2**




**Kelda:** Hagstova Føroya hevur gjørt upp BTÚ til og við 2017, brúkaraprístalið til og við 2019. Út- og innflutningur av vørum og tænastum er gjørt upp til og við 2017. Onnur viðurskifti eru egnar metingar.

Privatar íløgur í skip, flogfør og vindmyllur síggjast aftur í innflutningstølunum í mynd I 2 sum stór sveiggj í innflutningi, og samsvara hesi sveiggj við sveiggini í privatu íløgunum. Tá BTÚ verður gjørt upp, verður innflutningurin drigin frá útflutninginum fyri at finna talið fyri nettoútflutningin.

Nettoútflutningurin av vørum og tænastum hevur verið negativur øll árini til og við 2013 burtursæð frá 1998. Síðani 2014 hevur nettoútflutningur Føroya av vørum og tænastum verið positivur. Orsøkin til hetta eru heildarveitingin úr Danmark og lønarinntøkurnar úr útlondum, sum gera sítt til at geva eitt yvirskot á gjaldsjavnanum. Samstundis ger heildarveitingin, at almenna nýtslan í Føroyum í % av BTÚ oftast er størri enn í londunum, vit vanliga sammeta okkum við. Sama er galdandi fyri lønarinntøkur úr útlondum; hesar viðvirka eisini til, at privata nýtslan í % av BTÚ er størri enn í londunum, vit vanliga samanbera okkum við[2].

Søguliga hava stórar niðurgongdir í føroyska búskapinum ofta stavað frá stórum føllum í útflutninginum (útlendskum eftirspurningi ella oftast tvørrandi føroyskum útboði). Hesi føll hava ávirkað inntøkurnar í útflutningsvinnunum, sum aftur hava ávirkað arbeiðsvirknið og inntøkur í teimum vinnum, ið framleiða til innlendskan eftirspurning, sum síðani hava ávirkað úrslitini hjá almenna geiranum.

Omanfyri nevnda 'regla' er tó ikki uttan undantak. Undan kreppuni síðst í áttatiárunum og fyrst í nítiárunum skapti privat og alment íløguvirksemi, saman við lánsveitingum, óheft av útflutninginum, stór sveiggj í búskapargongdini. Seinni í tilgongdini minkaði útflutningurin eisini stórliga. Í árunum undan fíggjarkreppuni vóru búskaparligu sveiggini ei heldur orsakað av broytingum í útflutninginum, men heldur av lánsveitingum, privatari nýtslu og íløguvirksemi. Privata nýtslan sum partur av BTÚ fall árini 2008-2010. Vegna støddina á privatu nýtsluni í mun til BTÚ virkar eitt sovorðið fall ógvusligt á búskapin. Almennu íløgurnar minkaðu stórliga í 2009-2010, og hevði hetta eina uppaftur størri tálmandi ávirkan á

[2] Sí Búskaparráðið, búskaparráðsfrágreiðing á heysti 2013, síða 41.

búskapargongdina. Høvdu almennu íløgurnar ístaðin verið støðugar í hesum niðurgangskonjunkturi, hevði almenna íløguvirksemið havt eina stabiliserandi ávirkan á búskapargongdina.

## I 1.2 Bústaðarmarknaðurin

Mynd I 3 vísir gongdina í húsaprísum, sum skrásett av Betri banka, umframt brúkaraprístalið.

Av myndini sæst, at eitt slag av 'bløðru' varð blást upp fram til 2007, sum síðani brast. Bløðran vísti seg serliga í húsaprísunum í miðstaðarøkinum.

**Gongdin í húsaprísum og brúkaraprístalinum, 2001-2019** **Mynd I 3**




**Kelda:** Hagstova Føroya og Betri Banki

Prísirnir á húsum í Tórshavn hava verið vaksandi síðan 2012, og teir eru nú á nógv hægri støði enn prísirnir í 2007. Mununin millum húsaprísir í Tórshavn og aðrastaðni í Føroyum vaks sera nógv frá 2006, og hevur ein prísmunur upp á eina góða millión krónur hildið sær fram til 2016, tá prísmunurin fór upp á 1,5 mió kr., og í 2019 upp á nærum 1,8 mió kr.

Hagtølini í mynd I 3 frá Betri Banka geva tó ikki eina heilt neyva mynd av prísgongdini. Eitt nú eru íbúðir ikki við í hagtølunum, og harafturat eru einans hús við grundøkjum millum 250 og 1.000 fermetrar tald við.

Fylgiskjal I 1, hvørs kelda er BankNordik, vísir býlisprísir pr. $m^2$ í Føroyum og og prísgongdina pr. $m^2$ í Føroyum síðan 1985. Myndin í fylgiskjali I 1 vísir stóra prísvøksturin pr. $m^2$ í Tórshavn síðan 1985. Stórur prísvøkstur hevur verið á íbúðum seinastu árini, men serliga er prísurin á sethúsum øktur í 2019. Útboðið av íbúðum er vaksið seinastu árini og er fermetraprísurin fallin eitt vet í 2019. Fermetraprísurin á sethúsum er hinvegin vaksin lutfalsliga nógv seinasta árið, soleiðis at minni munur nú er á fermeturprísinum fyri sethús og íbúðir.

Negativa rentan og brúk av fríviðum í samband við keyp av húsum og íbúðum hava trýst prísin uppeftir. Vøksturin í húsaprísunum økir um frívirðið á bústøðum. Hetta kann økja um peningamongdina, sum aftur leiðir til prísvøkstur. Hetta ger at fólk gerast ríkari og betrar serliga um støðuna hjá teimum, ið hava fingið lut í økta frívirðinum. Tað, at fólk gerast ríkari, kann økja um nýtsluna. Hetta sóu vit í árunum undan seinastu fíggjakreppu, men tølini, sum vit hava tøk, benda ikki á, at hetta ger seg galdandi í løtuni. Økt bjartskygni hjá føroysku húsarhaldunum kann tó føra til, at hetta møguliga broytist.

## I 1.3 Vinnuviðkomandi bygnaðarbroytingar

Samstundis, sum fíggjarkreppan hevur havt sína ávirkan á búskapargongdina í Føroyum, eru stórar bygnaðarligar broytingar farnar fram í føroyska búskapinum. Eitt er, at fólkasamansetingin er broytt; nakað annað er, at vinnugreinabýtið er broytt, og at útflutningsmynstur og marknaðarlond Føroya eisini eru broytt.

Mynd I 4 vísir talið av løntakarum, og mynd I 5 vísir virðisøkingina býtta á vinnurgreinar.

Av mynd I 4 sæst lutfalsliga gongdin í løntakaratalinum býtt á tilfeingisvinnur, byggi- og framleiðsluvinnur og tænastuvinnur. Gongdin í samansetingini minnir um hana í okkara grannalondum, men tykist at ganga nakað seinni. Í grannalondunum eru tertieru vinnurnar vaksnar í løntakaratali, og tilfeingisvinnurnar minkaðar, og somuleiðis eisini framleiðsluvinnurnar. Hendan gongdin hevur gjørt seg galdandi í Føroyum fram til umleið 2011, men síðani hevur prosentbýtið av løntakarum, sum starvast í tilfeingisvinnuni (primera vinnan, tvs. serliga uppsjóvarvinnan og alivinnan) og í tænastuvinnuni (tertiera vinnan) verið støðugt, meðan byggi- og framleiðsluvinnan (sekundera vinnan) er vaksin nakað.

Tað er væl kent í búskaparsøguni, at fyritøkur, sum virka á marknaðum við kapping, gera íløgur í framleiðslutól, ið eru meira tøkniliga framkomin, fyri at styrkja seg í kappingini og yvirliva. Hetta hevur við sær produktivitetsvøkstur, sum merkir, at fyritøkan kann framleiða meiri við somu arbeiðsmegi ella tað sama við minni arbeiðsmegi, og hevur tí eisini fyri allan búskapin við sær vøkstur og tillagingar í vinnubygnaðinum.

Nógvar fyritøkur í tilfeingisvinnum (t.d. uppsjóvarvinnur) og í byggi- og framleiðsluvinnum (t.d. byggivinna og fiskaframleiðsla) brúka framkomin framleiðslutól og eru ofta kapitaltungar. Tað er tí nærliggjandi at halda, at produktivitetsvøkstur er partur av grundini til at løntakararnir í hesum vinnum minka sum partur av øllum løntakarum – úr 38%[3] í 1999 og í 29%[4] í 2012, sí mynd I 4. Produktivitetsvøksturin er ivaleyst hildin fram aftaná 2012. Tó eru løntakararnir í bygging og framleiðsluvinnum øktir upp í 16% í 2018 og 2019.

Tað, at framleiðsluvinnan hevur eitt vaksandi tal av løntakarum, kann hava samband við, at byggivinnan er vaksin í hákonjunkturinum hesi árini. Tað, at talið av løntakarum í tilfeingisvinnuni ikki er minkað á sama hátt sum í okkara grannalondum, kemur av stóru framgongdini í ali- og uppsjóvarvinnuni, ið er ávirkað av stóru tilfeingisrentuni.

**Løntakarabýti skift á tilfeingisv., bygging og framl. og tænastuv., 1999-2019** **Mynd I 4**




**Kelda:** Hagstova Føroya

[3] Tilfeingisvinnur 25% + Bygging og framleiðsla 13%

[4] Tilfeingisvinnur 17% + Bygging og framleiðsla 12%

Meðan lutfallið av løntakarum í tilfeingis- og framleiðsluvinnuni hevur verið støðugt síðani 2011, hevur tilfeingisvinnan havt ein vaksandi prosentpart av samlaðu virðisøkingini, ið, sum sagt, í høvuðsheitum skyldast stóru tilfeingisrentuni.

Virðisøkingin í mió. kr. býtt á tilfeingisvinnur, byggi- og framleiðsluvinnur og tænastuvinnur er víst í mynd I 5. Tilfeingisvinnan er eyðkend við sínum stóru sveiggjum í virðisøkingini yvir ár.

**Virðisøking býtt á tilfeingisv., bygging og framl. og tænastuvinnur, 1998-2020** **Mynd I 5**




**Kelda:** Hagstova Føroya til og við 2017. Árini 2018-2020 eru egnar metingar.

Mynd I 6 vísir gongdina í bruttorakstraravlopi og lønum í vinnufyritøkum[5] í mió. kr. Eisini er roknað lutfallið millum bruttorakstraravlop og bruttofaktorinntøku (BFI). Myndin tekur við framroknað tøl fyri árini 2018 til 2020.

Vit síggja, at lønirnar í vinnufyritøkum vuksu nógv fram til fíggjarkreppuna í 2007-08, harnæst fullu tær og vóru í 2013 einans góðar 100 mió. kr. størri enn í 2008. Hetta svarar til ein vøkstur uppá 2,3%, ið umboðar eitt fall í realum virði av lønum[6].

**Bruttorakstraravlop og lønir fyri vinnufyritøkur (geiri S11) í mió. kr. 1998-2019** **Mynd I 6**




**Viðm.:** Vinnufyritøkur eru framleiðandi eindirnar, sum eru partur av geira S11 í tjóðarroknskapinum. Bruttofaktorinntøkan fyri geiran er samansett av lønum vm og bruttorakstraravlopinum hjá hesum eindum.

**Kelda:** Uppgerð hjá Hagstovu Føroya 1998-2017, árini 2018-2019 eru egnar metingar.

[5] Hetta eru allar lønir uttan tær í almennu fyrisitingini og í fíggjarfyritøkum.

[6] Brúkaraprístal 1. ársfjórðing 2008 til 1. ársfjórðing 2013 vaks við 6,5%.

Bruttorakstraravlopið í vinnufyritøkum stóð stórt sæð í stað frá 1998 fram til 2008, men er vaksið stórliga síðan 2008. Talan er um umleið eina trífalding í bruttorakstraravlopi úr 1.581 mió. kr. í 2008 uppí 5.549 mió. kr. í 2019.

Lutfallið millum bruttorakstraravlop og BFI er vaksið nógv síðani 2008, úr 26% í 2008 uppí 46% í 2019. Orsøkin til hesa lutfalsliga stóru broyting síðan 2008 eru stóru vinningarnir í uppsjóvarvinnuni og alivinnuni seinastu árini, sum ikki eru falnir løntakarum í allari vinnuni í lut, men mest kapitalánarunum.

Mynd I 7 vísir talið av løntakarum og roknaða miðal ársløn pr. løntakara í vinnufyritøkum[7] frá januar 1999 til november 2019. Strikumyndirnar byggja á útrokningar av leypandi 12 mánaða miðal, sí tekstkassa 4.

**Løntakarar og miðal ársløn í privatum vinnuligum virksemi, jan-99 til nov-19** **Mynd I 7**




**Viðm.:** Talið av løntakarum (12 mðr. leypandi miðal) og lønarútgjaldingarnar (ársløn pr. løntakara, 12 mðr. leypandi miðal) frá privatum vinnuligum virksemi er í hesari mynd avmarkað til allar útgjaldandi, framleiðandi eindir undantikið tær, ið eru í vinnugreinabólkingunum "Landsfyrisiting", "Kommunur og ríkisstovnar", "Undirvísing" og "Heilsu- og almannaverk".
**Kelda:** Hagstova Føroya og egin útrokning av løntakararum, 12 mðr. leypandi miðal og miðal ársløn pr. løntakara, 12 mðr. leypandi miðal.

Myndin vísir, at stór sveiggj hava verið í løntakaratalinum í vinnufyritøkum árini 1999-2019. Ein stórur vøkstur var fram til 2004, eitt lítið fall í 2005, aftur vøkstur í 2006-08 og síðani eitt fall fram til januar 2012. Eftir januar 2012 hevur aftur verið vøkstur í løntakaratalinum í vinnufyritøkum. Hesin vøksturin hevur serliga verið stórur síðani miðskeiðis í 2014. Síðani januar 2018 er løntakaratalið farið at vaksa skjótari enn miðal árslønin.

Roknað miðalløn pr. løntakara í vinnufyritøkum er vaksin síðani 1999. Strikumyndin í mynd I 7 vísir nøkur sveiggj, ið hanga saman við konjunkturgongdini.

Myndin bendir á, at produktivitetur og reallønir í vinnufyritøkum eru vaksin nevnivert síðan 1999, tí meðan miðallønsgjaldingarnar næstan eru tvífaldaðar er brúkaraprístalið bert vaksið góð 20% síðan aldarskiftið.

Øvugt vísir mynd I 7, at roknað løn pr. løntakara í vinnufyritøkum er vaksin nógv í sama tíðarskeiði. Vísandi til mynd I 6 er talan sostatt um, at talið av løntakarum í vinnufyritøkum er nógv minkað fram til 2013, sí mynd I 7, og at tað tí verður meira løn til hvønn, tá miðaltalið verður roknað.

---

Búskaparráðið er framvegis av tí fatan, at skeiklandi skipanir forða vinnuligari tillaging til produktivitetsvøkstur, sum eisini var víst á í undanfarnu frágreiðing. Dømi um hetta eru serskattaskipanir, sum sjófólk og uttanlandsarbeiðarar fáa. Hesi viðurskifti hava Skattanevndin og Vinnuhúsið somuleiðis víst á í sínum frágreiðingum. At fult gjald ikki verður kravt fyri nýtsluna av náttúrurættindum skeiklar somuleiðis hesi tillaging. Umframt tað, skeiklar avgjaldið á fisk, sum verður avreiddur uttanlands, tillagingarnar til produktivitetsvøksturin. Avgjaldið virkar sum vinnuligur stuðul til fiskavirking á landi.

[7] Hetta eru allir løntakarar uttan teir í almenna geiranum og í fíggjarfyritøkum.

Samlað sæð metir Búskaparráðið, at reglurnar rundan um fiskivinnuna eru ov stirvnar og skeiklandi við óskynsamum avmarkingum. Avtøka av hesum serskipanum hevði frígivið arbeiðsmegi, sum tørvur er á bæði nú við troti á arbeiðsmegi, og í langa siktinum, har brúk er fyri produktivitetsvøkstri/búskaparvøkstri fyri at vaksa um atdráttarmegina í samband við tilflyting, og sum kann møta komandi haldførisavbjóðingum við broyttu fólkasamansetingini. Nýskipanir í fiskivinnuni vera viðgjørddar kapittul II.

---

Gongdin í fólkatalinum og nettotilflytingini er týðandi indikatorur fyri búskapargongdina og vinnuligu gongdina í Føroyum, bæði í tí stutta og langa siktinum.

Mynd I 8 vísir sambandið millum nettotilflyting og arbeiðsloysi. Tølini fyri nettotilflyting byggja á leypandi 12 mánaða samanlegging, sum vísir trendin í gongdini, sí tekstkassa 4. Myndin vísir, at nettofráflytingin sum heild hevur verið rættiliga stór í tíðarskeiðnum juli 2004 til 2014. Trý tíðarskeið hava verið við positivari nettotilflyting, nevniliga árini 1998-2004, partar av 2008-2009 og árini 2014 til november 2019. Nettotilflytingin hevur stabilserað seg á umleið 600 árligar tilflytingar.

Nettotilflytingin í seinastuni hevur uttan iva samband við vaksandi tal av størvum í Føroyum. Størri arbeiðsloysi í Føroyum sýnist at minka um nettotilflytingina og øvugt, tó uttan at hetta samband forklárar alla gongdina í tølunum. Seinastu tølini benda á, at nettotilflytingin heldur áfram í næstkomandi tíð.

Burðaravlopið og nettotilflytingin geva fólkavøksturin.

Arbeiðsloysið var 0,9% í november 2019, og lága arbeiðsloysið stendur við.

**Arbeiðsloysi og nettotilflyting, jan-99 til nov-19** **Mynd I 8**




**Kelda:** Hagstova Føroya og egin útrokning av nettotilflyting, leypandi 12 mánaða samanlegging.

Mynd I 9 vísir gongdina í fólkatalinum sum leypandi 12 mánaða miðal og í nettotilflytingini sum leypandi 12 mánaða samanlegging. Vit síggja, at fólkatalið stóð í stað frá 2004 til 2014. Í 2014 var fyri fyrstu ferð síðan 2009 vøkstur í fólkatalinum, og hevur stórur vøkstur verið líka síðan.

**Fólkatal og nettotilflyting, jan-99 til nov-19** **Mynd I 9**




**Kelda:** Hagstova Føroya og egin útrokning av nettotilflyting, leypandi 12 mðr. samanlegging og fólkatalinum, uppgjørt sum 12 mðr. leypandi miðal.

**Tekstkassi 3: Tilflyting til Føroya og eftirspurningur eftir arbeiðsmegi í byggivinnuni**

Frá stórum byggivirkjum hevur Búskaparráðið fingið at vita, at talið av útlendskum handverkarum í Føroyum er vaksið nógv síðan miðskeiðis í 2017, og at tað hevur verið ein stór avbjóðing at finna bústaðir til hesar handverkarar. Hetta kundi bent á, at ein týðandi partur av tilflytingini til Føroya hevur fevnt um útlendskar handverkarar, sum flyta millum Føroyar og útlond, nú eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi í byggivinnuni er stórur vegna vaksandi virksemi (sí lønargjaldingar í talvu I 5), og at hetta vaksandi virksemið sostatt hevur ávirkað løntakaratal, almennu inntøkurnar, BTÚ-vøkstur og fastognarprísir. Minkar hetta byggivirksemið, kemur tað at ávirka nevndu støddir øvugtan veg.

**Tekstkassi 4: Trend útrokningar, ið byggja á 12 mánaða leypandi samanlegging og miðal, herundir ár til ár %-broytingar, stutt frágreiðing**

12 mánaða leypandi samanlegging er samanlegging av 12 undanfarnu mánaðunum, roknað fyri hvønn mánaða.
12 mánaða leypandi miðal er miðal av seinastu 12 undanfarnu mánaðunum, roknað fyri hvønn mánaða. Ár til ár %-broytingar bygt á leypandi 12 mánaða samanlegging ella miðal. Týdningurin av hesum háttalagnum kann lýsast við einum dømi í mynd I 18a og b (samlaðar lønir):
Fyri juli 2018 leggja vit saman lønirnar 12 mánaðir aftur í tíðina frá jul-18 til aug-17 og gevur hetta 9,228 mia. kr. Vit leggja eisini saman 12 mánaðir aftur í tíðina frá jul-17 til aug-16 og gevur hetta 8,760 mia. kr. Ár til ár %-broytingin (ella vakstrarratan) verður so útroknað sum 9,228/8,760 – 1 = 5,3%.
Hetta háttalag verður nýtt ístaðin fyri vanliga háttalagið, har vøksturin verður roknaður higartil í árinum í mun til sama tíðarskeiðið árið fyri. Hvør mánaði verður her "roknaður upp" til eitt ársstøði. Tað verður roknað út hvussu %-vísi vøksturin (ella %-vísa fallið) hevur verið fyri hendan "upproknaða mánaðin" í mun til somuleiðis "upproknaða mánaðin" eitt ár frammanundan. Ein mánaði, ið víkir nógv frá undanfarnu mánaðunum, ger sostatt ikki so nógvan mun í "upprokningini".

# I 1.4 Laksa- og oljuprísir

Laksa- og oljuprísir ávirka føroyska búskapin stórliga í leypandi prísum.

Mynd I 10 vísir gongdina í oljuprísinum[8] í donskum krónum síðan januar 2004.

Vit síggja, at oljuprísurin hevur sveiggjað rættiliga nógv, og at hann í løtuni liggur á umleið 360 DKK/tunnu. Eitt stórt prísfall hendi á olju eftir august 2014. Í $/tunnu hevur prísurin síðan primo 2015 sveiggjað millum í høvuðsheitum 40 og 66 dollarar, men er hann farin upp um 70 dollarar í stuttum tíðarskeiðum av 2018 og 2019.

**Spotprísur á olju (DKK/tunnu), jan-04 til feb-20** **Mynd I 10**




**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í oljuprísi frá Thomson/Reuters og gjaldoyrakursi frá Danmarks Nationalbank.

Mynd I 11 vísir gongdina í laksaprísinum í donskum krónum seinastu árini. Vit síggja, at sveiggini eru stór, men at trendurin er ein prísvøkstur seinastu nógvu árini. Prísurin var í hæddini í januar 2017, men var niðri á 32 kr/kg í september 2019, og var í januar 2020 uppi á 60 kr/kg. Fyrstu dagarnar í februar er laksaprísurin fallin niður á 47 kr/kg, og stavar hetta fall m.a. frá Corona virusinum.

[8] Hetta er WTI (West Texas Intermediate) oljan, hvørs prísir vanliga eru lægri enn norðsjóvarolju (Brent) prísir.

**Spotprísur á laksi (DKK/kg) hvørja viku, jan-04 til feb-20** **Mynd I 11**




**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í laksaprísi (í NOK) frá fishpool.eu og gjaldoyrakursi frá Danmarks Nationalbank.

Mynd I 12 vísir árligu prosentbroytingina í laksaprísinum í donskum krónum (miðalprísur fyri allar vikur í árinum). Í 2013 var ein prísvøkstur uppá 43% í mun til árið fyri, meðan prísvøksturin í 2016 var 44% í mun til árið fyri. Í 2017 var ein lítil príslækking á 4%, og tað sama er galdandi í 2018, har príslækkingin hevur verið 3%. Laksaprísurin fall 5% í 2019 í mun til 2018.

**Árlig prosent broyting í spotprísinum á laksi (DKK), 2005-2019** **Mynd I 12**




**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í laksaprísi (í NOK) frá fishpool.eu og gjaldoyrakursi frá Danmarks Nationalbank.

## I 1.5 Handilsjavnin

Talva I 2 vísir gongdina í vøruútflutningi og vøruinnflutningi Føroya fyri 2019 sammett 2018.

Innflutningstølini vísa, at innflutningsvirðið 2019 veksur í mun til 2018 við tilsamans 4,9%. Um skip og flogfør verða roknaði frá, vaks innflutningurin 2,2%.

Frágreiðingar um útrokningarhátt fyri vakstrarískoyti eru at finna í frágreiðing Búskaparráðsins á vári 2016 á síðu 11.

Í 2019 var innflutt fyri 8,1 mia. kr. av vørum. Hetta er met, og fyri fyrstu ferð er árligi innflutningurin omanfyri 8 mia. kr. Samanborið við 2018 er vøksturin 379 mia. ella 4,9%. Innflutningurin til beinleiðis nýtslu er vaksin við 4,7%, meðan innflutningurin av bilum o.ø. flutningsførum er vaksin við 14,5% í 2019 sammet við 2018. Innflutt tilfar til byggivirki er vaks við 1,9%. Innflutningurin av brennievni o.t. er minkað 11,7% ella 150 mió. kr., og samstundis er innflutningurin av maskinum o.a. útgerð minkaður við 21,5%.

Samlaði útflutningurin í 2019 var 9,5 mia. kr. Samanborið við árið frammanundan er talan um ein vøkstur á 1,5 mia. kr. ella 19%. Uttan skip og flogfør vaks útflutningurin 19,1%. Vøkstur var í útflutninginum av uppsjóvarfiski og alifiski uppá ávikavist 30,3% og 20,9%, meðan útflutningurin av botnfiski og øðrum fiskasløgum vaks við 8,8%. Vit útflyta framvegis mest av laksi, vøksturin var í 2019 700 mió. kr., og fór útflutningurin av laksi fyri fyrstu ferð upp um 4 mia. kr.

Yvirskotið á handilsjavnanum er vaksið seinastu árini og hevur verið serliga stórt árini 2016, 2017 og 2019, og stavar hetta partvís frá betringini í býtislutfallinum í uttanlandshandlinum. Handilsjavnin í 2019 vísti eitt yvirskot uppá 1.425 mió. kr. (við skipum).

**Inn- og útflutningur av vørum árini 2018 og 2019 og handilsjavnin 2011-2019** **Talva I 2**

| | *Mió. DKK (cif)* | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Innflutningur* | *2018* | *2019* | *Vøkstur* | *%-vøkstur* | *Vakstrar-ískoyti* | *Støddar-lutfall* |
| Til hav- og landbúnað | 485 | 550 | 64 | 13,3% | - | 6,3% |
| Til byggivirki | 816 | 832 | 16 | 1,9% | - | 10,5% |
| Til aðra framleiðslu | 1.614 | 1.913 | 299 | 18,5% | - | 20,9% |
| Brennievni o.t. | 1.283 | 1.134 | -150 | -11,7% | - | 16,6% |
| Maskinur o.o. útgerð | 1.014 | 795 | -218 | -21,5% | - | 13,1% |
| Bilar o.o. flutningsfør | 494 | 565 | 72 | 14,5% | - | 6,4% |
| Til beinleiðis nýtslu | 1.580 | 1.654 | 75 | 4,7% | - | 20,4% |
| Skip, flogfør o.t. | 213 | 424 | 211 | 99,1% | - | 2,8% |
| Rávøra til fiskavirking | 244 | 254 | 10 | 4,2% | - | 3,2% |
| **Vøruinnflutningur í alt** | **7.743** | **8.122** | **379** | **4,9%** | **100%** | **100%** |
| Vøruinnflutningur ex. skip, flogfør o.t. | 7.530 | 7.698 | 167 | 2,2% | - | 97,2% |

| | *Mió. DKK (fob)* | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Útflutningur* | *2018* | *2019* | *Vøkstur* | *%-vøkstur* | *Vakstrar-ískoyti* | *Støddar-lutfall* |
| Alifiskur | 3.342 | 4.042 | 700 | 20,9% | 45,9% | 41,7% |
| Uppsjóvarfiskur | 1.848 | 2.407 | 559 | 30,3% | 36,7% | 23,0% |
| Botnfiskur og onnur fiskasløg | 2.292 | 2.494 | 202 | 8,8% | 13,2% | 28,6% |
| Aðrar vørur | 447 | 509 | 62 | 13,8% | 4,1% | 5,6% |
| Skip, flogfør o.t. | 90 | 94 | 5 | 5,4% | 0,3% | 1,1% |
| **Vøruútflutningur í alt** | **8.023** | **9.546** | **1.523** | **19,0%** | **100%** | **100%** |
| Vøruútflutningur ex. Skip, flogfør o.t. | 7.934 | 9.452 | 1.518 | 19,1% | - | 98,9% |

| *Handilsjavnin, árini 2011-2019* | *2011* | *2012* | *2013* | *2014* | *2015* | *2016* | *2017* | *2018* | *2019* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Við skip o.t., mió DKK | 128 | -1.167 | -169 | 348 | 758 | 1.492 | 1.516 | 280 | 1.425 |
| Uttan skip o.t., mió DKK | 222 | -145 | 552 | 584 | 1.182 | 1.789 | 1.865 | 403 | 1.754 |

**Kelda:** Hagstova Føroya

## I 1.6 Gjaldsjavnin

Gjaldsjavnin er ein uppgerð av búskaparligu viðskiftunum millum Føroyar og umheimin fyri eitt ávíst tíðarskeið - vanliga 1 ár.

Gjaldsjavnin gevur eina lýsing av samlaða handilinum, sum Føroyar hava við umheimin (inntøkur frá útflutningi og útreiðslur til útlond), umframt hvat vit eiga og skylda uttanlands (nettoogn í útlondum ella nettoskuld til útlond).

Gjaldsjavnin er ein roknskaparlík uppgerð. At uppgerðin er roknskaparlík merkir m.a., at vit hava eina *rakstraruppgerð gjaldsjavnans* (skráseting av inntøkum og útreiðslum) og eina *kapitaluppgerð gjaldsjavnans* (skráseting av ogn og skuld). Sammeta vit við ein vanligan roknskap, svarar *nettoognin í útlondum* (ella nettoskuldin til útlond) *í kapitaluppgerð gjaldsjavnans* til *eginognina* í einum vanligum roknskapi. Netto rakstraruppgerð gjaldsjavnans svarar eisini til roknskaparúrslitið í einum vanligum roknskapi.

---

Í einum vanligum roknskapi ber til at rokna seg fram til (ella at avstemma) ársroknskaparúrslitið netto, tá vit kenna árligu broytingina í eginogn, og vit eisini fáa upplýst kursbroytingar og avskrivingar í árinum. Sostatt ber til at uppgera netto roknskaparúrslitið frá bæði **rakstarsíðuni** (ið er tað vanliga) og frá **statussíðini** (ið ikki er so vanligt).

Tá tað snýr seg um gjaldsjavnan, ber tað tilsvarandi til at rokna seg fram til (ella at avstemma) netto rakstraruppgerð gjaldsjavnans, tá vit kenna árligu broytingina í nettoogn/nettoskuld í útlondum, og vit eisini fáa upplýst kursbroytingar og avskrivingar í árinum.

Í praksis er tað ein størri avbjóðing at gera upp árligu broytingina í ogn og skuld í útlondum, og eisini at kenna til allar kursbroytingar v.m. í árinum.

Tessvegna verður hesin háttur til óbeinleiðis at gera upp netto rakstraruppgerð gjaldsjavnans frá **statussíðuni** ikki serliga neyvur. **Tí verður størri dentur lagdur á at fáa til vega allar tøkar upplýsingar um inntøkur og útreiðslur *á rakstraruppgerð gjaldsjavnans* og at gera nettoúrslitið upp við støði í hesum.**

Gjaldsjavnin verður sostatt hereftir uppgjørdur frá rakstrarsíðuni. Samstundis fer eisini at verða roynt at fáa til vega neyvari upplýsingar um ogn og skuld í útlondum, soleiðis at ein avstemming eisini kann fara fram út frá árligu broytingini í status.

Av tí at tað er ein so stór og arbeiðskrevjandi avbjóðing neyvt at gera upp gjaldsjavan, hava gjaldsjavnaúrslitini ikki verið stórvegis umrødd í undanfarnu búskaparráðsfrágreiðingum. Vónandi broytist hetta.

---

Mynd I 13 vísir, at í 2017 vóru inntøkurnar á rakstrarsíðu gjaldjavnans 13,8 mia kr, og útreiðlurnar vóru 10,5 mia. kr. Hetta gav eitt nettoúrslit upp á 3,3 mia. kr. Bert 4 ferðir síðan 1998 hevur úrslitið verið negativt.

Nýggjari tøl eru ikki tøk, men mett verður at javnin í 2018 og 2019 eisini er stórt positivur.

**Rakstrarviðurskifti gjaldjavnans, høvuðstøl, 1998 til 2017** **Mynd I 13**




**Viðm.:** Rakstraruppgerð gjaldjavnans er eisini nevnd leypandi postar á gjaldjavnanum.
**Kelda:** Hagstova Føroya

Mynd I 14 vísir, at í 2017 var nettoognin 5,7 mia kr. Bruttoskuldin og bruttoognin vóru hetta árið ávikavist 22,4 mia. kr. og 28,0 mia. kr.

Bert tríggjar ferðir síðan 2003 hevur nettoognin verið negativ.

Nýggjari tøl eru ikki tøk, men mett verður, at nettoognin í útlondum í 2018 og 2019 eisini er vaksandi.

**Ogn og skuld uttanlands, 2003 til 2017** **Mynd I 14**




**Kelda:** Hagstova Føroya

Rakstraruppgerð gjaldsjavnans er bólkað sum víst í talvu I 3. Talvan vísir nettotøl fyri útreiðslur og inntøkur. Bólkingin av **inntøkum** og **útreiðslum** er forklárað niðanfyri:

- Vøruhandil er inn- og útflutningur av vørum. Her finnist neyv skráseting.
- Tænastuhandil er inn- og útflutningur av tænastum. Her finnist ikki neyv skráseting.
- Inntøkuflytingar eru ein samanteljing av lønarflytingum og íløgu- og fíggjarvirksemi.
- Lønarflytingar eru keyp og søla av arbeiðsmegi millum Føroyar og umheimin. **Lønarinntøkan** stavar frá útlendskum arbeiðsgevarum, herundir m.a. DIS, NIS, útlendsk fiskiskip og

frálandavinnu (supplyskip o.a) umframt arbeiði á landi, t.d. handverkarar. **Lønarútreiðsla** er lønir goldnar útlendingum frá føroyskum arbeiðsgevarum.

- Íløgu- og fíggjarvirksemi er uppgerð av inntøkum og útreiðslum, ið stava frá fíggjarogn. Fíggjarognir verða bólkaðar í beinleiðis íløgur, virðisbrøv, innlán og útlán.
- Rakstrarflytingar eru veitingar til og úr útlondum, har onki beinleiðis arbeiði ella annað avrik er knýtt at flytingini. Dømi um tílíkar flytingar eru ríkisveitingar, eftirlønir og endurtryggingargjøld.

**Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans, høvuðstøl netto, 1998-2017** **Talva I 3**

| Ár | Vørur | Tænastur | Lønar-flytingar | Íløgu- og fíggjarvirksemi | Rakstrar-flytingar | Aðrir geirar | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1998 | 464 | -286 | 287 | -57 | 994 | 87 | 1.488 |
| 1999 | 56 | -296 | 313 | -15 | 1009 | 93 | 1.160 |
| 2000 | -302 | -373 | 310 | 22 | 1.050 | 98 | 804 |
| 2001 | 302 | -423 | 224 | 31 | 1.072 | 56 | 1.261 |
| 2002 | 412 | -513 | 245 | 71 | 696 | 53 | 963 |
| 2003 | -854 | -477 | 307 | 55 | 701 | 47 | -221 |
| 2004 | 61 | -448 | 263 | 131 | 700 | 70 | 777 |
| 2005 | -454 | -583 | 280 | 86 | 779 | 36 | 143 |
| 2006 | -600 | -592 | 314 | 87 | 773 | 108 | 90 |
| 2007 | -1228 | -825 | 307 | 67 | 768 | 361 | -550 |
| 2008 | -457 | -623 | 364 | -286 | 758 | 27 | -217 |
| 2009 | 70 | -841 | 479 | -757 | 761 | -6 | -294 |
| 2010 | 509 | -899 | 535 | -365 | 779 | 70 | 629 |
| 2011 | 321 | -839 | 640 | 86 | 782 | 243 | 1.233 |
| 2012 | -936 | -534 | 708 | 24 | 789 | -12 | 38 |
| 2013 | 125 | -727 | 806 | 19 | 780 | 40 | 1044 |
| 2014 | 680 | -547 | 802 | -213 | 807 | 17 | 1545 |
| 2015 | 1086 | -916 | 758 | -290 | 817 | 45 | 1500 |
| 2016 | 1773 | -289 | 791 | -100 | 789 | 57 | 3021 |
| 2017 | 1824 | -384 | 707 | -46 | 785 | 387 | 3273 |

**Kelda:** Hagstova Føroya

Bólkingin av **ogn** og **skuld** (nettoogn) er forklárað niðanfyri:

Uppgerð av ogn og skuld lýsir, hvat føroyingar eiga og skylda uttanlands. Nettoognin er munurin ímillum ogn og skuld. Er nettoognin positiv, merkir hetta, at tað er umheimurin, ið hevur skuld til Føroya. Uppgerðin lýsir fíggjarstøðuna hjá Føroyum í mun til umheimin við ársenda á hvørjum ári. Tey fíggjarsløgini, ið tilsamans mynda uppgerðina av ogn og skuld eru:

- Beinleiðis íløgur, har einstakur íleggjari eigur meira enn 10% av partapeninginum.
- Partabrøv, íløguprógv og líknandi, ið føroyingar eiga uttanlands og útlendingar eiga í Føroyum.
- Lánsbrøv, ið føroyingar eiga uttanlands og útlendingar eiga í Føroyum.
- Vøru- og tænastukredittir, ið lýsa, hvat føroyingar skylda uttanlands, og hvat teir eiga til góðar í sambandi við inn- og útflutning.
- Innlán er uppsparing hjá føroyingum uttanlands ella uppsparing hjá útlendingum í Føroyum. Her kann eisini vera talan um veiting av trygd (garanti í sambandi við vørukeyp o.a.)
- Útlán, ið er uppgerð av útlendskum lánum til føroyingar (íroknað kredittfeløg) til privat og vinnulig endamál. Tað sama ger seg galdandi hjá føroyskum fíggjarstovnum, sum veita umheiminum lán.

**Nettoogn í mió kr. uttanlands skift á fíggjarslag, 2003-2017** **Talva I 4**

| Ár | Beinleiðis íløgur | Partabrøv o.a. | Lánsbrøv | Vøru/tænastu kredittir | Innlán | Lán | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2003 | 165 | 467 | 4.514 | | 464 | -2.062 | 3.584 |
| 2004 | 197 | 489 | 4.557 | 42 | 376 | -2.090 | 3.570 |
| 2005 | 87 | 911 | 4.406 | 89 | 2.284 | -3.425 | 4.352 |
| 2006 | 262 | 1.538 | 4.298 | 58 | 3.648 | -4.742 | 5.062 |
| 2007 | 803 | 1.130 | 5.188 | 63 | 2.913 | -6.128 | 3.969 |
| 2008 | 725 | 31 | 5.707 | 242 | 3.625 | -8.527 | 1.803 |
| 2009 | 1.133 | 1.867 | 6.111 | 199 | 3.647 | -11.411 | 1.546 |
| 2010 | -648 | 90 | 7.224 | 94 | 4.729 | -11.270 | 219 |
| 2011 | 513 | -417 | 7.356 | 221 | 4.013 | -9.706 | 1.981 |
| 2012 | 679 | -381 | 6.833 | 411 | 4.389 | -10.413 | 1.518 |
| 2013 | 293 | -2.061 | 6.647 | 482 | 3.320 | -9.080 | -399 |
| 2014 | -28 | -3.757 | 7.809 | 524 | 2.470 | -8.156 | -1.139 |
| 2015 | 945 | -6.794 | 8.892 | 298 | 3.013 | -7.013 | -659 |
| 2016 | 366 | -5.327 | 11.099 | 304 | 3.198 | -7.144 | 2.496 |
| 2017 | 320 | -3.270 | 11.887 | 279 | 3.196 | -6.721 | 5.692 |

**Kelda:** Hagstova Føroya

**Tekstkassi 5: Gjaldsjavnauppgerð**

Tað kann vísast at niðanfyri standandi idenditetur er galdandi fyri gjaldsjavauppgerðina:

(X - M) = (T – G) + (S – I), har ið
X = Inntøkur frá útlondum
M = Útreiðslur til útlond
(X - M) = rakstrarúrslit gjaldsjavnans, X - M > 0 merkir yvirskot, X - M < 0 merkir hall
G = almennar útreiðslur
T = almennar inntøkur
(T - G) merkir netto roknskaparúrslit (uppsparingarúrslit) almenna geirans
S = uppsparing í privata geiranum
I = íløgur í privata geiranum
(S - I) merkir uppsparingsyvirskotið í privata geiranum

Hetta merkir, at rakstrarúrslit gjaldsjavnan verður avgjørt av, hvussu stórt uppsparingaryvirskotið er í privata geiranum (S - I) og tí almenna geiranum (T - G).

Eitt positivt rakstrarúrslit (eitt yvirskot) merkir, at vit veita eitt lán svarandi til rakstrarúrslitið til umheimin til íløgu- og nýtsluendamál í útlondum - okkara yvirskotsuppsparing ger hetta neyðugt.

Eitt negativt rakstrarúrslit (eitt undirskot ella hall) merkir, at vit lána pening frá umheiminum til okkara íløgu- og nýtsluendamál - vit noyðast gera hetta, tá okkara egna uppsparing ikki røkkur til.

# I 2 Innlendis eftirspurningur frá húsarhaldunum (privat nýtsla)

## I 2.1 Metingar viðvíkjandi privatu nýtsluni

Privata nýtslan er ein týdningarmikil partur av føroyska búskapinum; í stødd er privata nýtslan á hædd við vøruútflutningin og eisini vøruinnflutningin. Tískil hevur gongdin í privatu nýtsluni stóra ávirkan á BTÚ-vøksturin.

Privata nýtslan verður uppgjørd sum liður í uppgerðini av útreiðslu- ella eftirspurnarsíðuni á tjóðarroknskapinum. Seinastu uppgjørdu tjóðarroknskapartølini viðvíkjandi útreiðslu- ella eftirspurnarsíðuni eru fyri 2017. Fyri tíðarskeiðið aftaná 2017 hava vit bert indikatorar um nýtsluna. Ein indikatorur er innflutningurin av nýtsluvørum (sí talvu I 2); av øðrum indikatorum er gongdin í lønargjaldingum (sí mynd I 18a og I 18b) og MVG-inntøkur landskassans (sí mynd I 15b).

Mynd I 15a vísir gongdina í innflutningi av nýtsluvørum sum leypandi 12 mánaða samanlegging (sí tekstkassa 4) samanhildna við lønargongdina.

Vit síggja, at innflutningurin av hálvdrúgvum nýtsluvørum (t.d. klæðir) og drúgvum nýtsluvørum (t.d. sjónvørp og bilar) er vaksin nógv síðan 2010, serliga aftaná miðskeiðis í 2012.

Stóri vøksturin seinastu tíðina í innflutninginum av drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum hevur verið nýttur í undanfarnum frágreiðingum sum grundgeving fyri at rokna við eini hægri privatari nýtslukvotu í 2014-2019. Hinvegin kann hesin umrøddi nýtsluvøksturin eisini samsvara við ein vøkstur í lønargjaldingum og tøkari inntøku.

Viðmerkjast skal, at lønarinntøkur vunnar í útlondum ikki eru við í lønartølunum handan myndina.

Gongdin í innflutninginum av ódrúgvum nýtsluvørum (t.d. matur og drekka) og gongdin í lønargjaldingunum eru nøkulunda samanfallandi yvir alt tíðarskeiðið. Í hagtølunum fyri innflutning fylla tær ódrúgvu nýtsluvørurnar lutfalsliga meira enn tær drúgvu og hálvdrúgvu nýtsluvørurnar.

**Lønarinntøka og innfluttar nýtsluvørur hjá húsarhaldum, jan-98 til des-19** **Mynd I 15a**




**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í hagtølum Hagstovunnar.

Mynd I 15b vísir gongdina í lønum og MVG-inntøkum landskassans. Tá fíggjarkreppan rakti í 2008 hendi eitt ógvusligt fall í lutfallinum millum MVG og lønargjaldingar. Síðani 2009 hevur hetta lutfallið somuleiðis víst ein fallandi trend, og svarar hetta til, at lønirnar eru vaksnar skjótari enn MVG-inntøkur landskassans. Hetta kundi bent á eitt áhaldandi varsemi viðvíkjandi privatu nýtsluni.

**Gongdin í lønum og MVG, jan-98 til des-19** **Mynd I 15b**




**Viðm.:** Tølini byggja á leypandi 12 mánaðar samanlegging fyri tíðina frá januar 1998 til og við seinast dagførdu tølunum.
**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í lønartølum Hagstovunnar og MVG-tølum frá TAKS

## I 2.2 Gongdin í treystitølum (konjunkturbarometrinum)

Treystitølini frá Hagstovuni í mynd I 16a snúgva seg um metingar hjá húsarhaldunum um fíggjarstøðu teirra eitt ár fram í mun til nú.

**Nettotal - húsarhaldini og teirra væntaða fíggjarstøða eitt ár fram, jan-06 til jan-20** **Mynd I 16a**




**Kelda:** Hagstova Føroya

Myndin vísir fram til juni 2019 eitt stórt og vaksandi bjartskygni, sum ikki hevði verið størri síðan januar 2007. Hereftir er treystitalið lækkað aftur og kann sigast at liggja á somu legu sum áðrenn. Fallið í januar 2018 skal møguliga síggjast í tí samanhangi, at kanningin var gjørd um tað mundið tá tvey stór verkfall vóru, og ein stór uppsagnarrunda hevði verið á Bakkafrost.

Mynd I 16b vísir treystitalið tilsamans fyri føroysku húsarhaldini. Myndin vísir áleið tað sama sum myndin undan henni. Treystitalið hjá húsarhaldunum í juni 2019 var nógv størri enn nakrantíð, meðan treystitalið í januar 2020 fall niður á 5. Hetta er tað lægsta treystitalið fyri húsarhaldini síðani januar 2018, og skulu vit heilt aftur til 2014 fyri at finna eitt lægri tal. Orsøkina til hesa gongd kenna vit ikki. Ein tilgiting er, at hækkandi húsaprísirnir elva til ekka hjá nógvum. Niðanfyri sæst yvirlit yvir broytingar í treystitalinum frá juni 2019 til 2020.

**Vísital - samlað brúkaravísital fyri føroysku húsarhaldini, jan-06 til jan-20** **Mynd I 16b**




**Kelda:** Hagstova Føroya

Mynd I 17 vísir samlaða treystitalið í føroyska búskapinum. Sambært hesi mynd er bjartskygni størri nú enn fyri einum hálvum ári síðani. Samlaða treystitalið er farið úr 22 upp í 32.

Treystitalið er tað samanvigaða vísitalið frá 5 spurnakanningum, sum verða gjørdar í januar og juni hvørt ár. Treystitalið hevur ligið millum 21 og 26 síðan á sumri 2017, men er hesaferð frá kanningini í januar komið upp á 32.

Jaligu metingarnar í tilfeingis- og ídnaðarvinnunum, umframt tænastuvinnum, eru allarhelst fremsta orsøkin til at samlaða treystitalið økist so nógv í nýggjastu konjunkturkanningini.

**Konjunkturbarometrið, jan-06 til jan-20** **Mynd I 17**




**Kelda:** Hagstova Føroya

# I 3 Virksemið í privatu vinnugeirunum (privatar íløgur o.a.) og innlendis eftirspurningurin

## I 3.1 Gongdin viðvíkjandi lønargjaldingum og løntakaratali

Lønarhagtølini hvønn mánaða frá Hagstovuni (útvegað við samtíðarskattaskipanini) eru millum tey mest hentu hagtølini, ið vit hava til tess at lýsa virksemið í búskapinum sum heild og gongdina innan ymsu vinnugreinarnar[9].

Mynd I 18a og I 18b vísa prosentbroytingina í lønartølunum hjá Hagstovuni seinastu árini sum leypandi ár-til-ár broyting (sí útgreining í tekstkassa 4).

Mynd I 18a vísir gongdina í lønargjaldingunum innan primeru og sekunderu vinnugreinarnar, meðan mynd I 18b vísir gongdina í lønargjaldingunum innan tertieru vinnugreinarnar. Í báðum myndum sæst eisini strikumynd fyri samlaðu vinnugreinarnar, so gongdin í teimum einstøku vinnugreinunum kann haldast upp í móti heildargongdini.

Vit síggja á myndunum, at lønargjaldingar í øllum vinnugreinum eru vaksnar seinastu árini. Síðan 2014 hevur størri lutfalsligur vøkstur verið í vøruframleiðsluvinnum og bygging enn í øllum vinnugreinunum tilsamans.

**Lønargjaldingar, á/á broyting í %, jan-08 til des-19** **Mynd I 18a**




**Viðm.:** Tølini byggja á leypandi 12 mánaðar samanlegging.
**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í lønartølum Hagstovunnar.

Lutfalsligi voksturin í privatum tænastuvinnum og í almennum tænastuveitingum hevur hinvegin verið minni enn í øllum vinnugreinunum tilsamans síðan 2014, tó fyri privatar tænastuvinnur einans fram til november 2017.

[9] Gongdin í mánaðarligu lønartølunum frá Hagstovuni samsvarar ikki við gongdina í BTÚ sum lønarinntøku (lønarpartinum av bruttofaktorinntøkuni, BFI). BFI fevnir eisini um samsýning til kapitalin (restinntøkuna). Munur er eisini á tjóðarroknskaparlønum og mánaðarlønum, tí allar lønarviðbøtur eru ikki við í mánaðarlønunum, t.d. pensjóngjøld, tvungin sosial tryggingargjøld og B-inntøkur.

**Lønargjaldingar, á/á broyting í %, jan-08 til des-19** **Mynd I 18b**




**Viðm.:** Tølini byggja á leypandi 12 mánaðar samanlegging.
**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í lønartølum Hagstovunnar.

Vøksturin í almennu lønargjaldingunum hevur verið merkisverdur í 2018 og eisini í januar 2019. Hetta kemur m.a. av at lønargjaldingarnar vóru óvanliga lágar í januar 2018 vegna verkfall og serligar umstøður á almenna arbeiðsmarknaðinum, og tískil verður vøksturin óvanliga høgur í januar 2019.

Lønirnar í almennum tænastuveitingum hava annars søguliga verið tær mest støðugu, meðan stór sveiggj hava verið í tilfeingisvinnum, vøruframleiðsluvinnum og bygging og privatum tænastuvinnum.

Í desember 2019 var ár-til-ár leypandi vøksturin í lønargjaldingum tilsamans 6,8%. Størst vøkstur var í vøruframleiðsluvinnum og bygging (10,4%) og tilfeingisvinnum (9,2%); vøruframleiðsluvinnur og bygging fevna m.a. um fiska-, kryvji- og flakavirkir, og eisini um byggivirksemi og skipasmíð. Stóri vøksturin í lønargjaldingum innan vøruframleiðsluvinnur og bygging stavar serliga frá bygging. Minst vøkstur var í privatu tænastuvinnunum (4,9%).

Á mynd I 18b sæst at vøksturin í lønargjaldingunum hjá tí almenna var 5,5% síðsta árið.

---

Í talvu I 5 niðanfyri eru lønargjaldingar fyri 2018 og 2019 býttar á 23 vinnugreinar. Eisini er víst beinleiðis vakstrarískoyti[10] og støddarlutfall (parturin av heildini).

Av talvuni sæst, at samlaðu lønargjaldingarnar í 2019 vuksu 6,8% sammett við 2018, og at vakstrarískoytið var serliga høgt fyri bygging (16,4%), kommunur og ríkisstovnar (11,5%) og ali- og kryvjivirki (11,3%).

Lønargjaldingar eru A-skattskyldugar lønir, sum fyritøkur við heimstaði í Føroyum rinda. Hagtølini fevna bara um løn fyri útint arbeiði. Allar lønargjaldingar verða taldar uppí, sum lúka omanfyri nevndu krøv, uttan mun til løntakarin er føroyingur ella útlendingur.

[10] Í talvu I 3 er vakstrarískoytið stigmarkað til 100%.

**Lønargjaldingar, vakstraríiskoyti fyri lønir og støddarlutfall fyri vinnugreinar árini 2018 og 2019** **Talva I 5**

| | Mió DKK | | | %-vøkstur | Vakstraríiskoyti | Støddarlutfall |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2018 | 2019 | Vøkstur | | | |
| Landbúnaður | 24 | 25 | 1 | 5,7% | 0,2% | 0,3% |
| Fiskiskapur | 1.020 | 1.078 | 58 | 5,6% | 8,9% | 10,7% |
| Ali- og kryvjivirki | 359 | 432 | 73 | 20,3% | 11,3% | 4,3% |
| Ráevnisvinna | 56 | 57 | 2 | 3,2% | 0,3% | 0,6% |
| Fiskavøruídnaður | 393 | 416 | 22 | 5,7% | 3,5% | 4,1% |
| Skipasmiðjur, smiðjur | 274 | 332 | 58 | 21,0% | 8,9% | 3,3% |
| Annar ídnaður | 286 | 289 | 3 | 1,1% | 0,5% | 2,9% |
| Bygging | 825 | 931 | 105 | 12,8% | 16,4% | 9,2% |
| Orku- og vatnveiting | 75 | 78 | 4 | 5,0% | 0,6% | 0,8% |
| Handil og umvæling | 837 | 879 | 42 | 5,1% | 6,6% | 8,7% |
| Gistihús og matstovuvirki | 152 | 164 | 12 | 8,0% | 1,9% | 1,6% |
| Sjóflutningur | 436 | 453 | 17 | 3,9% | 2,6% | 4,5% |
| Flutningur annars | 334 | 362 | 28 | 8,5% | 4,4% | 3,6% |
| Postur og fjarskifti | 140 | 139 | -1 | -1,0% | -0,2% | 1,4% |
| Fígging og trygging | 352 | 356 | 4 | 1,1% | 0,6% | 3,5% |
| Vinnuligar tænastur | 382 | 413 | 30 | 7,9% | 4,7% | 4,1% |
| Húshaldstænastur | 100 | 106 | 6 | 5,8% | 0,9% | 1,0% |
| Landsfyrisiting | 279 | 290 | 11 | 3,8% | 1,6% | 2,9% |
| Kommunur og ríkisstovnar | 1.018 | 1.093 | 74 | 7,3% | 11,5% | 10,9% |
| Undirvísing | 663 | 704 | 41 | 6,2% | 6,4% | 7,0% |
| Heilsu- og almannaverk | 1.175 | 1.222 | 47 | 4,0% | 7,3% | 12,1% |
| Felagsskapir, mentan o.a. | 239 | 236 | -3 | -1,3% | -0,5% | 2,3% |
| Ótilskilað v.m. | 0 | 10 | 10 | 11891,7% | 1,6% | 0,1% |
| **Tilsamans** | **9.419** | **10.064** | **644** | **6,8%** | **100%** | **100%** |

**Kelda:** Hagstova Føroya

Mynd I 19 niðanfyri vísir árstíðarjavnaða talið av løntakarum samanhildið við árstíðarjavnaða talið av fulltíðar arbeiðsleysum.

**Tal av løntakarum og fulltíðar arbeiðsleysum, árstíðarjavnað, jan-08 til nov-19** **Mynd I 19**




**Kelda:** Hagstova Føroya

Í januar 2011 var talið av fulltíðararbeiðsleysum í hæddini (1.998), meðan talið av løntakarum um somu tíð var lágt (23.289). Síðan ársbyrjan 2011 hevur talið av fulltíðar arbeiðsleysum stórt sæð verið støðugt fallandi, meðan løntakaratalið síðan januar 2014 stórt sæð hevur verið støðugt vaksandi. Síðan miðskeiðis í 2014 hevur stór nettotilflyting eisini verið til Føroya, sí mynd I 8.

Árstíðarjavnaða talið av løntakarum var í november 2019 í hæddini (27.998), samstundis sum talið av fulltíðar arbeiðsleysum í november 2019 var lágt (279).

## I 3.2 Gongdin í treystitølum (konjunkturbarometrinum)

Konjunkturbarometrið fyri byggivinnuna, sí mynd I 20, vísir, at talið av bíleggingum er lækkað síðani januar 2019, væntaður prísur og væntaður arbeiðstørvur er somuleiðis lækkaður. Samstundis hevur vinnan tryggjað sær arbeiði í miðal 13 mánaðir fram, og er hetta eitt sindur meira enn í juni í 2019, tá talið var 9 mánaðir. Fyrivarni eigur at vera tikið við hesum tølum fyri juni 2019, tí ikki allar týðandi fyritøkur svaraðu tá.

**Konjunkturbarometrið fyri byggivinnuna, jun-06 til jan-20** **Mynd I 20**




**Kelda:** Hagstova Føroya

Í mynd I 21 eru vístar avmarkingar fyri framleiðsluna í byggivinnuni, sum byggifyritøkurnar hava nevnt sum viðkomandi. Tørvandi eftirspurningur var ein stórur trupulleiki frá 2008 og fram til januar 2014, men er hann tað ikki longur. Síðan miðskeiðis 2013 hevur arbeiðsmegin verið ein týðandi avmarking.

Tá nógvar íløgur verða gjørdar í senn, er altíð ein vandi fyri trýsti á arbeiðsmarknaðinum innan byggiyrkið. Slíkt trýst kann ávirka restina av búskapinum við prís- og lønarvøkstri. Umframt hetta kann trýst á arbeiðsmarknaðin innan byggiyrkið hava neiliga ávirkan á byggiarbeiði, ið er í gongd, tá tað snýr seg um kostnað og góðsku. Í januar 2020 mettu 80% av byggifyritøkunum, at trot á arbeiðsmegi var størsta avmarkingin fyri framleiðsluna í byggivinnuni, og í juni 2019 var hetta talið 75%.

**Konjunkturbarometrið fyri byggivinnu - avmarkingar í framleiðsluni, jun-06 til jan-20** **Mynd I 21**




**Kelda:** Hagstova Føroya

# I 4 Innlendis eftirspurningur frá almenna geiranum - almenn nýtsla og íløgur

## I 4.1 Nýtsla hins almenna

Mynd I 22 vísir gongdina og vøksturin í almennu nýtsluni síðan 2000, sum uppgjørt í tjóðarroknskapinum (ið fevnir um land og sosialar grunnar, kommunur og ríki, men ikki fyritøkur undir almennum ræði). Tølini fyri 2020 byggja á metingar (roknað við myndlanýtslu).

**Almennar nýtsluútreiðslur í mió. kr. og árligur %-vøkstur, 2000 til 2020** **Mynd I 22**




**Kelda:** Uppgerð hjá Hagstovu Føroya árini 2000-2019, 2020 er egin meting.

Frá 2000 til 2008 var vøksturin í almennu nýtsluni sera stórur (millum 5% og 11%). Árini 2009-18 var árligi vøksturin lægri, tá hann var millum 1% og 5%, burtursæð frá 2016, tá vøksturin var 7%. Tølini eru í leypandi prísum. Vøksturin í almennu nýtsluni verður mettur at vera 9% í 2020. Vit skulu heilt aftur til 2008 fyri at síggja líknandi vøkstur í almennu nýtsluni.

**Tekstkassi 6: Dátu um almenna geiran**

Tjóðarroknskapurin fyri almenna geiran byggir á almennar roknskapir, ikki minst landsroknskapin. Við virknaði frá 2010 eru kommunuroknskapir eisini skrásettir í Búskaparskipan landsins (BSL). Somuleiðis eru roknskapir fyri almennar grunnar og stovnar, sum ikki eru á fíggjarlógini, tiknir við í BSL í vaksandi mun. Við hesum eru dátukeldurnar fyri almenna geiran vorðnar munandi betri seinnu árini. BSL hevur eitt stórt tal av bólkingum og útgreiningarmøguleikum til ymiskan umsitingartørv. Kortini er tað ikki altíð lætt við BSL at gera tær bólkingar og útgreiningar, sum verða fyriskrivaðar í tjóðarroknskapinum, sum er hin vanliga nýtti standardurin fyri uppgerð av búskaparstøddum.
Búskaparmyndilin byggir á tjóðarroknskaparbólkingar. Tá hesin búskaparmyndil hevur verið nýttur til framrokningar, hava metingar verið gjørdar av gongdini við støði í bólkingum í BSL. Hetta eru bólkingar, sum ikki altíð hava verið samanfallandi við bólkingar í tjóðarroknskapinum. Eitt ávíst fyrivarni krevst tí í brúki av tølunum.

Tølini benda á, at broytingar í almennu nýtsluni (eins og í almennu íløgunum) hava verið konjunkturviðgangandi – tá nógv hevur verið í kassanum, hevur nógv verið brúkt og øvugt - og hevur hetta økt, heldur enn minkað, um sveiggini í búskapargongdini. Umráðandi er tí hjá tí almenna ikki at endurtaka gongdina frá árunum 1999-2008, nú búskaparliga virksemið aftur er stórt.

Búskaparráðið ger vart við, at demografiskar broytingar í komandi árum fara at gera tað truplari, at avmarka vøksturin í almennu nýtsluni (sí frágreiðing Búskaparráðsins á vári 2015, og kapittul II í hesi frágreiðing).

## I 4.2 Almennar íløgur – íløguútreiðslur undir almennum ræði

Mynd I 23 vísir íløguútreiðslurnar, ið eru undir almennum ræði, frá 2003 til 2020. Talan er um íløgur samsvarandi tjóðarroknskaparuppgerð og ikki samsvarandi roknskaparuppgerð. Tjóðarroknskaparligu íløgurnar eru størri enn roknskaparligu løgurnar; m.a. er alt Landsverk og viðlíkahald, herundir keyp av útbúnaði, sum eru rakstrarkostnaðir í landskassaroknskapinum, roknað sum íløgur í tjóðarroknskapinum.

Í 2020 eru samlaðu íløguútreiðslurnar undir almennum ræði hækkaðar. Hesin stavar bæði frá landi og kommunum. Vit síggja ein týðiligan vøkstur í samlaðu íløgunum hjá landinum í 2020 í mun til 2019, m.a. vegna eina dýrkan av H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum. Viðvíkjandi fyritøkum, ið tað almenna ræður yvir, eru mettu íløguútreiðslurnar fyri 2020 tað sama sum fyri árið frammanundan.

Íløgurnar hjá landinum vóru serliga lágar árini 2009 til 2012, men eru síðani vaksnar nógv, hetta serliga í 2018. Rúsdrekkasøla Landsins, Apotek og Landsverk eru tald við undir landskassan.

Íløgur kommunanna vuksu nógv fram til 2008. Talan var í ávísan mun um íløgur, sum høvdu ligið á láni frá nítiárunum. Betringar í fíggjarstøðu kommunanna ávirkaðu eisini íløguhugin. Íløgur kommunanna fullu tó nógv fram til 2010, men eru vaksnar nógv aftur síðan 2015.

Íløgurnar hjá fyritøkum undir almennum ræði eru vaksnar sera nógv síðan 2015. Hesin bólkur fevnir um SEV, Fjarhitafelagið, vindfeløgini hjá SEV, IRF, Atlantsflog, undirsjóvartunnilsfeløgini, Posta, Vága Floghavn, Føroya Tele við dóttirfeløgum, Bústaðir og kommunalar havnir.

**Íløguútreiðslur undir almennum ræði í mió. kr. árini 2003 til 2020** **Mynd I 23**




**Kelda:** Uppgerð hjá Hagstovu Føroya árini 2003-2019 fyri land og kommunur. Íløgur hjá marknaðarframleiðandi fyritøkum undir almennum ræði eru egnar metingar. 2020 eru egnar metingar fyri allar almennar íløgur.

Kommunurnar yvirtóku eldraøkið í 2015. Nógv bendir á, at hendan yvirtøkan eisini fevnir um eina yvirtøku av einum stórum íløgutørvi á eldraøkinum. Íløgurnar á heilsuøkinum hava verið stórar, men væntandi koma demografisku broytingarnar at krevja enn fleiri almennar íløgur á heilsuøkinum.

Mynd I 24 vísir almennu íløguútreiðslurnar og ár-til-ár vøksturin í hesum. Eins og við almennu nýtsluni, sí mynd I 22, sæst, at framdu almennu íløgurnar eru konjunkturviðgangandi, bæði tá tað snýr seg um land, kommunur og fyritøkur undir almennum ræði, sí mynd I 23 og I 24.

Sum nevnt, er tað umráðandi hjá tí almenna ikki at endurtaka gongdina við almennum íløgum frá 2006-2008, nú búskaparliga virksemið aftur er í stórum vøkstri. Skuldarloftið hjá kommununum – at skuldin

ikki skal koma upp um eina álíkning – riggar ikki sum fíggjarpolitiskt amboð. Neyðugt er við miðvísari fíggjarpolitiskari stýring, ið fevnir um allar íløgur undir almennum ræði, sí kapittul II í búskaparráðsfrágreiðing á vári 2019, ið snýr seg um íløgur almenna geirans.

**Íløguútreiðslur undir almennum ræði í mió. kr. og árligi %-vøksturin, 2004-2020** **Mynd I 24**




**Kelda:** Tølini vísa samlaðu almennu íløgurnar (sí býti í mynd I 20). Uppgerð hjá Hagstovu Føroya árini 2004-2020 fyri land og kommunur. Íløgur hjá marknaðarframleiðandi fyritøkum undir almennum ræði eru egnar metingar. 2020 eru egnar metingar fyri allar almennar íløgur.

## I 4.3 Úrslitið á almennu roknskapunum

Mynd I 25 gevur eitt yvirlit yvir roknskaparúrslit landskassans, RLÚ 1 og RLÚ 2 fyri árini 1998-2020.

**Landskassaúrslitið RLÚ, vanligir og óvanligir postar, 1998-2020** **Mynd I 25**




**Viðm.:** RLÚ 1 er úrslitið av vanligum inntøkum og útreiðslum, meðan RLÚ 2 eisini telur við óvanligar inntøkur og útreiðslur og flytingar til Búskapargrunn.
**Kelda:** Gjaldstovan og Búskaparráðið, 2020 eru metingar.

Landskassin hevði hall øll árini 2008-2015. RLÚ vísti hesi 8 árini samanlagt hall á 2,7 mia. kr. Tey fyrstu av hesum árunum var ógvusligur lágkonjunkturur. Í 2014 og 2015 vóru konjukturarnir linkaðir nógv orsakað av stóru framgongdini í aling og uppisjóvarvinnu, og tað er ivasamt um hesi bæði árini kunnu eyðkennast við lágkonjunkturi. Fýra árini 2016-2019 eru eyðkend av hákonjunkturi og hava víst yvirskot á samanlagt 1,8 mia. kr (íroknað eftirgeving av skuld 0,5 mia. kr). Landskassaúrslitið í 2020 er mett at vera 142 mió. kr., sum er hitt lægsta í hesum hákonjunkturi.

Úrslitið hjá landinum (skattainntøkusíðan) hevur virkað sveiggjmótvirkandi, av tí at undirskot hevur verið í lágkonjunkturi og yvirskot í hákonjunkturi. Hetta er í størstan mun orsakað av sokallaðu automatisku stablisatorunum (tað er tá skattauppkrav hins almenna veksur og arbeiðsloysisstuðul og almannahjálp minka í hákonjunkturi, samstundis sum almenn nýtsla og íløgur eru støðug). Sammett við teir fyrimunarligu konjunkturarnar í fleiri ár og sammett við haldførisavbjóðingarnar í almenna tænastugeiranum í framtíðini, hava yvirskot landskassans hesi seinnu árini verið ov lítil. Hetta fyri at vera mótstøðuførur í verri tíðum móti kreppum (konjunkturniðurgongdir), og fyri at megna komandi haldførisavbjóðingar. Haldførisavbjóðingarnar stava í stóran mun frá demografisku gongdini, sum setir størri krøv til heilsu- og røktartænastur komandi árini.

**Tekstkassi 6: Landskassans úrslit - RLÚ**

RLÚ er landskassans Rakstrar-, Løgu- og Útlánsúrslit, sum tað verður nevnt, og er landskassans samlaða úrslit.

RLÚ 1 fevnir um vanligar postar, meðan RLÚ 2 fevnir um óvanligar postar (RLÚ2=RLÚ2a+RLÚ2b), har RLÚ2a fevnir um óvanligar postar, sum ikki eru flytingar netto til Búskapargrunn. RLÚ 2b fevnir um flytingar netto til Búskapargrunn.

Teir vanligu postarnir eru meira arbeiðsligir í fíggjarætlanar- og fíggjarlógararbeiði. Óvanligir postar eru mangan stórir og ikki afturvendandi postar. Hetta uppbýtið hevur verið brúkt síðan 2004. Sum nakað nýtt, verða 20 prosent av yvirskotinum á RLÚ 1 upp til 200 mió. kr. og 50 prosent av tí, ið er omanfyri 200 mió. kr. flutt í Búskapargrunn; RLÚ fevnir sostatt um hesi trý partsúrslitini, (RLÚ=RLÚ1+RLÚ2; RLÚ2=RLÚ2a+RLÚ2b).

Nøkur dømi um postar á RLÚ2: í 2006 fekk landsstýrið eina kapitalútluting (hálva mia. kr.) umframt vinningsbýti frá BankNordik. Í 2007 fekk tað eina inntøku á 1,3 mia. kr. frá sølu av partabrøvum í BankNordik. Í 2008 lænti landsstýrið íslendsku stjórnini 300 mió. kr., sum vórðu afturgoldnar í 2012. Í 2013 inntøkuførdi landsstýrið eginogn Landsbankans (160 mió. kr.) við avtøkuna. Í 2018 inntøkuførir landsstýrið niðurskriving av láni frá danska statinum (500 mió. kr.) sambært avtalu frá 1998.

**Úrslit almenna tænastugeirans árini 1998 til 2020** **Mynd I 26**




**Kelda:** Gjaldstovan og Búskaparráðið, 2020 eru egnar metingar.

Á mynd I 26 sæst, at gongdin í úrslitinum í almenna tænastugeiranum samanlagt vísir stór sveiggj, sum eru mest ávirkað av sveiggjunum hjá landinum, sum tað eisini framgongur av omanfyri standandi lýsing av úrslitinum hjá landinum.

Ímeðan skattainntøkusíðan hevur virkað sveiggjmótvirkandi, hava útreiðslurnar í høvuðsheitum verið konjunkturviðgangandi, tvs. at útreiðslurnar minka í niðursveiggi og vaksa í uppsveiggi. Samlaði virknaðurin á virksemið verður tí minni samanlagt, enn tann ójavnandi frá útreiðslunum (tí tær eru konjunkturviðgangandi) og tí javnandi virkninginum frá inntøkunum (ið eru konjunkturmótgangandi).

## I 4.4 Ogn og skuld í almenna tænastugeiranum

Mynd I 27 vísir gongdina í nettoogn almenna tænastugeirans fyri árini 1998-2020. Almenni tænastugeirin fevnir um landið, kommunurnar og sosialu grunnarnar. Uppgerðin er uttan útbúnað og vísir sostatt bert tær gjaldføru ognirnar hjá tí almenna.

Nettoognin er farin úr -4,8 mia kr. í 1998 uppí 1,1 mia kr. í 2007, niður í -1,7 mia kr. í 2015 og uppaftur í 1,5 mia kr. í 2020 (sum er ein meting). Landsstýrið økti skuldina við samanlagt 2,7 mia kr. í tíðarskeiðnum 2008 til 2015. Í hesi tilgongd lækkaði Moody's kredittmetingina frá Aa2 til Aa3 við negativum útlitum. Hetta merkir, at tað var ikki nógmikið, at nettoognin hjá landskassanum var null í 2007, beint undan fíggjarkreppuni í 2008, fyri at megna tey komandi árini við halli uttan at missa eitt stig í kredittmetingini.

Landsstýrið hevur tey stórstu sveiggini í nettoognini hesa tíðina, sum tað eisini framgongur av brotinum „Úrslitið á almennu roknskapunum", har úrslitið hjá landinum hevur verið ávirkað av konjunkturgongd og konjunkturpolitikki við stórum hallum í lágkonjunkturi og av óvanligum postum, so sum skuldareftirgeving av statsskuld í 1998 og 2018 og sølu av partabrøvum í BankNordik í 2007.

Kommunurnar hava havt sveiggj í nettoognini hesi árini, men sveiggini hava verið nógv minni enn hjá landinum.

Sosialu grunnarnir hava havt eina vaksandi nettoogn í tíðarskeiðinum. ALS hevði stórar útgjaldingar 2008-2012, sum elvdi til at sosialu grunnarnir samanlagt høvdu minkandi nettoogn í 2010 og 2011, annars hevur nettoognin verið vaksandi 1998-2020.

**Nettoogn/skuld (uttan útbúnað) hjá almenna tænastageiranum í Føroyum** **Mynd I 27**




**Kelda:** Gjaldstovan og Búskaparráðið, 2020 eru egnar metingar.

Myndin byggir á eina meting av ogn og skuld hjá almenna geiranum, har m.a. skyldur landskassans fyri tænastumannapensjónir og rentugaranti til P/F Lív ikki eru tikin við sum skuld[11].

[11] Veðhaldsskyldur vegna tryggingaravtalu hjá Føroya Lívstrygging er gjørd upp til 1.039 mió. kr. í 2017. Nettoskylda landskassans fyri tænastumannapensjónir er roknað til 4.979 mió. kr. við árslok 2012. Kelda: Føroya Gjaldsstova, landskassaroknskapurin fyri fíggjarárið 2017, s. 240.

## I 4.5 Konjunkturpolitikkur og fíggjarstøða landskassans

Konjunkturpolitikkur hevur sum endamál at minka um tey sveiggj, sum búskapurin av ymiskum orsøkum hevur. Hetta ger seg galdandi í øllum búskapum, og ikki minst í tí føroyska, tí at hann er ein lítil búskapur og tí at hann er ein tilfeingisbúskapur við livandi tilfeingi. Nógv sveiggj eru í einum búskapi, men ofta er tað so, at ikki øll sveiggj ganga sama veg, og soleiðis javna tey hvørt annað út. Í einum lítlum búskapi er tað sjáldnari, at sveiggini javna hvørt annað út, og tí sveiggjar tann lítli búskapurin meira. Ein búskapur, ið troytir livandi tilfeingi, fær meira sveiggj, tí at náttúran hevur síni egnu sveiggj, bæði av sær sjálvum og mannaskapt. Eisini tí sveiggjar føroyski búskapurin.

Eydnast tað at minka sveiggini, ger ein góður konjunkturpolitikkur størri gagn í Føroyum enn í stórum londum, hvørs búskapir av sær sjálvum sveiggja minni. Treytin fyri tílíkari gagnligari ávirkan er, at eftirspurningurin hjá almenna tænastugeiranum er stabiliserandi. Tað merkir at almennar útreiðslur til rakstur, veitingar og íløgur skulu hava eina javna gongd, meðan inntøkurnar sleppa at fylgja konjunkturgongdini í búskapinum, og soleiðis virka automatiskt stabiliserandi. Hetta merkir, at almenn fyrisiting og tænasta skulu hava avlop í hákonjukturi og kunnu hava hall í lágkonjunkturi. Hetta merkir annaðhvørt, at fíggjarognin skal vera so stór, at hallini kunnu berast uttan lántøku, ella at fíggjarstøðan er so mikið góð, at kredittvirði er til at læna til hallini í lágkonjunkturi.

Sveiggini, sum eru nevnd her, eru eitt rættiliga vanligt fyribrigdi, og tey eru ring at tíðarfesta. Tað ber tí ikki til at mótvirka tey við aktivum fíggjarpolitikki, m.a. tí at tílík átøk taka tíð at fyrireika og skapa semju um, við tí úrsliti at konjunkturstøðan er vorðin øðrvísi, enn tá fyrireikingin byrjaði, og átøkini tí lættliga kunnu gera sveiggini størri enn uttan átøk. Tí er betri sum nevnt omanfyri at loyva automatiskt stabilisernadi ávirkan frá inntøkunum í skiftandi konjunkturstøðu og við støðugari gongd í útreiðslunum. Flestu geirar í føroyska búskapinum eru væl fyri aftaná positivu gongdina sum hevur verið seinnu árini. Hetta er galdandi fyri vinnufyritøkur, bæði privatar og almennar, fíggjargeira og húsarhaldsgeira. Tað er eisini galdandi fyri partar av almenna tænastugeiranum, men landskassin hevur í krónum verri fíggjarstøðu í 2020 enn í 2007, tá mált verður eftir nettofíggjarogn uttan útbúnað.

Tá talan er um fortreytir fyri at reka konjunkturpolitik, er tað fíggjarstøðan og kreditvirðið hjá landskassanum, sum hevur týdning. Landsstýrið og løgtingið hava ábyrgdina av konjunkturpolitikkinum og mugu gera tær fyriskipanir, sum eru neyðugar í hesum samanhangi. Fíggjarstøðan hjá øðrum geirum enn landsstýrinum, hevur lítið at siga fyri **virkisfrælsið** hjá landsstýrinum viðvíkjandi konjunkturpolitikki, tí um landsstýrið skal til aðrar geirar eftir pengum við skatti ella á annan hátt, verður keypsorka tikin frá hesum geirum, og soleiðis mótarbeiðir eitt tílíkt átak tí konjunkturpolitikki, sum rættur er at føra. Tí er fíggjarstøðan og kreditvirðið hjá landinum avgerandi fyri konjunkturpolitikkin og ikki støðan hjá øðrum geirum.

# I 5 Útlendskur eftirspurningur

Mynd I 28 lýsir søguligu gongdina í útflutningsvirðinum av fiskavørum fyri tríggjar høvuðsbólkar av fiskaútflutningi: alifisk, uppsjóvarfisk og botnfisk og onnur fiskasløg. Hesir tríggir høvuðsbólkar fevna um so at siga allan føroyskan vøruútflutning. Afturat vøruútflutninginum fevnir samlaði útflutningurin eisini um útflutningin av tænastum (m.a. ferðavinnu).

**Fiskavøruútflutningur, leypandi 12-mánaðar samanlegging, jan-94 til des-19** **Mynd I 28**




**Kelda:** Hagstova Føroya

Alifiskur fevnir um laks og síl, men nærum eingi síl verða útflutt í dag. Uppsjóvarfiskur fevnir um makrel, sild og svartkjaft, og harumframt er fiskamjøl lagt afturat hesum bólki. Botnfiskur og onnur fiskasløg fevnir um tosk, hýsu, upsa, svartkalva, gulllaks, longu, brosmu, rækju o.a. Hesi síðstnevndu fiskasløg verða veidd í bæði føroyskum sjógvi og aðrastaðni, t.d. í Barentshavinum og á Flemish Cap.

Botnfiskurin hevur havt sera stóran týdning fyri útflutningin langt aftur í tíðina, men hevur ikki sama stóra týdning í dag. Í 2012 vóru allir tríggir vørubólkar nøkulunda javnt stórir í støðd, tá tað snýr seg um útflutningsvirði. Síðani tá er útflutningsvirðið av alifiski meira enn tvífaldað, og stavar hetta í stóran mun frá prísvøkstri. Útflutningsvirðið av uppsjóvarfiski er nú komið upp á sama støði sum botnfiskur o.o. fiskasløg.

**Eindarprísur fyri laks í útflutninginum, leypandi 12 mðr. miðal, jan-95 til des-19** **Mynd I 29**




**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í útflutningstølum Hagstovunnar.

Myndirnar I 29-31 vísa eindarprísin í útflutninginum av ávikavist laksi, makreli og sild og toski, hýsu og upsa.

Mynd I 29 vísir, at eindarprísurin fyri laks er trífaldaður úr umleið 20 kr/kg í 2004 upp í 58 kr/kg í desember 2019. Tað fyrivarni kann tó takast, at nakað av hesum vøkstrinum kann stava frá meira virðisøking á landi. Eindarprísirnir samsvara annars væl við onnur príshagtøl (t.d. www.fishpool.org).

Av mynd I 30 sæst, at eindarprísurin fyri makrel og sild er umleið tvífaldaður frá ultimo 2007 til 2018. Eindarprísurin á makreli var í hæddini í 2006 við 12 kr/kg, og er nú aftur sama støðið (12 kr/kg).

**Eindarprísur fyri makrel og sild í útflutninginum, jan-95 til des-19** **Mynd I 30**




**Kelda:** Egnar leypandi 12 mðr. miðal útrokningar við støði í útflutningstølum Hagstovunnar.

Mynd I 31 vísir okkum, at eindarprísurin fyri botnfisk hevur verið rættiliga støðugur síðan 2010. Í desember 2019 var toskaprísurin hægst við 39 kr/kg, meðan prísurin hýsu var 23 kr/kg og upsa var 24 kr/kg.

**Eindarprísur fyri botnfisk í útflutninginum, jan-95 til des-19** **Mynd I 31**




**Viðm.:** Eindarprísurin er roknaður sum leypandi 12 mðr. miðal.
**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í útflutningstølum Hagstovunnar.

## I 5.1 Gongdin innan alivinnuna

Mynd I 32 vísir tøkuna í føroysku alivinnuni árini 1998-2020. Tølini fyri 2020 byggja á metingar við ávísari óvissu. Tøkan í 2018 var 79t tons og 95t tons í 2019. Hetta var ein øking uppá 20% í mun til 2018 og er met í tøku av alilaksi. Í 2020 væntast tøkan at liggja á sama støði sum í 2019; 95t tons.

**Tøka (livandi vekt) í alivinnuni árini 1998 til 2020** **Mynd I 32**




**Kelda:** Avrik sp/f, fyri 2020 er talan um metingar.

## I 5.2 Gongdin innan uppsjóvarvinnuna

Mynd I 33 vísir gongdina í landingarvirðinum av trimum teimum týdningarmestu uppsjóvarfiskasløgunum. Síðan 2009 hevur verið stórur vøkstur í samlaða landingarvirðinum.

Talva I 6 vísir kvoturnar fyri 2020 sammett við kvoturnar fyri 2019. Skipini megnaðu ikki at fiska allan makrelin í 2019, og verður meginparturin av tí ófiskaða flutt yvirum ár. Sostatt er ikki vist, at skipini heldur megna at fiska allan makrelin í 2020, tá kvotan er vaksin í 53,1%.

**Kvotur fyri uppsjóvarfisk og botnfisk, árini 2019 og 2020** **Talva I 6**

| *Tons* | Makrelur | Svartkjaftur | Norðhavssild | Barentshavið | Flemish Cap |
|---|---|---|---|---|---|
| 2019 | 62.560 | 309.307 | 112.902 | 26.434 | 3.911 |
| 2020 | 95.780 | 324.606 | 104.141 | 26.931 | 1.907 |
| Broyting | 53,1% | 4,9% | -7,8% | 1,9% | -51,2% |

**Kelda:** Fiskimálaráðið

Landingarvirðið av makreli er vaksið nógv seinastu árini í samband við, at Føroyar fóru úr millumtjóða avtaluni um makrel í 2010. Síðan mars 2014 hava Føroyar havt avtalu við ES og Noreg um makrelveiðu. Fólk við kunnleika til marknaðin vænta ikki eina prísbroyting viðvíkjandi makreli, tí atgongdin til russiska marknaðin mótsvarar stóra kvotuvøkstrinum.

Landingarvirðið av sild minkaði eitt vet í 2018 vegna kvotuminking og príslækking. Tá kvotan av sild hækkar eins nógv og hon ger í 2019, kann væntast at prísurin lækkar. Við árslok 2018 vóru stórar goymslur av sild bæði í Føroyum og uttanlands, sum nú eru útfluttar. Ongin millumtjóða avtala hevur verið um sild síðan 2015.

**Landingarvirði av makreli, sild og svartkjafti, 2000 til 2019** **Mynd I 33**




**Kelda:** Vørn

Viðvíkjandi svartkjafti vænta fólk í vinnuni ikki stóra broyting í útflutningsprísinum - kanska eitt vet hægri í 2019 enn 2018. Eingin millumtjóða avtala hevur heldur verið um svartkjaftin síðan 2015.

Mynd I 34 vísir, at vøksturin í útflutningsvirðinum av uppsjóvarfiski hevur verið sera stórur síðan 2009. Minking var í makrelútflutninginum miðskeiðis í 2014. Hetta var vegna handilsforðingar hjá ES, sum vórðu settar í gildi seinni í árinum. Útflutingurin av makreli minkaði 361 mio. kr. frá 2017 til 2018. Verður hetta sammett við gongdina í landingarvirðinum fyri 2018, er vantandi samsvar, ið stavar frá stórum goymslubroytingum[12]. Vit síggja, at útflutningurin av makreli veksur í 2019, hóast minni verður fiskað, og stavar hetta frá minking av goymslum.

**Útflutningur av uppsjóvarfiski, jan-00 til des-19** **Mynd I 34**




**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í útflutningstølum Hagstovunnar. Roknað sum leypandi 12. mánaðar samanlegging.

Vøksturin í landingarvirðinum av svartkjafti sæst ikki so væl aftur í útflutninginum. Hetta kann vera tí nógv av svartkjaftinum endar sum fóður til laksaframleiðslu í Føroyum, og tí sum partur av laksaútflutningur.

[12] Sambært Hagstovu Føroya vóru 70 t. tons útflutt av makreli í 2018, meðan 84 t. tons vóru avreidd sambært Vørn. Verður hetta sammet við 2017 vóru 104 t. tons avreidd, men 112 t. tons vóru útflutt hetta árið. Sostatt vóru goymslur av makreli uppbygdar í 2018, meðan goymslur í 2017 vóru tømdar.

## I 5.3 Botnfiskur og onnur fiskasløg

Sambært stovnsmetingum Havstovunnar hava botnfiskastovnarnir við Føroyar verið illa fyri seinastu árini, sí mynd I 35a ið vísir toskastovnin, og mynd I 35b ið vísir hýsustovnin. Hartil hava stovnarnir av toski og hýsu ongantíð í tíðarskeiðinum síðan 1959 verið so lítlir í eitt so langt tíðarskeið. Nýggjastu metingarnar benda tó á at støðan er grundleggjandi broytt í seinastuni.

Toskastovnurin hevur verið óvanliga lítil í eini 12 ár - síðan 2005. Ein stórur bati er hendur í so máta í 2018 og 2019. Veiðitrýstið er eisini minkað munandi seinnu árini, men er í 2018 hækkað aftur. Sí mynd I 35a.

**Toskur í føroyskum havøki: samlaður stovnur, veiða í tonsum og veiðitrýst** **Mynd I 35a**




**Viðm.:** Tølini fyri samlaða stovnin (TSB) ganga fram til 2019, meðan veiðan og veiðitrýstið ganga fram til 2018.
**Kelda:** ICES og Havstovan.

Hýsustovnurin hevur verið óvanliga lítil í eini 8 ár - síðan 2009. Í so máta er ein stórur bati hendur í 2018 og 2019, samstundis sum veiðitrýstið er minkað munandi seinastu árini. Sí mynd I 35b.

**Hýsa í føroyskum havøki: samlaður stovnur, veiða í tonsum og veiðitrýst** **Mynd I 35b**




**Viðm.:** Tølini fyri samlaða stovnin (TSB) ganga fram til 2019, meðan veiðan og veiðitrýstið ganga fram til 2018.
**Kelda:** ICES og Havstovan.

Roknaða veiðitrýstið á upsa hevur verið rættuliga høgt síðan miðskeiðis í 1980-árunum. Veiðitýstið kom upp á 39% í 2009, men er minkað niður á 16% í 2018, sí mynd I 35d. Upsastovnurin hevur ikki verið so illa fyri sum toska- og hýsustovnarnir, og stovnurin sær út til at vera í vøkstri.

**Upsi í føroyskum havøki: samlaður stovnur, veiða í tonsum og veiðitrýst** **Mynd I 35d**




**Viðm.:** Tølini fyri samlaða stovnin (TSB) ganga fram til 2019, meðan veiðan og veiðitrýstið ganga fram til 2018.
**Kelda:** ICES og Havstovan.

Av tí at botnfiskastovnarnir eru í vøkstri, kann væntast vaksandi veiða fyrstkomandi árini

---

Serliga toska- og hýsustovnarnir undir Føroyum eru staðbundnir stovnar, og tað sum hvørt ár verður tikið úr stovnunum, hevur sjálvsagt ávirkan á støddina á stovnunum. Tí hevur veiðitrýstið týdning fyri støddina av tí varandi ískoyti, fiskastovnarnir kunnu geva til føroyska búskapin.

Endamálið við at avmarka veiðitrýstið er fyrst og fremst, at fiskastovnarnir skulu geva størst møguligt búskaparligt avkast til samfelagið í langa siktinum. Ein síðuvinningur kann eisini vera, at tað kann taka broddin av teimum stoytum, sum sveiggini í tilfeingisvinnuni natúrliga hava á búskapin. Hetta við at avmarka veiðitrýstið tá nógv er at fáa, tí tað viðførir "bleytari lendingar" tá minni er at fáa. Stovnurin verður sostatt størri og betri førur fyri at klára veiðitrýstið.

Búskaparráðið mælir til at nýta eina marknaðarskipan til at avgera, hvør fær atgongd til veiðirættindi. Hetta er roynt til útluting av rættindinum av uppsjóvarfiski og fisk á fjarleiðum, men eigur eisini at vera nýtt til útluting av rættindum á heimaleiðum. Um tað verður rindað fyri rættindi, gerst tað lættari hjá politisku umsitingini at stilla veiðitrýstið, tí eyka vinningurin, ið fæst av einum ov høgum veiðitrýsti í stutta siktinum, verður avmarkaður, og hetta kann elva politisku skipanini til at hugsa meira langsiktað.

Um tað verður rindað fyri at fiska, hevur tað í fyrsta umfari við sær, at yvirskotið í fiskivinnufyritøkum minkar (og hýrurnar somuleiðis), tí tilfeingisgjaldið fer í landskassan. Í øðrum lagi hevur lægri vinningurin við sær, at tilskundingin til yvirkapasitet minkar. Minni yvirkapasitetur hevur við sær lægri veiðitrýst og lægri rakstrarútreiðslur og tí eisini størri tilfeingisrentu. Um tilfeingisgjaldið verður ásett av einum myndugleika, eitt nú sum prosentgjald av veiðivirði, minkar tað um yvirkapasitet, men myndugleikin fær hinvegin trupult við at seta rætta gjaldið. Hetta tí at einans fyritøkurnar sjálvar vita, hvat tær megna at rinda. Um rætturin at fiska verður seldur (sum kvotur ella fiskidagar á einum væl innrættaðum marknaði), hava fyritøkurnar ávirkan á, hvat tilfeingisgjaldið verður.

Ein tílík skipan verður smidlig og gevur høvi til, at veiðitrýstið verður betur stillað. Hetta gevur størri inntøkur til samfelagið í langa siktinum. Ein tílík skipan fer at elva til íløgur í meira effektiv veiðitól, tí í eini vælvirkandi marknaðarskipan er tað fyrst og fremst produktiviteturin í vinnuni, sum avger, hvør fær

atgongd til veiðirættindi. Ein avleiðing er, at eigarar av minni effektivum ella produktivum veiðitólum velja at gevast; í verandi skipan verða bæði produktivar og óproduktivar íløgur framdar.

Ein marknaðarskipanin við uppboðssølu styðjar sostatt upp undir ein natúrligan og framhaldandi produktivitetsvøkstur í fiskivinnuni, ið ber við sær lægri manningatal, størri veiðu pr. mann og størri hýrur til eftirverandi manning. Tær umveltingar[13], sum púra vist í stutta, og møguliga eisini í langa siktinum verða avleiðing ella hjáárin av eini slíkari produktivitetsmennandi marknaðarskipan, má tað almenna hjálpa til við at loysa á annan hátt gjøgnum førleikamennandi útbúgvingar-, upplæringar- og almannaskipanir, men ikki við at seta úr gildi ella suspendera marknaðarskipanina.

Í eini grein í altjóða vísindatíðarritinum "Marine Policy"[14] gevur ein føroyskur granskari, Jóannes Jacobsen, eina greining av valdsbýtinum í føroyskum fiskivinnupolitikki. Hansara niðurstøða er, at meðan tað í einum marknaðarbúskapi vanliga er eigarin av einum tilfeingi, sum ræður yvir nýtsluni av tilfeinginum, so er hetta vent á høvdið í Føroyum og í mongum øðrum londum. Í Føroyum liggur valdið yvir fiskatilfeinginum hjá einum í nógvar mátar sterkum fiskivinnu-ávirkanarbólki (lobby), sum higartil hevur havt vald at tryggja, at fiskivinnupolitikkurin er í samsvari við búskaparligu áhugamálini hjá teimum, ið longu eru virkin í fiskivinnuni, og sum samstundis er í andsøgn við búskaparligu áhugamálini hjá teimum, ið eiga fiskatilfeingið (Føroya fólk) – Hesar niðurstøður styðja upp undir grundgevingarnar fyri einari marknaðarskipan, har nýtslugjaldið ikki verður ásett av politisku skipanini, men av vinnnuni sjálvari.

## I 5.4 Samlaði fiskavøruútflutningurin

Mynd I 36 avmyndar samlaða útflutningsvirðið av fiskavørum frá januar 2000 til desember 2019 sum leypandi 12 mánaða samanlegging.

**Fiskavøruútflutningurin, virði, jan-00 til des-19** **Mynd I 36**




**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í útflutningstølum Hagstovunnar. Virði er roknað sum leypandi 12 mánaðar samanlegging.

Vøksturin seinastu árini hevur verið stórur. Fallið, sum var miðskeiðis í 2014, stavar frá handilstiltøkunum hjá ES fyri makrel og sild. Hetta sæst eisini aftur í mynd I 34. Metast kann leysliga út frá myndunum, at hetta uppá stutt sikt hevur kostað Føroyum hálva milliard í útflutningsvirði, men helst er meira enn tað vunnið innaftur síðani.

Síðan 2009 hevur stórt sæð verið vøkstur í fiskavøruútflutninginum á hvørjum ári, og talan er um væl meira enn eina tvífalding í fiskavøruútflutningsvirðinum. Fiskavøruútflutningurin minkar í 2018 vegna goymslubroytingar av makreli og sild, og prísniðurgongd og størri nøgd av sild, meðan ein hægri tøka og støðugir prísir vóru í alivinnuni í 2019 mun til í 2018.

[13] Um umvelting sí „disruption" í II 1 „Høvuðsniðurstøður um íløgugongd" á síðu 42 í búskaparráðsfrágreiðing á vári 2019)
[14] Jóannes Jacobsen (2019) Path dependence in Faroes fisheries (mis)management, Marine Policy 108 (2019) 103615

## I 5.5 Gongdin í handilsjavnanum

Mynd I 37 vísir gongdina í handilsjavnanum sum leypandi 12 mánaða samanlegging. Handilsjavnin er útflutningurin av vørum minus innflutningin av vørum. Myndin vísir, at handilsjavnin í 2016 og 2017 vísti størri yvirskot enn nakrantíð síðan 1994. Hetta er grundað á positivu gongdina innan alivinnu og uppsjóvarvinnu. Handilsjavnin minkaði tó munandi í 2018, men vaks í 2019 soleiðis, at handilsjavnin uttan skip og flogfdør í desember var 1.754 mió. kr. Handilsjavnin hevur ikki verið negativur síðani august 2014.

**Handilsjavnin, leypandi 12-mánaðar samanlegging, jan-94 til des-19** **Mynd I 37**




**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í útflutningstølum Hagstovunnar.

Í byrjanini av fíggjarkreppuni í 2008 vísti handilsjavnin undirskot á 1.521 mió. kr. uttan skip. Í 2017 vísti handilsjavnin eitt yvirskot á 1.800 mió. kr. uttan skip. Hetta er ein betring uppá 3,3 mia. kr. í mun til 2008. Myndin vísir eisini handilsjavnan við skipum, og her sæst, at serliga skipabólkurin dregur handilsjavnan niður. Stórur innflutningur av skipum ella flogførum einstøk ár kann lættliga eyðmerkjast í strikumyndini fyri handilsjavnan við skipum.

**Inn- og útflutningur av vørum (uttan skip og flogfør), jan-94 til des-19** **Mynd I 38**




**Kelda:** Hagstova Føroya. Roknað sum leypandi 12 mánaðar samanlegging.

Mynd I 38 vísir gongdina í innflutningi og útflutningi av vørum (uttan skip) frá januar 1994 til desember 2019. Her sæst, at handilsjavnin vísti sera stórt undirskot í 2008, hetta var vegna serliga stóran innflutning tað árið. Fallið í innflutninginum var stórt í 2009-2010. Hetta hekk m.a. saman við fallinum í

privatu nýtsluni og íløgunum. Síðan 2015 er útflutningurin vaksin nógv meira enn innflutningurin. Útflutningurin er minkaður munandi í 2018 men er vaksin aftur í 2019 og er nú 9,5 mia. kr.

# I 6 Peninga- og fíggjarviðurskifti

Føroyski bankageirin hevur verið undir neyvum donskum eftirliti seinastu árini. Við endurstovnaðum føroyskum Landsbanka er eisini eitt Váðaráð skipað. Viðgerðin av peninga- og fíggjarviðurskiftum er í hesi frágreiðing avmarkað til talvu I 7.

**Føroyskir peningastovnar, innlán og útlán til føroyskar eindir** — **Talva I 7**

| *Ultimo, mió. kr.* | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Innlán** | **14.342** | **15.445** | **16.420** | **17.122** | **17.198** |
| - Ráevnisvinnur | 849 | 949 | 1.005 | 882 | 969 |
| - Framleiðsluvinnur | 632 | 659 | 790 | 877 | 773 |
| - Tænastuvinnur | 4.628 | 4.968 | 5.312 | 5.434 | 4.974 |
| - Húsarhald v.m. | 8.164 | 8.729 | 9.220 | 9.818 | 10.393 |
| - Ókent | 68 | 140 | 94 | 111 | 89 |
| **Útlán** | **14.057** | **14.016** | **14.726** | **15.590** | **15.588** |
| - Ráevnisvinnur | 961 | 946 | 1.154 | 1.076 | 1.036 |
| - Framleiðsluvinnur | 1.332 | 1.075 | 1.218 | 1.535 | 1.509 |
| - Tænastuvinnur | 4.128 | 3.968 | 4.078 | 4.356 | 4.342 |
| - Húsarhald v.m. | 7.580 | 7.992 | 8.239 | 8.540 | 8.645 |
| - Ókent | 55 | 36 | 38 | 83 | 57 |
| **Innánsyvirskot** | **285** | **1.429** | **1.694** | **1.533** | **1.610** |
| - Ráevnisvinnur | -112 | 3 | -150 | -194 | -67 |
| - Framleiðsluvinnur | -700 | -416 | -428 | -657 | -736 |
| - Tænastuvinnur | 500 | 1.000 | 1.234 | 1.078 | 633 |
| - Húsarhald v.m. | 584 | 737 | 981 | 1.278 | 1.748 |
| - Ókent | 13 | 105 | 56 | 28 | 32 |

**Kelda:** Hagstova Føroya

Talvan vísir fyri føroyskar peningastovnar innlán frá- og útlán til ráevnisvinnur, framleiðsluvinnur, tænastuvinnur og húsarhald við árslok árini 2015-19. Innlánsyvirskotið er eisini víst. Síðan 2015 hevur verið talan um eitt vaksandi innlánsyvirskot.

Størsti parturin av samlaðu innlánunum stavar frá húsarhaldsgeiranum, og somuleiðis við útlánunum. Føroysku peningastovnarnir hava fyri húsarhaldsgeiran havt eitt vaksandi innlánsyvirskot øll árini. Verður lántøkan hjá húsarhaldunum í donsku realkreditstovunum roknað uppí, hava húsarhaldini eitt innlánsundirskot á 121 mió. kr. í desember 2019 samlað sæð.

Næst eftir húsarhaldsgeiran í innláns- og útlánsstødd er tænastuvinnugeirin. Her hevur eisini verið talan um eitt vaksandi innlánsyvirskot síðan 2015, sum tó minkar í 2018.

Framleiðsluvinnugeirin skilur seg burturúr við tað, at øll árini hevur talan verið um eitt rættuliga stórt innlánsundirskot (størri útlán enn innlán). Útlánini til henda geira hava verið nøkulunda støðug, og við onkrum undantaki kann tað sama sigast um innlánini. Væntandi avspegla tølini fyri framleiðsluvinnugeiran gongdina innan byggivirksemið í Føroyum.

# Fylgiskjøl til kap. I

## Fylgiskjal I 1: Fastognarprísir og prísgongdin fyri m²

Talva 7 vísir miðal húsaprísirnir í Føroyum árini 2018 og 2019.

**Føroyskir miðal húsaprísir** **Talva I 7**

| *Kr/fermetur* | 2018 | 2019 |
|---|---|---|
| Tórshavn, sethús | 17.030 | 21.277 |
| Tórshavn, íbúðir | 27.261 | 26.323 |
| Størri bygdir, sethús | 10.428 | 11.091 |
| Smærri bygdir, sethús | 9.447 | 10.959 |
| Sandoy og Suðuroy, sethús | 5.117 | 5.836 |
| | | |
| Tórshavn, sethús undir 40 ár | 19.203 | 21.630 |
| Størri bygdir, sethús undir 40 ár | 11.527 | 11.804 |
| Smærri bygdir, sethús undir 40 ár | 11.569 | 10.177 |
| Sandoy og Suðuroy, sethús undir 40 ár | 7.569 | 9.413 |

**Kelda:** BankNordik

Myndin niðanfyri vísir stóra prísvøksturin fyri kvadratmeturin í Tórshavn síðan 1985.

**Fermetraprísur í Tórshavn fyri sethús og íbúðir, 1985 til 2019** **Mynd I 39**




**Viðm.:** Fyri 2019 er talan um fyribils uppgerð til og við desember mánaða.
**Kelda:** BankNordik

# Kapittul II: Nýskipanir í fiskivinnuni

## II 1 Um endamálsorðingar í fiskivinnupolitikkinum

Eftir meting Búskaparráðsins eigur fiskivinnupolitikkurin og serstakliga lógirnar um sjófeingi og veiðugjald, at lúka tvey yvirskipað endamál:

- At fiskatilfeingið verður veitt burðardygt og effektivt.
- At tilfeingisrentan fellur til landið sum árligt avkast (av tilfeingisogn landsins) - tilfeingisrentan ella veiðigjaldið er árliga virðið av teimum einkaveiðirættindum, ið givin eru privatum aktørum við kvotum ella fiskidøgum.

Metingar Búskaparráðsins av rikna fiskivinnupolitikkinum taka sostatt støði í hesum tvinnum omanfyri standandi endamálum. Búskaparráðið avmarkar seg til at viðgera búskaparlig málsevni í fiskivinnupolitikkinum.

Í viðmerkingunum til endamálið við lógini um sjófeingi verður ført fram, at:

> *"regluverkið skal eisini lúka rakstrar- samfelagsbúskaparlig krøv. Rakstarbúskaparliga kravið er, at fiskiveiðan ber seg, útvegar fiskimonnum rímiliga inntøku, at nóg mikið er til rakstur, kapitalkostnað og nýiløgur. Samfelagsbúskaparliga kravið er, at veiðan gevur so stórt íkast til tjóðarúrtøkuna sum gjørligt. Regluverkið skal tryggja, at mest møguligt av virðisøkingini í sambandi við gagnnýtsluna av fiskatilfeingnum er í Føroyum og kemur føroyska samfelagnum til góðar.. ..../....Í fyrisitingini av lógini kann dentur leggjast á onnur viðurskifti, enn vinnuligt ella samfelagsbúskaparligt lønsemi. Yvirskipaða endamálið við lógini er tí eisini at stuðla undir arbeiðs- og inntøkumøguleikunum og møguleikunum fyri vinnuligum virksemi um alt landið"*[15]*.*

Búskaparráðið kann viðurkenna fyrsta partin av hesum endamálsorðingum, men má seta spurnatekin við seinna partin. Seinni partur av endamálsorðingunum er eftir meting Búskaparráðsins ikki sameiniligur við fyrra part. Í praksis ber ikki til at gera eina fiskivinnulóggáva til samstundis verða ein almannalóggáva.

Harfyri eigur sera stórur dentur – nógv størri dentur enn nú - at verða lagdur á at loysa samfelagsligar trupulleikar, ið eru tengdir at tvørrandi arbeiðsvirknismøguleikum við "mismatch" viðvíkjandi førleikum á arbeiðsmarknaðinum. Hesin innsatsur eigur tó at verða skipaður í aðrari lóggávu.

Til dømis var í arbeiðssetninginum hjá fiskivinnunýskipanarnevndini[16] serligur dentur lagdur á, at uppboðssøluskipanin og nýskipanin í síni heild skuldi verða "*marknaðargrundað", og at høvuðsdenturin skuldi leggjast á at taka inn tilfeingisrentuna gjøgnum uppboðssølu.*

"*Marknaðargrundað*" í hesum viðfangi kundi ikki skiljast øðrvísi enn, at skipanin í mesta mun skuldi sleppa at virka sjálvregulerandi samsvarandi útboði og eftirspurningi og við minst møguligum inntrivum ("stýring") frá almennari síðu. Hetta seinasta ber sjálvsagt ikki til, um fiskivinnulóggávan samstundis skal virka sum ein almannalóggáva. Fiskivinnulóggávan eigur ikki at verða nýtt til at styðja upp undir arbeiðsvirkni í Føroyum og arbeiðsvirkni kring alt landið, eitt nú við at nýta handilsforðingar.[17] Arbeiðsvirkni eigur at verða styðjað upp undir gjøgnum betrað kappingarføri og við einum høgum produktivitetsvøkstri gjøgnum betri upplæring/útbúgving, gransking og tøkninýtslu.

---

[15] Uppskot til løgtingslóg um sjófeingi – 11.10.2019, viðmerkingar á síðu 26

[16] Álitið frá fiskivinnunýskipanarnevndini 3. oktober 2016, síðu 164-173

[17] Handilsforðingar í Føroyum eru eitt nú sergjaldið á landingum uttanlands, forboð ímóti virking umborð, at alt skal um føroyskan kaikant og uppbýtið av flotanum í smáar bólkar.

## II 2 Nakrar arbeiðshypotesur um búskapargongdina

Búskaparráðið hevur í sínum undanfarnu frágreiðingum viðgjørt fíggjarpolitiska haldførið, sum er undir trýsti. Við núverandi regluverki og við núverandi demografiskum útlitum fer almenni geirin í komandi áratíggjum at fáa trupulleikar við at røkja sínar skyldur. Tilfeingisgjald frá fiskivinnuni fer tí at verða eitt kærkomið ískoyti til fígging av almenna geiranum. Alternativið til at taka inn tilfeingisrentuna, er at gera sparingar í íløgum og rakstri almenna geirans ella við at hækka almennu inntøkurnar við skattum.

Í hesum viðfangi hevur Búskaparráðið viðgjørt nøkur ástøði við hypotesum um, hvussu hesin trupulleiki við haldførinum møguliga kann basast. Hesi ástøði eru ikki á nakran hátt endalig, men broytilig alt eftir, hvat komandi empirisk dátu fara at geva ábendingar um.

Higartil hevur búskaparráðið gingið út frá tí fortreyt, at ein produktivitetsvøkstur í føroyska búskapinum ikki kann loysa haldføristrupulleikan. Tað kemur av, at ein produktivitetsvøkstur í privatu vinnuni veksur um privatu og almennu inntøkurnar, men lønargongdin í almenna geiranum (uttan samsvarandi produktivitetsvøkstur) plagar at fylgja við lønargongdini í privata geiranum. Hetta seinasta merkir, at almennu útreiðslurnar fara at vaksa so hvørt sum almennu lønirnar hækka í samsvar við hækkandi privatu lønunum. Produktivitetsvøkstur loysir tískil ikki haldføristrupulleikan[18].

At tilfeingisrentan fellir til reiðarí og manning medvirkar til at skeikla kappingina millum ymsar vinnur um arbeiðsmegi og kapital. Av tí at manningin fær lut í tilfeingisrentuni, legst trýst á lønarkrøv í øðrum vinnum, eisini innan tað almenna. I fiskivinnuni er tað kortini galdandi at produktivitetsvøkstur kann minka um haldføristrupulleikan, um tilfeingisrentan verður kravd inn við gjaldi. Um tað almenna krevur inn tilfeingisrentuna, verður fiskivinnan vegna minkaðan stuðul, tilskundað til at gera kappingarfremjandi og produktivitetsmennandi íløgur. Hesar íløgur høvdu ikki havt hægri lønarlag við sær í fiskivinnuni, tí tilfeingisrentan tilfellur landskassan og ikki reiðaríum og manningum. Ein produktivitetsvøkstur í fiskivinnuni hevði tískil ikki økt um almennu útreiðslurnar gjøgnum lønartrýst, og produtkivitetsvøksturin í fiskivinnuni hevði sostatt bøtt um haldføristrupulleikan.

Eitt annað ástøði er, at ein produktivitetsvøkstur kortini á annan hátt kann bøta um haldføri almenna geirans. Grundgevingin er, at ein stórur produktivitetsvøkstur í Føroyum kann hava eina jaliga ávirkan á demografisku gongdina í landinum gjøgnum skapan av nýggjum viðkomandi størvum. Serliga í fiskivinnuni eru ótroyttir møguleikar fyri produktivitetsvøkstri til dømis gjøgnum betri stovnsrøkt, umframt at effektivisering er gjørlig í einum stórum parti av flotanum.

Meira neyvt er ástøðið hetta: Við núverandi demografisku útlitum fæst búskaparvøkstur í høvuðsheitum gjøgnum produktivitetsvøkstur. Í Føroyum hevur fiskivinnan verið týðandi kelda til produktivitetsvøkstur, og verður hon væntandi framvegis hetta. Eftir hesum ástøði er ein høgur búskaparvøkstur avgerandi, tá vit skulu møta haldførisavbjóðingini. Ein høgur búskaparvøkstur kann styðja upp undir eitt høgt og hækkandi alment tænastustøði (heilsu-, almenna- og undirvísingarverk). Hetta kann eggja ungum fólki til at búseta seg í Føroyum, og eisini kann hetta skapa arbeiðspláss av nýggjum slagi í Føroyum.

Eftir hesum ástøði er produktivitetsvøkstur í fiskivinnuni sera týdningarmikil. Til at fremja henda produktivitetsvøkstur, er avgerandi at rindað verður fyri serrættin at fiska. Royndirnar vísa, at virki í kappingarstøðu eru best egnað til at skapa produktivitetsvøkstur gjøgnum innovatiónir – virki í kappingarstøðu eru noydd til hetta fyri at yvirliva. Tí eiga ásetingar í fiskivinnulóggávu ikki at taka burtur kappingar-elementið, men at avmarka seg til fyrisitingarmál og til at basa bágar í marknaðarmekanismuni, ið seta natúrliga kapping úti av spælinum[19].

Ynski til fiskivinnulóggávu, ið mótvirka produktivitetsvøkstri, eiga tískil eftir fatan Búskaparráðsins at verða avvíst. Til dømis tað at knýta veiðiloyvi afturat skipununum tænir ikki nøkrum produktivum ella

[18] Búskaparráðið: Búskaparfrágreiðing, á vári 2015, síðu 41, 58

[19] Handilsforðingar í Føroyum eru eitt nú sergjaldið á landingum uttanlands, forboð ímóti virking umborð, at alt skal um føroyskan kaikant og uppbýtið av flotanum í smáar bólkar.

lívfrøðiligum endamáli, men ger tað truplari at veiða fiskin við teimum tólum, sum til eina og hvørja tíð egna seg best til endamálið.

Sama er at siga um útbýting av makreli til skip og virki, ið ikki eru útgjørd til at veiða makrel. Hetta er endamálsleysur vinnustuðul - illa umhugsaður stuðul til reiðararnar. Virki uttan skip, sum ongan makrelstuðul fáa, megna ikki at kappast um rávøruna móti virkjum, ið hava skip, og tí fáa makrelstudning. Hetta er studningur til yvirbjóðing fyri nakrar í kappingini um rávøruna.

Vit hava ræðandi royndir frá slíkum vinnustuðuli í undanfarnum áratíggjum. Royndirnar eru, at slíkur vinnustuðul í høvuðsheitum máar støðið undan produktivtetsvøkstri við at máa støðið undan kappingarførinum. Stuðulin verjir virkini móti kapping - hann ger tað óneyðugt hjá vardum vinnulívsleiðslum at leggja doyðin á at fáa sum best og mest burturúr.

Í staðin eigur dentur at verða lagdur á at bøta føroyska kappingarførið gjøgnum produktivitetsmennandi tiltøk við millum annað skilabestu nýtsluna av nýggjastu tøknini.

----

Fyri myndugleikan er tað eisini týðandi at skilja, at ein høgur produktivitetsvøkstur gjøgnum nýtslu av nýggjari tøkni ikki bara - og ikki altíð í stutta siktinum - skapar búskaparvøkstur. Produktivitetsvøkstur við nýtslu av nýggjari tøkni skapar næstan altíð eisini "umveltingar" (kollveltandi umbroytingar) í vinnum og í búskapinum og á arbeiðsmarknaðum, tá summi størv hvørva og onnur størv vaksa fram.

Hesar "umveltingar" kunnu, í stutta ella langa siktinum, elva til arbeiðsloysi hjá teimum raktu, um ikki serligar skipanir ella serlig viðurskifti eru, sum "lofta" fólki undir slíkum umstøðum, eitt nú við eftirútbúgving. Regluverkið fyri slíkum skipanum, ið fremja arbeiðsvirkni, eigur at hava høga raðfesting, og nógv hægri raðfesting enn nú, men slíkar skipanir hoyra ikki heima í fiskivinnulóggávuni.

Tíðarskeið við tøknimenning í fiskivinnuni hava eisini verið tíðarskeið við vaksandi inntøkum og minkandi tali av fiskimonnum. Slupptíðin og línubátatíðin í Føroyum eru dømi um tíðarskeið við steðgaðum inntøkuvøkstri og tvørrandi tøknimenning uttan produktivitetsvøkstur - og dømi um tíðarskeið við stórari fólkafráflyting. Umráðandi er at slík tíðarskeið, har produktivitetsvøksturin er lítil og eingin, ikki koma aftur.

----

Eitt afturvendandi høvuðsevni í viðgerini av føroyska búskapinum hevur verið stóri bundinskapurin at sjógvi og fiskivinnu. Úti í heimi eru og hava verið nøkur "virkis-uppstart" við føroyskum íleggjarum og við partvíst føroyskum starvsfólkum, *sum ikki hava havt so nógv við sjógvin at gera*.

Slík "virkis-uppstart" byggja á eitt hugskot um ein potentielt stóran eftirspurning eftir eini ávísari vøru og/ella tænastu, men sum onki annað kappingarført virki enn hevur "uppdagað", ment, ella gjørt sær dælt av. Slíkar royndir at byrja eitt nýtt virki - eitt "virkis-uppstart" - eru sjálvsagt tengdar at stórum váða fyri íleggjararnar. Hesir skulu vera sinnaðir til at koma við stórum peningaupphæddum til víðari menning av hugskotinum, uttan at og áðrenn nakrar inntøkur eru komnar inn frá sølu. Sum dømi kann nevnast at fyri eitt nýliga uppsteðgað "uppstart" vóru føroysku íleggjararnir noyddir at avskriva 36 mió. kr. sum mistar.[20]

Tað eru nakrar slíkar "uppstartir" við føroyskari luttøku. Millum tær mest kendu er "Globetracker"[21], ið er ein framkomin telduskipan til stýring av containara-flutningi um allan heim – altso nakað, ið hevur við sjóvinnu at gera. Hendan skipan hevur fingið heilt stórar ordrar og er tískil komin væl ávegis, men hevur framvegis avbjóðingar. Hesar avbjóðingar eru eitt nú at levera tað, sum virkið hevur bundið seg til at

[20] Upplýsing frá Signar Heinesen viðv. Data Quality Systems.

[21] https://www.globetracker.com/category/news/

levera, til stórar kundar. Ein onnur væleydnað "uppstart" er "Vivino"[22], ið er ein app til vínval og vínkeyp. Ein triðja er Techcare, hvørt endamál er at menna og framleiða eitt tøknitól til eldrarøktina.[23]

Onkur hevur funnist at Fróðskaparsetrinum fyri tvørrandi ágrítni innan íverksetan[24]. Føroysku royndirnar við íverksetan og "uppstarti" kundu verið grundarlagið undir einum afturvendandi skeiði á Fróðskaparsetrinum í hesum evnum, men hetta er sjálvsagt treytað av fígging.

Ivaleyst er møguleiki fyri fleiri "virkis-uppstartum", men til tess krevst ikki bert eitt vitanarumhvørvi, men eisini ein vinnubygnaður, sum eftirspyr nýmenning. Til tað er avgerandi, at vinnur virka undir marknaðarkørmum og vera viðgjørdar eins. Eisini tí er tað avgerandi, at tilfeingisrentan verður goldin til samfelagið og ikki latin sum stuðul til ávís vinnurekandi.

## II 3 Um fatanina av tilfeingisrentu

Ein víðfevnd og neyv frágreiðing um tilfeingisrentu og búskaparrentu er givin í búskaparráðsfrágreiðing á heysti 2014, kapittul 3, s. 58-93[25].

Fyribrigdið *tilfeingisrenta í fiskivinnunu* hevur tey seinastu umleið 20-30 árini virkað sum ein hugkveikjari hjá einum parti av fólkinum til frama fyri ábøtur á føroysku fiskivinnuskipanina. Nakrar skipasølur virkaðu sum ein opinbering. Hesar vístu at søluvirðið á skipum við fiskiloyvum var fleiri ferðir skipavirðið. Munurin var tilfeingisrentan.

Frammanundan hesum var litið og onki forstáilsi í Føroyum fyri hugtakinum "tilfeingisrenta". Frammanundan hesum hildu fólk yvirhøvur, at tað var í fínasta lagi at landið beinleiðis stuðlaði fiskivinnuni á ymsan hátt við stórum peningaupphæddum – bæði til rakstur og íløgur. Hesin peningastuðul var grundgivin sum "afturbering" til fiskivinnuna frá restini av samfelagnum – afturbering sum ábót fyri at fiskivinnan var "grundarlagið undir landsins búskapi" (*sic!*). Hetta við "afturbering" roknar Búskaparráðið fyri skilaleyst tos – tí um fiskivinnan var einasta grundarlagið undir samfelagnum, mátti tað verið óneyðugt at stuðla henni – umframt tað at "afturberingin" fyri ein stóran parts viðkomandi var nýtt ógagnliga, soleiðis at tilfeingisrentan vegna yvirkapasiteti hvarv í langa siktinum, hóast afturberingin gjørdi virkini kappingarfør í tí heilt stutta siktinum.

Samtíðis hevur gongdin innan fiskivinnuna seinastu umleið 100 árini skapað eitt vaksandi forstáilsi fyri, at fiskastovnarnir viðhvørt mugu verjast móti ov nógvum fiskiskapi, og at neyðugt tí er við marki fyri mest loyvdu veiðu (TAC), og við tilluting av kvotum innanfyri TAC.

Tilfeingisrenta er ein avleiðing av, at atgongdin til fiskiveiði er avmarkað. Tilfeingisrentan er tann vinningur, ið tey fáa, sum hava fingið frammíhjárætt ella einkarætt til at troyta avmarkaða fiskatilfeingið[26].

Tá ið frítt er at fiska, verður fiskað so nógv sum til ber. Hetta gongur útyvir fiskastovnarnar, og ger at úrtøkan í fiskiveiðu verður minni[27]. Tá hetta hendir, verður íløgan í skip ikki fult gagnnýtt. Hetta merkir, at tilfeingisrentan við eini ovurfisking "hvørvur" í niðurfiskaðum fiskastovnum og burturspiltari veiðiorku og yviríløgum ella feilíløgum í skip. Har verður tá eingin tilfeingisrenta.

22 https://www.vivino.com/about

23 Kelda: Ólavur Ellefsen

24 https://www.nyskapan.org/aetlanin

25 Víst verður til hesa frágreiðing: https://www.setur.fo/media/1124/buskaparfragreidingheysti2014_endaligt.pdf

26 Fyri tilfeingisrentuna er ein stórur eftirspurningur eftir fiski líka so týðandi sum avmarkaða útboðið – sjálvt um tilfeingisrenta í búskaparligum bókmentum verður forklárað út frá avmarking í útboði.

27 Hetta má sigast væl empiriskt grundgivið út frá gongdini á heimaleiðum. Almenni íløgustuðulin til trolaraflotan í fimtiárunum var ikki so skaðiligur, tá nógvur fiskur var á troyttu fjarleiðunum.

Tá ið ein avmarking av veiðiorkuni (umsitingin av fiskastovnunum) er væleydnað, verður úrslitið at ein stór *tilfeingisrenta* fellur teimum í lut, sum hava fingið frammíhjárættindi/einkarættindi at troyta avmarkaða fiskatilfeingið. Tilfeingisrentan kemur her til sjóndar sum yvirnormalur vinningur til teirra, sum hava fingið frammíhjárættindini.

Fer hesin nógvi peningur (tilfeingisrentan) í umferð í búskapinum í einum há- ella neutralkonjunkturi, soleiðis at hann veksur um samlaða eftirspurningin, so verður prís- og lønarstigið trýst uppeftir, við tí úrsliti, at vinnuliga kappingarføri landsins kemur undir trýst, sum harvið eisini rakar arbeiðsvirknið[28].

Landið hevur tí eina skyldu til at "taka inn" tilfeingisrentuna, soleiðis at hon ikki skaðar, men heldur styðjar upp undir búskapargongdina eitt longri tíðarskeið fram. Tilfeingisinntøkur kunnu vera sveiggjandi, og netup tí rigga tær væl sum inntøka hjá landskassanum, um tað almenna javnar út sveiggini í hesum inntøkum yvir eitt longri tíðarskeið gjøgnum staðsetingar í búskapargrunn.

Føroyski búskapurin dúvar upp á óvanliga nógv av náttúrutilfeingi og harav nógva avleidda tilfeingsrentu. Hetta ger tað til eina skyldu hjá føroysku myndugleikunum at handfara tilfeingisrentuna í føroyska búskapinum á ein slíkan hátt, at yvirupphitandi ávirkanir verða tálmaðar, samstundis sum styðjað verður upp undir produktivitets-betrandi ávirkanir.

Verður tilfeingisrentan ikki uppkravd av landinum - tvs. verður hon í staðin ogn hjá reiðaríum og manningi - skapar hon eisini eina avlaging í natúrligu kappingini, sum altíð er millum virki. Hon verjir tey virki ímóti kapping, sum hava fingið frammíhjárættindini til tilfeingið. Ikki uppkravd tilfeingisrenta virkar tá sum vinnustuðul.

Eitt annað er spurningurin um samfelagsligan ójavna. Verður tilfeingisrentan ikki kravd inn av landinum, skapar hon størri ójavna millum nøkur fá múgvandi og nógv ikki múgvandi.

Tískil má tilmælast, at landið tekur inn tilfeingisrentuna, og umsitur hana soleiðis, at hon ikki hevur óynskt árin á búskapargongdina. Mest sannlíkt verða almennar inntøkur frá tilfeingisgjøldum sveiggjandi, og tá so er, er rætt at javna almennu inntøkurnar út yvir nøkur ár, soleiðis sum tað er fyriskipað við búskapargrunninum. Í tann mun tilfeingisinntøkur ikki verða varandi, eiga tær at verða spardar upp til konsolidering av landskassanum og goymdar til seinni brúk. Hetta hava norðmenn gjørt í samband við oljutilfeingið.

----

Fyri meira enn 100 árum síðani kom danski búskaparfrøðingurin Jens Warming fram við einum ástøði um fiskivinnubúskap og tilfeingisrentu - um hvat hendir, tá ið atgongdin til fiskiveiðu verður frí fyri øll, og tá ið hon verður avmarkað.[29]

Ein av niðurstøðunum frá hesi greining var, at ikki bar til at lata fríu marknaðarkreftirnar valda, tá tað snýr seg um umsiting av náttúrutilfeingi. Felags ognarrættur til tilfeingið ger, at nøkur kunnu gera sær dælt av tilfeinginum til skaða fyri onnur ("tragedy of the commons"). Einka-ognarrættur var tí frægasta loysnin[30].

Teir trupulleikar, ið fría atgongdin skapti, metti Jens Warming vórðu best loystir við at geva einum avmarkaðum liði av fiskimonnum "ognarskap" (vit kunnu eisini siga "einkarætt") til fiskastovnarnar, og í sama viðfangi áleggja teimum at gjalda eitt passandi árligt landingaravgjald til landið.

---

[28] Hetta fyribrigdið verður nevnt "hálendska sjúkan"

[29] Warming, J. (1911): Om grundrente af fiskegrunde. Nationaløkonomisk Tidsskrift 49: 499-505
Warming, J. (1931): Aalegaardsretten. Nationaløkonomisk Tidsskrift 69: 151-162

[30] Hetta við einka-ognarrættinum kann gerast upp á tveir mátar í Føroyum: (1) við uppboðssølu av rættindum har "ognarrætturin" liggur hjá landinum, ella (2) ognarrætturin verður útdelegeraður úrvaldum privatum aktørum at umsita og brúka sum eitt slag av "íløgu" hjá landinum, sum skal geva eitt árligt avkast til landið.

Við "ognarskapi" vildu ánararnir havt sum egin áhugamál ta optimalu umsitingina av fiskastovnunum, ið gav maksimala tilfeingisrentu. "Ognarskapurin" vildi tí loyst trupulleikan við ovurveiðu, og skapað sum mest av tilfeingisrentu.[31]

Tað er áhugavert meira enn 100 ár seinni at staðfesta, at fiskivinnupolitikkurin í flestu londum er nógv í samsvari við tilmælini frá Jens Warming. Skipanirnar við rullandi loyvum, frítt umsetiligum eginkvotum og "grandfathering"[32] koma løgfrøðiligum "ognarskapi" so nær sum tær kunnu í praksis.

Mótstøðan í Føroyum er stór móti ókeypis at "geva" úrvaldum reiðarum tilfeingið til "ognar" eftir teirra søguliga vunnu rættindum. Eitt sjónarhorn er, at landið við eini slíkari "gávu" til úrvaldar reiðarar, ger eina óvanliga stóra fíggjarliga satsing uppá nøkur fá reiðaravirki. Hendan satsing eigur at geva eitt hóskandi avkast til landið, ið vildi verið reiðaranna árliga veiðu- ella tilfeingisgjald til landið. Ein tilluting av kvotum eftir søguligum rættindum skapar størri ójavna millum stór og lítil reiðaríir, tí reiðaríini, ið eru stór, fáa ivaleyst lættari við at gerast uppaftur størri. Hetta kann eisini skapa eina forðing fyri at nýggir aktørar kunnu koma inn í vinnuna. Nýggir aktørar mugu keypa seg inn og harvið seta seg í stóra skuld. Úrvaldu reiðaríini vilja við hesi loysn vera vard móti kapping og hava harvið ikki so stóra áeggjan at bøta um sítt kappingarføri. Tillutanin av kvotum eftir søguliga vunnum rættindum gevur úrvaldu reiðaríunum undandrag í kappingini, tí hesir við tíðini fara at sita inni við dyggastu fiskivinnuroyndunum.

## II 4 Tvær "marknaðargrundaðar" loysnir møguligar

Til tess at byrja nýskipanina av føroysku fiskivinnuni vóru í 2007 øll givin fiskiloyvi uppsøgd til at fella aftur til landið um 10 ár. 10-ára freistin gekk út 31/12-2017. Tískil skuldu fiskivinnu-nýskipanirnar verða byrjunarklárar 1. januar 2018. Uppsøgnin av fiskiloyvum var gjørd sum neyðugur liður í tí grundleggjandi nýskipanarætlanini hjá tásitandi løgtingsmeiriluta. Farast skuldi frá eini (1) loyviskipan (grundað í høvuðsheitum á søgulig rættindi) til eina (2) uppboðssøluskipan, sum í høvuðsheitum skuldi verða marknaðargrundað og óheft av søguligum rættindum.

**Tekstkassi 7: Nýskipanir og broytingar í lógarverki**

Fram til 31. desember 2017 var løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 lógargrundarlagið undir føroyskari fiskivinnu. Óvanliga nógvar broytingar vórðu gjørdar í hesi lóg, meðan hon var í gildi.

Tilætlaða nýskipanin av fiskivinnuni í undanfarna valskeiði merkti, at eitt nýtt lógarverk skuldi avloysa lógarverkið frá 1994. Hendan avloysing hendi partvís við løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi, ið fekk gildi frá 1. januar 2018. Tað sermerkta við hesi nýskipan var, at uppboðssøla av 1-ára, 3-ára og 8-ára fiskirættindum var sett í verk.

Løgtingsvalið 31.august 2019 gav meiriluta fyri enn einari nýskipan av fiskivinnuni, ið vildi "rulla aftur" allar tær týðandi ásetingarnar í lógini um sjófeingi, ið framdar vóru í undanfarna skeiði, og sum stór ósemja var um. Í samsvari við hetta varð broytingaruppskot til lóg um sjófeingi lagt fyri tingið og samtykt, og fekk hetta gildi frá 1. januar 2020. Við hesum lógaruppskoti var millum annað farið burtur frá allari uppboðssølu av fiskirættindum, og ístaðin var sett í verk ein rullandi 12-ára uppsagnarfreist fyri øll brúksrættindi. Upprunaliga ætlanin hevur verið, at øll fiskirættindi tillutað og keypt á uppboðssølu undanfarin ár, skulu umbýtast við ókeypis tillutaðum og søguliga grundaðum fiskirættindum, ið sum nevnt skulu hava eina leypandi 12-ára uppsagnarfreist (t.e. konstant galdandi 12-ára gildistíð). Hetta

[31] Eggert, Håkan (2010) Jens Warming on Open Access, the Pigovian Tax, and Property Rights, History of Political Economy 42 (3): 469-481

[32] "Grandfathering" er hugtaksheiti fyri eitt hendingamynstur, har einaferð tillutaði søgulig rættindi gerast permanent rættindi uttan mun til broyttar umstøður. Í fiskivinnuhøpi merkir hetta at eini einaferð vunnin søgulig rættindi við hevd gerast arvalig og sølubar (sum ognarrættindi). Týdningurin er her forkláraður á enskum: "*An expression used to describe a statutory or contractual willingness to allow some activities or former rights to continue even though not technically allowed under current conditions. For example, downtown zoning regulations no longer allow gas stations in the area, but Fred's Fuel was doing business before the zoning laws went into effect, so it is grandfathered and can stay in business*". Kelda: https://financial-dictionary.thefreedictionary.com/grandfathering.

umbýtið er seinni broytt. Eisini skulu ókeypis tillutaðar eginkvotur verða frítt umsetiligar, men søluvinningur skal skattast. Reglurnar um hesa skatting skulu eftir ætlan verða tøkar 1. mars 2020.

Galdandi lógarverk er sostatt løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi, ið fekk gildi frá 1. januar 2020, men nýskipanin av fiskivinnuni við nýggjum lógarverki frá 2020 var tó meira víðfevnd enn so. Nýskipanin fevndi m.a. eisini um uppskot til løgtingslóg um veiðigjald. Upprunaliga var ætlanin at veiðigjaldið skuldu vera gjald fyri kvotur/dagar, ið *ikki* vórðu keyptar/keyptir á uppboði, herundir eisini veiða við heimild í útlutaðum menningarkvotum. Tað, sum sermerkti hetta fyrsta uppskotið um veiðigjald var, at veiðigjaldið við einum heldur torgreiddum frymli, skuldi ásetast soleiðis, at tað svaraði til tilfeingisrentuna. Hetta lógaruppskotið um veiðigjald fall burtur, tá tingsetan 2018/19 endaði, og val var útskrivað á ólavsøku 2019.

Í staðin er sett í verk ein fyribils skiftiskipan við veiðigjaldi, ið bert skal gjalda fyri 2020, og sum skal geva nøkulunda somu inntøkur til landið, sum m.a. uppboðssølan gav í 2018. Talan er her um kilogjald av uppsjóvarfiski og eisini av botnfiski úr Barentshavinum.[33] Sí fylgiskjal til kapittul II.

Galdandi frá 1. januar 2021 er ætlanin at seta í verk eina varandi skipan, har veiðigjaldið/tilfeingisgjaldið verður eitt yvirskotsgrundað gjald, sum tekur hædd fyri rentu-, olju- og fiskaprísi, soleiðis at inntøkur landsins út frá verandi fortreytum verða umleið á sama støði sum í 2018[34].

Omanfyri umrødda 10-ára langa uppsagnarfreistin fyri fiskiloyvi var eisini givin fyri at fyribyrgja rættarkrøvum sambært ásetingum grundlógarinnar (§73) um ognarrætt og ognartøku[35]. Eini tilskilað brúksrættindi - umsetilig ella óumsetilig - eru sjálvsagt at rokna sum ein avmarkaður ognarrættur, men ein rættur, sum er vardur av grundlógarinnar ásetingum um ognartøku.

Spurningurin er so, um ein 12-ára uppsagnarfreist fyri brúksrættindi er nóg long freist til at tryggja móti møguligari endurgjaldsskyldu. Ein rættarsak koyrir í skrivandi stund um hendan spurningin. Tí ber ikki til at siga meira um hetta mál. Hinvegin eru flestallir løgfrøðingar samdir um, at hugtakið "fólksins ogn" um fiskatilfeingið er tómt fyri løgfrøðiligt innihald[36]. Herfyri er hugtakið ikki tómt fyri búskaparástøðiligt innihald[37].

----

Tann 21. januar 2016 setti landstýrismaðurin í fiskivinnumálum eina nevnd til at greina grundarlagið undir fiskivinnunýskipanini. Nevndin legði fram sítt álit 3. oktober 2016. Í arbeiðssetningi nevndarinnar[38] var serligur dentur lagdur á, at uppboðssøluskipanin og nýskipanin í síni heild skuldi verða "*marknaðargrundað" og leggja høvuðsdentin á at taka inn tilfeingisrentuna gjøgnum uppboðssølu av kvotum.*

Heitið "*Marknaðargrundað*", átti sum áður nevnt, ikki at skulla skiljast øðrvísi enn at skipanin í mesta mun skuldi sleppa at virka sjálvregulerandi samsvarandi útboði og eftirspurningi og við minst møguligum inntrivum ("stýring") frá almennari síðu. Samstundis var í arbeiðssetninginum dentur lagdur á at fyrireika inntriv í marknaðin av ymsum slagi – tvs. skapa forðingar fyri marknaðarkreftunum at virka, ella at avtaka ella mótvirka marknaðargrundingina (t.d. um anti-trust, útiloka útlendingar, tryggjað virksemi um alt landið, avgjald á landingar í útlondum, o.a). Reglur um kapping og kappingaravlaging og tílíkt, eiga eftir fatan Búskaparráðsins at verða givnar í serlóggávu.

Undanfarna landsstýri legði fram tað sjónarmið, at tá rindast skal fyri fiskirættindi, er tað rættindahavarin sum skal rinda. Rættindahavarin er formliga reiðaríið. Tað er eyðsæð, at tá landstýrið krevur part av inntøkunum hjá reiðarínum, so fer hetta at ávirka býtið millum reiðarí og manning. Landsstýrið hevur helst vitað hetta, men hevur ætlað at reiðara- og manningarfeløg skuldu loysa býtisspurningin við nýggjum sáttmálum. Gjald fyri veiðirættindi hava verið í gildi í nøkur ár nú, og ávísar tillagingar hava

[33] Almennar viðmerkingar til løgtingsmál nr. 50/2019
[34] Op.cit. Løgtingsmál 50/2019.
[35] Álitið frá fiskivinnunýskipanarnevndini 3. oktober 2016, síðu 20-22
[36] Álitið frá fiskivinnunýskipanarnevndini 3. oktober 2016, op.cit.
[37] Jóannes Jacobsen (2019) Path dependence in Faroese fisheries (mis)management, Marin Policy 108, article 103614
[38] Álitið frá fiskivinnunýskipanarnevndini 3. oktober 2016, op.cit.

verið avtalaðar millum manningar og reiðarí. Tað hevur tí verið ein rímulig hugsan, at feløgini fóru at loysa spurningin við tíðini. Tað er helst hugsandi, at landsstýrið hevur sloppið sær undan beinleiðis konfrontasjón við manningarfeløgini við at lata býtisspurningin til feløgini at loysa.

----

Vanliga marknaðarmekanisman er við sínum útboði og eftirspurningi effektiv tá tað snýr seg um tillutan ella býti av vanligum búskaparligum tilfeingi (í prísum og í nøgdum). Hinvegin kann vanliga marknaðarmekanisman, sum omanfyri nevnt, ikki brúkast, tá tað snýr seg um býti og tillutan av fiskatilfeingi í felagsogn. Teir einstøku ánararnir vilja tá síggja tað sum sín egna fyrimun at ovurfiska. Úrslitið verður, at ov lítið verður til allar, ella at ongin fær nakað, og at tilfeingisrentan hvørvur.

Tað eru bara tvinnir høvuðshættir at bøta um hendan trupulleika. Báðir hættir hava við sær, at "pilkað verður við" ognarrættin á ein serligan hátt[39].

1) Ein háttur er at landið gevur fiskimonnum/reiðaríum eini **serrættindi** (einkarætt) til fiskatilfeingið (kvotur innanfyri TAC), afturfyri at fiskimenn/reiðaríir rinda landinum brúksgjald (veiðigjald/ tilfeingisgjald). Vit kunnu kalla hesa loysnina fyri **serrættinda-loysnin.**

2) Ein annar háttur er, at landið **sum ánari** av tilfeinginum selur kvotur (innanfyri TAC) á uppboðssølu, og har inntøkan frá søluni fellur til landið. Vit kunnu kalla hesa loysnina **uppboðssølu-loysnin.**

Hesar báðar loysnir eru rættiliga ymiskar. Báðar skipanir eru sum so marknaðargrundaðar, men á hvør sín hátt[40]. Uppboðssøluskipanin stillar allar borgarar líka og virkar helst produktivitetsfremjandi[41], meðan serrættindaskipanin er ein fyrimunarskipan fyri rættindahavarar sum harafturímóti mótvirkar produktivitetsvøkstri[42], um ikki fult gjald verður latið fyri serrættindini. Serrættinda-loysnin hevur harumframt tann eginleika, at tað verður trupult at venda aftur.

Úrslitið av løgtingsvalinum 31.8.2019 gjørdist, at serrættinda-loysnin varð sett í gildi frá 1.1.2020. "Søgulig rættindi" er høvuðsgrundin fyri útluting, men eisini aðrar grundir kunnu vera, so sum rakstrartørvur hjá reiðaríum. Tá hendan loysnin er fult gjøgnumførd við ókeypis útluting av frítt umsetiligum eginkvotum eftir søguligum rættindum, og við rullandi 12 ára gildistíð, vendist illa aftur[43].

Eftir meting Búskaparráðsins átti **uppboðssølu-loysnin** ikki at verið slept, fyrr enn hon hevði verið eftirmett av serkønum óvildarfólkum. Tað verða altíð byrjunartrupulleikar við eini slíkari nýggjari skipan. Skipanin átti eisini at verið roynd og eftirmett aftaná at møguligir byrjunartrupulleikarnir vóru fingnir av vegnum.

Sanna Laksá hevur í síni PhD ritgerð gjørt eina ávegis lýsing og meting av kvotu-uppboðssølunum í 2016-2019[44]. Hennara niðurstøða er, at hesar uppboðssølur kundi eydnast betri um tær vóru skipaðar skilabetri.

[39]Warming, J. (1911) op.cit.
Warming, J. (1931): op.cit.

[40] Serrættatindaloysnin er "marknaðargrundað" á tann hátt at tillutaðu kvoturnar eru frítt umsetiligar (individual transferable quotas - itq)

[41] Kappingin um at keypa rættindi til tilfeingi á uppboðssølu ger, at reiðararnir noyðast at nýta mest effektivu tólini fyri at fáa nøktandi yvirskot.

[42] Frítøka fyri brúksgjald tvingar ikki serrættindahavarin til at hava mest effektiva amboðið. Serrættindi givin sum ein stuðul virkar sum ein koddi, tí serrættindahavarar eru vardir móti kapping.

[43] "mechanism of initially allocating quota through a process referred to as grandfathering, whereby quota is given to existing participants under the assumption that their experience and skill makes them best placed to use it. It has certainly been the most commonly applied approach when establishing ITQ management systems, but does rely in part on the assumption that there will be little need for subsequent reallocation". Ragnar Arnason et al, November 2010, Annual Review of Resource Economics.
https://www.researchgate.net/publication/228304004_Efficiency_Advantages_of_Grandfathering_in_Rights-Based_Fisheries_Management

44 Laksá, Sanna (2019): Distributing resources: An exploration of auctions and other allocation mechanisms, University of Liverpool management school.

Fyri at ein uppboðssøla skal rigga eftir ætlan, krevst fyrst og fremst at virkini eru javnstillað og í kappingarstøðu. Undanfarnu uppboðssølurnar eru tvørturímóti merktar av asymmetri, ið merkir, at bjóðararnir ikki vóru javnt stillaðir frammanundan. Til dømis høvdu summir av teimum fingið umleið 85% av kvotunum tillutaðar fyri lítið gjald frammanundan, meðan nýggir aktørar skuldu bjóða, uttan hendan kappingarfyrimun. Verandi aktørarnir vóru betri stillaðir í kappingini tá bjóðast skuldi á uppboðssølu, tí kvoturnar, teir høvdu fingið tillutað, tryggjaðu teimum frammanundan eitt framtíðar virksemi, sum kundi dekka størsta partin av komandi rakstrarkostnaðunum.

Ein av grundgevingunum fyri at nýta uppboðssølu, er at uppboðssøla gevur "rætta prísin" fyri tilfeingið. Tað merkir at hvør tann sum bjóðar, bjóðar tann prísin, sum hann metir tilfeingið er vert, ella sum gevur honum samanhang í raksturinum. Hvat "rætti prísurin" er, veldst tó um tann sum bjóðar. Vil bjóðarin verja síni rættindi, so bjóðar hann høgt. Spurningur kann tí setast við um prísurin, sum hvør einstakur aktørur bjóðar, kann vera sanna virðið, tá ið bjóðararnir ikki eru javnt stillaðir frammandundan. Undir hesum umstøðum kundu tey 15% av nøgdunum, sum vórðu seld á uppboði, ikki geva rættan prís fyri hini rættindini.

Harafturat eigur at vera ásett, hvat ætlanin er við uppboðssøluni, tá hon verður designað. Sambært Sannu Laksá vóru uppboðssølurnar dømdar til at miseydnast frammanundan, tí politisku myndugleikarnir ynsktu at uppfylla ov nógvar treytir í senn. Tað var ógreitt, hvat politisku myndugleikarnir vildu við uppboðssølum. Ynskini, um til dømis at fáa rætta prísin fyri tilfeingið samstundis, sum uppboðssølurnar skuldu fáa nýggjar aktørar inn í vinnuna, vóru ikki í samljóð við hvørt annað. Ein annar trupulleiki, sum designið av uppboðssøluni skal byrgja fyri er incitamentið hjá bjóðarunum til ótilvitað ella tilvitað at samskipa boðini.

Uppboðssølur umboða eitt slag av vísind. Neyðugt er tí, at roynd fakfólk og ikki politiski myndugleikin, skulu standa fyri designi av og fyri útbjóðing á uppboðssølunum, og fyri støðuga eftirmeting av sølunum. Tað er umráðandi, at bjóðarirnir eru væl kunnaðir um uppboðssølur, tað kann gerast við skeiðum fyri bjóðarar.

Búskaparráðið heldur, at fleiri av brekunum í uppboðssølunum vóru byrjanarbrek sum væl kunnu rættast. Eitt av brekunum, ið kunnu nevnast, var stóra ovissan um, hvørt hendan skipanin fór at halda fram eftir næsta løgtingsval ella ikki. Stórsta brekið var tó, at so stórur partur sum 85% av nøgdunum vórðu latnar fyri einki ella fyri nógv minni gjald enn uppboðsølugjaldið. Størsta brekið kundi eisini verið rættað við at selja øll rættindini á uppboði ella at gjaldið var í samsvar við gjaldið frá uppboðssøluni.

Tá tað snýr seg um at finna støddina á tilfeingisrentuni, má Búskaparráðið taka **uppboðssølu-loysnina** fram um **serrættinda-loysnina.** Bara **uppboðssølu-loysnin** kann geva upplýsingar um støddina av tilfeingisrentuni í búskapinum**.** Henda upplýsing er neyðug, tá tað snýr seg um at byrgja fyri, at ov nógv tilfeingisrenta í umfari - við at vaksa um samlaða eftirspurninginum - yvirhitar búskapin (tvs. at verja ímóti hálendsku sjúkuni[45]).

Ein náttúrligur kappingeginleiki er tengdur at **uppboðssølu-loysnini.** Eftir meting Búskaparráðsins er ein slíkur neyðugur til tess at geva produktivitetsvøkstur, ið gevur búskaparvøkstur. Virki, ið fáa kvotur eftir **serrættinda-loysnini**, verða vard móti kapping, serliga um fáar krevjandi treytir fylgja við kvotu-tilluting. Virki, ið eru vard móti kapping, hava ikki so nógv fyri neyðini at leggja doyin á framhaldandi betring av teirra kappingarføri.

Sum nú er, er loysnin við uppboðssølu slept av politisku myndugleikunum. Eftir meting Búskaparráðsins slepst ikki undan at taka inn størri gjøld frá fiskivinnuni sum frálíður, tí veksandi almennu útreiðslurnar vegna demografisku gongdini krevja tað. Búskaparráðið metir tað vera neyðugt framhaldandi at diskutera hvat skilabesta loysnin so er, herundir hvat rætta gjaldið er fyri tilfeingið.

Tað er neyvan nakar ivi um, at tey sum virka í fiskivinnuni – reiðarí og manning – fara at halda, at gjøldini eru ov høg, og serliga tá hesi gjøld hækka. Svarið til hesa ónøgd vil so vera, at ein vælvirkandi

45 Hálendska búskaparsjúkan er at funnið náturutilfeingi (nátúrgass) avskeplaði búskapin við yvirupphiting, revaluering av gjaldoyranum, mist kappingarføri hjá virkjum og, harvið vaksandi arbeiðsloysi. Tað vil siga at nakað man trúði var positivt fyri búskapin (ein part av búskapinum) í veruleiknum var mótsatt tá tað snúði seg um allan búskapin.

uppboðssøla hevði givið ein rættari prís. Um reiðararnir bóðu um eina uppboðssølu ístaðin, vildi hetta verið ábending um, at gjaldið er nóg høgt.

## II 5 Ymsar metingar av støðd á tilfeingisrentu í føroyskum tilfeingisvinnum

Støddin á tilfeingisrentuni í føroyskari fiskiveiðu kann ikki útroknast neyvt, men kann metast við grundstøði í fortreytum, ið hava óvissur.

Búskaparráðið gjørdi eina meting av støddini á tilfeingisrentuni á heysti 2014. Tá vóru óvissurnar neyvt lýstar, og greið fyrivarni vóru tilsvarandi givin[46].

Bert um alt tilfeingið verður selt á uppboði, er gjørligt at áseta virðið á tilfeingisrentuni beinleiðis.

Nýtti hátturin at meta um støddina á tilfeingisrentuni er lýstur í niðanfyri standandi uppseting:

**UMSETNINGUR**

**MINUS ALLAR KOSTNAÐIR UTTAN KOSTNAÐIR TIL LØN OG KAPITAL**

**= VIRÐISØKING**

**MINUS "BESTA ALTERNATIVA LØNIN" (METT) OG**

**MINUS "BESTA ALTERNATIVA  KAPITALAVKASTIÐ" (METT)**

**= TILFEINGISRENTA**

Sum uppsetingin omanfyri vísir, verður **virðisøkingin** fyrst roknað út sum eitt millumúrslit; hon er **umsetningur** (søluinntøkur) minus allar kostnaðir, tó undantikið kostnaðir til løn og kapital. Harnæst verður **tilfeingisrentan** roknað út sum virðisøkingin minus tann besta alternativa løn, ið fáast kann í vinnugreinini, og minus tað besta alternativa kapitalavkast, ið fáast kann í vinnugreinini. "Besta alternativa lønin" og "besta alternativa kapitalavkastið" eru metingar, ið byggja á fortreytir við óvissum.

Besta alternativa kapitalavkastið er í metingunum sett til 6% av skipavirðinum[47], soleiðis sum hetta virðið er ásett í roknskapunum. Besta alternativa kapitalavkastið er fatað sum "vanligt kapitalavkast" í vanligum vinnum.

Í 2014 var úrslit Búskaparráðsins ein tilfeingisrenta á umleið 450 - 500 mió. kr. Tølini í útrokningini vóru frá 2012 og roknskapartilfarið til hesar útrokningarnar fyri hvørt skipaslag hevur verið fingið til vega frá grannskoðaravirkjum[48]. Tá vóru fortreytirnar um eitt alternativt kapitalavkast á 6% og ein alternativ løn á 400.000 kr. nýtt. Hans Ellefsen hevur síðani dagført útrokningarnar, og tær vísa somuleiðis eina tilfeingisrentu á umleið somu upphædd fyri árið 2012 og sum er veksandi fyri hvørt árið fram. Útrokningarnar hjá Hans Ellefsen vísa, at tilfengisrentan var 1,2 mia. kr. í 2017, bygt á somu omanfyri standandi fortreytir.

Um besta alternativa lønin ístaðin verður sett til 700.000 kr. árliga (sum er kend løn í frálandavinnuni), og besta alternativa avkastið sett til 6%, verður tilfeingisrentan nærum 1 mia. kr. í 2017.

Tað er sjálvsagt ein innbygd óvissa í tílíkum útrokningum, men Búskaparráðið metir, at tað er av týdningini at hesar vera gjørdar fyri at sjónliggera virði av fiskastovnunum. Í tí sambandi eftirlýsir Búskaparráðið betri lønarhagtøl í ymsu vinnugreinunum, so at tað neyvari ber til sammeta ymsu vinnubólkarnar.

[46] Búskaparráðið: Búskaparfrágreiðing, á heysti 2014, síðu 58-93

[47] Her kundi eisini verið nýtt tryggingarvirði, fyri at fáa eitt meira objektivt virði.

[48] Búskaparráðið á heysti 2014: Búskaparfrágreiðing. Á síðu 68-80 er mannagongdin við metingini lýst í smálutir.

Tilfeingisgjøld eru ikki nakað nýtt í Føroyum, sí tekstkassa 8. Landsstýrið hevur við nýggju fiskivinnulóggávuni sett sær fyri at krevja inn somu upphædd gjøgnum tilfeingisgjøld, sum inntøkurnar frá veiðugjøldum og uppboðssølum góvu í 2018. Hesar inntøkur vóru umleið 300 mió. kr. í 2018, og eru mettar til 343 mió. kr. í 2020, sí fylgiskjal II. Hinvegin, um tilfeingisrentan av náttúrutilfeingi liggur um 1 mia. kr. í 2017, tekur landsstýrið inn ein alt ov lítlan part av tilfeingisrentuni.

Hartaftuat hevur landsstýrið í hyggju at seta í gildi serligar skattareglur fyri avhending av rættindum. Hetta er eftir fatan Búskaparráðsins skeiv leið at ganga. Tað, sum hevur týdning, er, at veiðigjøldini svara til veruliga virðið á rættindunum og ikki til, hvat manglar í á fíggjarlógini. Eitt ov lágt tilfeingsgjald virkar sostatt sum vinnuligur stuðul og skeiklar vinnuliga tillagingina. Somuleiðis er tað av týdningi, at tað er møguligt at gera tillagingar í fiskivinnuni, soleiðis at tað til ein og hvørja tíð eru tey, sum best megna at gangnýta tilfeingið við teimum tólum, sum hóska seg best, ið vinna rættindini. Ein høgur serskattur við avhending av loyvum vildi bremsa hesi tillaging og mótvirka produktivitetsvøkstri.

---

Ein alternativur háttur at eftirkanna tilfeingisrentuna í føroysku fiski- og alivinnuni er at greina yvirskotini í roknskapunum hjá virkjum í føroysku fiskivinnuni samanborið við aðrar vinnur.

Talvurnar II 1a, II 1b, II 2a, II 2b, II 2d, II 2e, II 3a, II 3b og II 3d niðanfyri stava frá almennum roknskapum hjá ymsu virkjunum og útrokningarnar eru gjørdar av búskaparfrøðingi Kári Petersen. Talvurnar geva eina rættuliga eintýdda mynd av vinnuligu gongdini og støðuni í tilfeingisvinnunum seinastu árini.

**Talva II 1a og b** vísa **eginpeningsvøkstur** og vinningsbýti fyri árini 2009-2018 í pelagisku vinnuni og alivinnuni í mió.kr.

**Eginpeningsvøkstur og vinningsbýti 2009-2018 í pelagisku vinnuni í mió kr.** **Talva II 1a**

| Pelagiski flotin, samtøk | 2009 | 2018 | Vøkstur | Vinningsbýti | Vinningsbýti og vøkstur |
|---|---|---|---|---|---|
| Eginpeningur Varðin | 250 | 1.339 | 1.089 | 160 | 1.249 |
| Eginpeningur Palli hjá Mariannu | 145 | 650 | 505 | 30 | 535 |
| Eginpeningur Framherji | 8 | 360 | 352 | 66 | 418 |
| Tilsamans | 403 | 2.349 | 1.946 | 256 | 2.202 |

**Kelda:** Kári Petersen og Vinnuvitan.biz

**Eginpeningsvøkstur og vinningsbýti 2009-2018 í alivinnuni í mió kr.** **Talva II 1b**

| Alifyritøkur | 2009 | 2018 | Vøkstur | Vinningsbýti | Vinningsbýti og vøkstur |
|---|---|---|---|---|---|
| Eginpeningur Bakkafrost | 344 | 4.077 | 3.733 | 2.595 | 6.328 |
| Eginpeningur Luna | 58 | 644 | 586 | 391 | 977 |
| Eginpeningur Mowi | 96 | 489 | 393 | 323 | 716 |
| Tilsamans | 498 | 5.210 | 4.712 | 3.309 | 8.021 |

**Kelda:** Kári Petersen og Vinnuvitan.biz

Talvurnar vísa, at vøksturin í eginpeninginum saman við útgoldna vinningsbýtinum hevur verið yvir 2 mia. kr. í pelagiska flotanum í tíðarskeiðnum 2009-2018. Fyri alivinnuna er eginpeningurin saman við útgoldna vinningsbýtinum vaksin 8 mia. kr. hesi árini.

**Talva II 2a, b og d** vísa **eginpeningsavkast** í % í pelagisku vinnuni, alivinnuni og øðrum vinnum árini 2009-2018.

| **Eginpeningsavkast í pelagisku vinnui í % , 2008-2018** | | | | | | | | | | | **Talva II 2a** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nótaskip | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
| P/F Driftin (MS Jupiter) | 8 | 24 | 53 | 79 | 58 | 59 | 73 | 79 | 90 | 24 | 74 |
| P/F Krossbrekka (MS Finnur | 26 | 46 | 102 | 108 | 84 | 68 | 101 | 132 | 148 | 104 | 114 |
| Miðal 2010-2018 | | | | | | | | | | | 86 |

**Kelda:** Kári Petersen og Vinnuvitan.biz

| **Eginpeningsavkast í alivinnuni í %, 2008-2018** | | | | | | | | | | | **Talva II 2b** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Alifyritøkur | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
| P/F Bakkafrost | 18 | 42 | 21 | 89 | 21 | 41 | 35 | 35 | 44 | 14 | 25 |
| P/F Luna | 9 | 17 | 67 | 37 | 10 | 55 | 37 | 28 | 42 | 37 | 26 |
| P/F Mowi Faroes | 20 | 19 | 41 | 27 | 4 | 39 | 60 | 14 | 55 | 21 | 15 |
| Miðal 2013-2018 | | | | | | | | | | | 35 |

**Kelda:** Kári Petersen og Vinnuvitan.biz

| **Eginpeningsavkast í øðrum vinnum í %, 2008-2018** | | | | | | | | | | | **Talva II 2d** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Arðar vinnur | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
| P/F Articon | 11 | 15 | 8 | 11 | 5 | 18 | 9 | 43 | 33 | 47 | 40 |
| P/F J&K Petersen | 34 | 0 | 18 | 25 | 0 | 3 | 4 | 1 | 2 | 5 | 23 |
| P/F Føroya Bjór | 3 | 5 | -1 | -1 | -1 | 3 | 3 | 6 | 4 | 4 | 7 |
| P/F MEST (u. kapitalpartar) | 3 | -5 | -9 | 15 | 5 | 5 | 18 | 25 | 14 | 13 | 16 |
| P/F BankNordik | 12 | 7 | 17 | 1 | 4 | 4 | -6 | -12 | 13 | 15 | 14 |
| Mærsk | | -4 | 15 | 10 | 11 | 9 | 12 | 2 | -6 | -4 | 10 |
| P/F Kósin | | | 4 | 43 | 14 | 4 | 1 | 11 | 8 | 4 | 0 |
| Miðal 2010-2018 | | | | | | | | | | | 10 |

**Kelda:** Kári Petersen og Vinnuvitan.biz

Sambært talvu II 2a og 2b hevur eginpeningsavkastið verið ávikavist 86% og 35% hjá nótaskipunum og alifyritøkunum. Hetta eginpeningsavkastið skal samanberast við eginpeningsavkastið í vanligum fyritøkum, ið síggjast í talvu II 2d. Summar fyritøkur hava havt stór eginpeningsavkast hesi seinastu árini, meðan aðrar, eitt nú danska risafyritøkan Mærsk, hevur havt lægri eginpeningsavkast. Í miðal hevur eginpeningsavkastið verið 10% hjá hesum "vanligu" fyritøkum.

Tølini í talvunum II 2a-d vísa, at eginpeningsavkastini í pelagisku vinnuni og alivinnuni eru ótrúliga stór, tá samanborið verður við tilsvarandi tøl frá væl kendum framburðarmiklum vinnuvirkjum í Føroyum og í útlondum nøkur ár aftur í tíðina. Fyri **nótaskip** hevur eginpeningsavkastið í miðal 2010-2018 verið 8,6 ferðir størri, og hjá alifyritøkunum hevur tað verið 3,5 ferðir størri, tá sammet verður við tølini í Talvu II 2d.

At miðal eginpeningsavkastið er fleiri ferðir størri enn avkastið í vanligum vinnum, staðfestir uttan iva, at ein tilfeingisrenta er í føroysku tilfeingisvinnuni.

Fyri Bakkafrost hevur gongdin árini 2008 – 2018 verið sum víst niðanfyri, tá sammett verður við BankNordik sum "besta alternativa kapitalavkastið", sí Talvu II 2e.

| **Eginpeningsavkast hjá Bakkafrost samanborið við BankNordik, 2008-2018** | | | | | | | | | | | **Talva II 2e** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
| Bakkafrost | 18 | 42 | 21 | 89 | 21 | 41 | 35 | 35 | 44 | 14 | 25 |
| BankNordik | 12 | 7 | 17 | 1 | 4 | 4 | -6 | -12 | 13 | 15 | 14 |
| Munur (yvirnormalt eginpeningsavkast) | 6 | 35 | 4 | 88 | 17 | 37 | 41 | 47 | 31 | -1 | 11 |

**Kelda:** Kári Petersen og Vinnuvitan.biz

---

Ein trupulleiki við at samanbera eginpeningsavkast millum fyritøkur er, at fyritøkur kunnu hava ymiskar støddir av eginpeningi. Summar fyritøkur hava lítlan eginpening og eina óvanliga stóra skuld til at fíggja virksemi við. Tá sær eginpeningsavkastið lutfalsliga stórt út, samanborið við eini fyritøku, ið hevur sama avkast men størri eginpening. Tískil er frægari at samanbera ognaravkastið. Ognaravkast vísir, hvat avkastið er av allari ognini, soleiðis at samanberast kann uppá tvørs av øllum vinnum.

**Talva II 3a, b og d** vísa **ognaravkast** í % í pelagisku vinnuni, alivinnuni og øðrum vinnum árini 2008-2018. Talvurnar vísa hvat avkastið er í mun til alla ognina, ið hevur við virksemið í fiskivinnuni at gera. Íløga gjørd í til dømis ein bygning, ið einki hevur við virksemið í fiskivinnuni at gera, (tað vil siga hvørki verður nýttur til veiðu ella tilvirking ella sum liður í eitt nú frakt av fiskinum), er ikki tald uppí samlaðu ognina[49].

**Ognaravkast í pelagisku vinnuni í %, 2008-2018** — **Talva II 3a**

| Nótaskip | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| P/F Driftin (MS Jupiter) | 15 | 16 | 29 | 34 | 28 | 25 | 34 | 36 | 36 | 27 | 36 | |
| P/F Krossbrekka (MS Finnur | 10 | 9 | 22 | 33 | 24 | 24 | 30 | 33 | 34 | 11 | 28 | |
| Miðal 2010-2018 | | | | | | | | | | | | 29 |

**Kelda:** Kári Petersen og Vinnuvitan.biz

**Ognaravkast í alivinnuni í %, 2008-2018** — **Talva II 3b**

| Alifyritøkur | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| P/F Bakkafrost | 0 | -1 | -3 | -1 | 0 | 22 | 26 | 26 | 32 | 15 | 22 | |
| P/F Luna | 6 | 12 | 38 | 25 | 7 | 35 | 29 | 20 | 31 | 27 | 17 | |
| P/F Mowi Faroes | 15 | 16 | 30 | 23 | 5 | 31 | 45 | 11 | 40 | 20 | 18 | |
| Miðal 2013-2018 | | | | | | | | | | | | 26 |

**Kelda:** Kári Petersen og Vinnuvitan.biz

**Ognaravkast í ørðum vinnum í %, 2008-2018** — **Talva II 3d**

| Arðar vinnur | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| P/F Articon | 11 | 10 | 6 | 8 | 5 | 7 | 3 | 15 | 11 | 19 | 16 | |
| P/F J&K Petersen | 16 | 7 | -6 | 21 | 7 | 3 | 5 | 3 | 4 | 2 | 8 | |
| P/F Føroya Bjór | 2 | 5 | -1 | -1 | 0 | 2 | 3 | 5 | 4 | 4 | 5 | |
| P/F MEST (u. kapitalpartar) | 4 | -1 | -6 | 7 | 2 | 6 | 12 | 11 | 7 | 8 | 9 | |
| Mærsk | | 5 | 15 | 13 | 11 | 10 | 9 | 3 | 0 | 1 | 1 | |
| P/F Kósin | -15 | -5 | 5 | 23 | 7 | 4 | 6 | 7 | 6 | 2 | -2 | |
| Miðal 2010-2018 | | | | | | | | | | | | 6 |

**Kelda:** Kári Petersen og Vinnuvitan.biz

Talvurnar vísa, at ognaravkastið er 29% hjá nótaskipunum, 26% hjá alifyritøkunum og 6% i miðal hjá vælkendum føroyskum fyritøkum og donsku risafyritøkuni Mærsk. At ognaravkastið í nóta- og alivinnuni eru nærum 5 ferðir størri, enn ognaravkastið í vanligu vinnunum, staðfestir enn einaferð, at ein tilfeingisrenta má vera í føroysku tilfeingisvinnuni.

----

Tað er ivaleyst ein búskaparligur fyrimunur fyri eitt lítið land sum Føroyar at hava nøkur óvanliga framburðarmikil og væl konsolideraði vinnuvirki. Hinvegin kann tað vera minni gott um slík virki freistast til at fáa sær lættvunnar politiskar sersømdir.

Soleiðis sum útlitini eru fyri framhaldandi serrættinda-loysn við útluting av fiskirættindum, skulu vit verða fyrireikað upp á, at tey stóru feløgini í pelagisku vinnuni og eisini í alivinnuni fara at margfaldast í eginpeningsstødd í komandi áratíggjum. Hesin peningavøkstur skal staðsetast onkustaðni, í Føroyum ella útlondum. Staðseting kann bara gerast í Føroyum við at keypa fastognir, jørð og kapitalpartar í Føroyum

[49] Verða íløgur, ið ikki hoyra til fiskivinnuna, so sum keypið hjá Varðanum í Gøtu av BankNordik-bygninginum taldar við, er ognaravkastið ikki so stórt. Slíkar íløgur eru ikki ein íløga í fiskivinnuna og eiga sjálvsagt ikki at vera taldar við í samlaðu ognini tá ognaravkastið av íløgum gjørdar í fiskivinnuna, skal roknast.

í møguligari kapping við virki, ið lítið og einki kunnu formáa sær í eini slíkari kapping. Hesi feløg koma harvið at eiga sera nógv at føroyska vinnulívinum og neyðugt verður tí, at hesi feløg kenna eina serliga samfelagsábyrgd.

**Tekstkassi 8 Inntøkur til almennar myndugleikar í Føroyum síðan landnám**

Stórur partur av inntøkum til føroyskar myndugleikar hava frá landnámi til síðst í 1800-talinum verið tilfeingisinntøkur. Talan er um skattir og gjøld av tilfeingi og býti av vinnuvirksemi, sum bygdi á lunnindi til jarðarognir[50]. Virksemi, m.a. handverk og tænastur, sum ikki hevur havt tilknýti til náttúrutilfeingi, tykist ikki at hava borið skatt ella gjøld.

Fleiri ymiskir skattir og gjøld vóru frá heilt gamlari tíð, t.d. kongsskattur, matrikulskattur, nevtollur, tingfaratollur, løgmanstollur, presttal og pæturspeningur. Hesir skattir og gjøld høvdu við tíðini ikki stóran samlaðan týdning og høvdu ofta hvør sítt ávísa endamál at fíggja. Gjøldini vóru vanliga latin við vørum.

Tíggjund hevur helst verið sett í verk umkring 1200 í Føroyum sum kirkjuskattur. Nakað áðrenn tað í Noregi. Katólska kirkjan átók sær uppgávur og slapp við loyvi frá kongi og tingstøðum at krevja skatt. Tíggjundin gjørdist mest tíðandi kirkjuskatturin og kanska yvirhøvur í fleiri hundrað ár. Tíggjund var oftast latin við vørum. Myndugleikarnir høvdu eftirlitsfólk fyri at halda skil á tí sum skuldi latast í skatti. Tað var kanska ikki altíð lætt at uppgera framleiðsluna, sum skuldi bera tíggjund og í ávísan mun var meting brúkt.

Ymsar tíggjundir verða nevndar: Fiskatíggjund, Korntíggjund, Lambstíggjund ella Seyða- og ulltíggjund, Neyta- ella smør- og ostatíggjund, Fuglatíggjund, Hvalatíggjund, Kópatíggjund.

Katólska kirkjan gjørdist múgvandi í Føroyum. Áðrenn siðaskiftið átti hon nærum helvtina av allari jørðini, meðan tann størra helvtin var óðal ella í privatari ogn. Við siðaskiftið yvirtók kongur kirkjuognina.

Lunnindi vóru rættindi, sum vóru knýtt at ogn av haga og bøi. Bygdafólk kundi reka vinnu móti at lata jarðaeigarunum part í úrtøkuni - landpart. Tílíkur vinnurakstur kundi vera at røkja bjørg eftir fugli, nótakast, kópaveiða, grindarakstur. Av tí at kirkjan og seinni kongur var stórur jarðaeigari verður hugt at landpartinum. Í bjargarakstri var landparturin millum ein triðing og eina helvt, meira um jarðaeigarin helt bjargalínuna. Í grindadrápi fór fyrst tíggjund av, síðan hvalir til embætir, Argja hospital og fyri skaða. Av restini fór helvtin til landpart at býta eftir markatali til kong og óðal. Hin helvtin fór til fólk sum vóru í grind. Býtið varð nakað broytt við grindareglugerðini frá 1832, har landparturin minkaði í fjórðing.

Við siðaskiftið stovnaði kongur eisini kongliga einahandilin og yvirtók handil í Føroyum og millum Føroyar og útlond. Onkur tíðarskeið gekk handilin væl. Hugsandi er, at handilin hevur verið týðandi partur av myndugleika sambandinum og kanska eisini eftirlitinum við vinnuliga virkseminum og hevur fíggjað part av embætisverkinum, og týdningurin av formligum skattum og gjøldum hevur tí minkað. Í hvussu er, tykist eftirlitið við innlating av tíggjund at hava viknað, og onkur ár t.d. í 1864 lótu sýslumenn illa at innlatingini av fiskatíggjund[51].

Í 1892 varð fiskatíggjund avtikin við lóg og avloyst av m.a. innflutningsgjøldum av rúskrekka. Fleiri broytingar komu seinni, soleiðis at tað varð gingið burtur frá tilfeingisgjøldum og -skattum og yvir til avgjøld, serliga innflutningsgjøld og inntøkuskatt. Henda tilgongd við umlegging av almennum inntøkum helt fram. Í 1963 var ein stór umlegging við løgtingslógini um inntøkuskatt, og í 1992 var ein onnur stór umlegging við løgtingslógini um meirvirðisgjald.

Í 2011 Byrjaðu vit so aftur at krevja tilfeingisgjøld.

[50] Lýsingin byggir mest á Poul Petersen; Ein føroysk bygd, Egið Forlag 1968 og Sprotin 2013.

[51] Rolf Guttesen (edit) (2010): Indberetning fra Sysselmanden i henhold til Amtsordre af 23. November 1830, Østerø Syssels Forfatning 1830-1904. (https://www.yumpu.com/da/document/read/17648766/sommer-1877-history-fo/87)

**Tekstkassi 9 Fiskivinnunýskipanarbólkurin og skattamál**

Álitið frá fiskivinnunýskipanarbólkinum snúði seg í stóran mun um skattlig viðurskifti. Búskaparráðið mælir til at hesin parturin av álitinum frá fiskivinnunýskipanarbólkinum verður nýttur í verki.

Ein kanning av nøkrum roknskapum hjá fiskiveiðufeløgum, ið hava útlendskar minnilutaánarar og útlendskar lánsveitarar, bendir á eitt ávíst "mynstur" við lutfalsloga stórari ogn og skuld og ofta lítlari ella negativari eginogn, og við lutfalsliga stórum fíggjarligum útreiðslum.

Í álitinum frá fiskivinnunýskipanarbólkinum var rógvið framundir, at ein slíkur fíggjarbygnaður var eitt í Føroyum virkið og lógligt amboð til at flyta vinning og avkast úr fyritøkunum og av landinum[52]. Heitið á hesum mynstri nevnist "tunn kapitalisering".

"Tunn kapitalisering" er sostatt, tá fremmandakapitalurin er lutfalsliga stórur í mun til eginkapitalin, og har renting av fremmandakapitalinum ávirkar roknskaparúrslitið. Skotið var m.a. upp at mótvirka hesum við at avmarka frádráttin fyri fíggjarligar útreiðslur í skattalógini. Eisini var skotið upp at banna útlendsk lán við tunnari kapitalisering til føroysk fiskivinnufeløg, í tann mun ásetta rentan av hesum lánum ávirka yvirskotið í hesum feløgum.[53] Tað sigur seg eisini sjálvt, at útlendsku ánararnir av fremmandakapitalinum mugu hava stóra ávirkan á virkið, og helst viðhvørt avgerandi ávirkan á avgerðir virkisleiðslunnar – herundir hvar viðlíkahald og keyp av útgerð skal fara fram.

Ein annar háttur til óregluliga at flyta vinning og avkast millum virkiseindir undir felags ognarskapi er "transfer pricing". Hesin háttur snýr seg um at nýta ymiska prísáseting á some vørur og tænastur, alt eftir hvørja virkiseind virkisleiðslan ynskir at yvirskotið, ávikavist undirskotið, skal flytast til.

Hesir spurningar um "tunna kapitalisering" og "transfer pricing" blíva aktuellir, tá fult tilfeingisgjald ikki verður kravt. Bert tá er nevnliga nakað at koma eftir. Um fult tilfeingisgjald verður kravt, koma í høvuðsheitum bert gangligir avleiðingar av útlendskum kapitali føroyska samfelagnum til góðar, m.a. við vitan og váðaspjaðing.

[52] Álit frá fiskivinnunýskipanarbólkinum 3. oktober 2016, s. 123-129,193-202

[53] Ibid.

# Fylgiskjøl til kapittul II

Virði á útlutingini til heimaflotan (28.734 tons) hevur eitt roknað útflutningsvirði uppá 345 mió. kr., treytað av at søluprísurin er 12 kr/kg. Mist inntøka frá veiðigjaldi av hesum makreli er 43 mió. kr (28.734.000*1,5).

**Meting av veiðugjaldi 2020** — **Talva II 4**

| | Makrel | Sild | Svartkjaftur | Barentshavið | Íalt |
|---|---|---|---|---|---|
| Samlaða kvotan | 922.064 | 525.594 | 1.161.615 | | |
| Føroysk kvota | 116.180 | 115.896 | 412.606 | | |
| Lata: | | | | | |
| RU | 12.500 | 8.555 | 82.000 | | |
| ES | | | 2.500 | | |
| NO | 6.600 | | | | |
| GR | | 3.200 | 13.500 | | |
| IS | 1.300 | | | | |
| Fáa frá ES | | | 10.000 | | |
| Heildarkvota tøk | 95.780 | 115.896 | 422.606 | 26.931 | |
| Áður selt 3 og 8 ára loyvi | 4.053 | 4.095 | 33.275 | 1.621 | |
| Heimaflotin | 28.734 | | | | |
| At gjalda tilfeingisgjald av | 62.993 | 111.801 | 389.331 | 25.310 | |
| Gjald kr/kg | 1,50 | 0,60 | 0,25 | 0,50 | |
| Upphædd | 94.490 | 67.080 | 97.333 | 12.655 | **271.558** |
| Uppboðssøla mett | 26.669 | 13.554 | 25.955 | 5.187 | **71.365** |
| Tilsamans veiðugjald | 121.158 | 80.635 | 123.287 | 17.842 | **342.923** |

**Kelda:** Fiskiveiðuavtalur o.a., savnað av Hans Ellefsen

# Tilvísingar/keldur og keldutilfar

Avrik sp/f, Hvalvík
Ragnar Arnason et al, November 2010, Annual Review of Resource Economics. (https://www.researchgate.net/publication/228304004_Efficiency_Advantages_of_Grandfathering_in_Rights-Based_Fisheries_Management)
BankNordik
Betri Banki
Búskaparráðið: Búskaparfrágreiðing, á heysti 2014, síðu 58-93
Búskaparráðið. Búskaparráðsfrágreiðing á vári 2019 (s.18)
Danmarks Nationalbank (útgávur og samrøður)
Håkan Eggert (2010) Jens Warming on Open Access, the Pigovian Tax, and Property Rights, History of Political Economy 42 (3): 469-481
Hans Ellefsen, búskaparfrøðingur
Ólavur Ellefsen, nevndarformaður (samrøður)
Fishpool.eu (laksaprísir)
Álit frá fiskivinnunýskipanarbólkinum 3. oktober 2016
Føroya Gjaldsstova, landsroknskapurin fyri fleiri roknskaparár
Føroya Gjaldstova, Búskaparskipan Landsins (BSL)
Globetracker: (https://www.globetracker.com/category/news/ )
Rolf Guttesen (ed.) (2010): Indberetning fra Sysselmanden i henhold til Amtsordre af 23. November 1830, Østerø Syssels Forfatning 1830-1904. (https://www.yumpu.com/da/document/read/17648766/sommer-1877-history-fo)
Hagstova Føroya, dátugrunnurin (hagtalsgrunnurin og talt & hagreitt)
Signar Heinesen (Data Quality Systems).
Jóannes Jacobsen (2019) Path dependence in faroes fisheries (mis)management, Marin Policy 108 (2019) 103615
Sanna Laksá, (2019): Distributing resources: An exploration of auctions and other allocation mechanisms, University of Liverpool management school.
Landsbanki Føroya, ávegis ársfrágreiðing
Løgtingsmál 50/2019.
Kári Petersen, búskaparfrøðingur
Poul Petersen; Ein føroysk bygd, Egið Forlag 1968 og Sprotin 2013.
Samrøður við fleiri fólk í vinnulívinum ella tengd at vinnufyritøkum
Samrøða við meklarafyritøkur, Betri Heim, SKYN og Meklarin
Thomson / Reuters (oljuprísir)
www.vinnuvitan.biz
Vørn
Vivino: (https://www.vivino.com/about)
Warming, J. (1911): Om grundrente af fiskegrunde. Nationaløk.Tidsskrift 49: 499-505
Warming, J. (1931): Aalegaardsretten. Nationaløk. Tidsskrift 69: 151-162
World Bank
WTI (West Texas Intermediate – oljuprísir)

# Yvirlit yvir talvur og myndir/tables and figures


| | |
|---|---|
| Talva I 1a /Table I 1 | GDP expenditures in mill. DKK in current prices in 2013, and the annual contributions to the growth in GDP 2014-2020 |
| Mynd I 1 / Figure I 1 | GDP growth in current prices and growth of the components of demand (expenditures) 1999-2020 |
| Mynd I 2 / Figure I 2 | Foreign demand, GDP expenditure and consumer price index, (net export right axis), 1998-2020, (index 1998=100). |
| Mynd I 3 / Figure I 3 | Real estate prices and consumer price index (consumer price index right axis), 2001-2019 |
| Mynd I 4 / Figure I 4 | Number of wage earners in primary, secondary and tertiary businesses in percent, 1999-2019. |
| Mynd I 5 / Figure I 5 | Value-added in primary, secondary and tertiary businesses in DKK millions, 1998-2020. |
| Mynd I 6 / Figure I 6 | Business profits (left axis) and company-paid wages (left axis) in DKK millions, and ratio profits/wages (right axis), 1998-2019. |
| Mynd I 7 / Figure I 7 | Employees (left axis) and wages per employee (right axis) in businesses in DKK millions, January 1999 to July 2019. |
| Mynd I 8 / Figure I 8 | Unemployment percentage (left axis) and net immigration (right axis) calculated as 12-month rolling total, January 1999 to July 2019. |
| Mynd I 9 / Figure I 9 | Population (left axis) and net immigration (right axis), calculated as 12-month rolling total, January 1999 to July 2019. |
| Mynd I 10 / Figure I 10 | Spot price of oil (DKK/barrel), January 2004 to January 2020. |
| Mynd I 11 / Figure I 11 | Weekly spot prices for salmon in Danish kroner (DKK), January 2004 to August 2019. |
| Mynd I 12 / Figure I 12 | Yearly fluctuations (in percent) in salmon spot prices, 2005 - 2019 in Danish kroner (DKK). |
| Talva I 2 / Table I 2 | Imports and exports of goods 2019 compared to 2018, and the trade balance 2011-2019. Import for farming and fishing, for construction, for other production, fuel and other, machines and other equipment, cars and vehicles for direct consumption, ships and aircrafts and other, raw materials for fish processing, total import of goods, import of goods excl. ships and aircrafts and other; Export of farmed fish, pelagic fish, demersal fish and other, other goods, ships, total export of goods, export of goods excl. ships and other; Trade balance for the years 2011-2019, incl. ships and other goods in DKK millions, excl. ships and other, in DKK millions]. |

| | |
|---|---|
| Mynd I 13 / Figure I 13 | Balance of payment, current account, in mill DKK, 1998 to 2017 |
| Mynd I 14 / Figure I 14 | Assets and liabilities abroad, in mill DKK, 1998 to 2017 |
| Table I 3 / Table I 3 | Grouping of current account, net in mill DKK, 1998 to 2017 |
| Mynd I 4 / Figure I 4 | Grouping of net assets abroad, net in mill DKK, 1998 to 2017 |
| Mynd I 15a / Figure I 15a | Wage income and import of consumer goods (durable, non-durable and semi-durable), January 1998 to July 2019, shown as index (Jan 1998=100). |
| Mynd I 15b / Figure I 15b | Wage income and government revenue from VAT, January 1998 to June 2019, shown as index (Jan 1998=100). |
| Mynd I 16a / Figure I 16a | Net Total - The expected financial situation of Faroese households 1 year ahead, January 2006 to January 2020. |
| Mynd I 16b / Figure I 16b | Business trends survey for households: Total Confidence indicator for Faroese households, January 2006 to January 2020. |
| Mynd I 7 / Figure I 7 | Total confidence indicator with regard to the Faroese economy, January 2006 to January 2020. |
| Mynd I 18a / Figure I 18a | Wage payments, year-to-year changes in percent, based on 12-month rolling total, January 2008 to December 2019: all business sectors, primary business sectors, secondary business sectors (incl. construction). |
| Mynd I 18b / Figure I 18b | Wage payments, year-to-year change in percent, based on 12-month rolling total, January 2008 to December 2019: all business sectors, private tertiary business sectors, and the government sector. |
| Talva I 5 / Table I 5 | Wage payments in each business sector, and the contribution to overall growth in wage payments for each business sector, and relative size of the wage payments for each individual business sector for 2018 and 2019 [farming, fishing, fish farming and gutting, raw material extraction industry, fish processing industry, shipyard and forge, other industry, construction, energy and water supply, commerce and repairs, hotel and restaurant industry, sea shipment, other shipment, post and telecommunications, finance and insurance, commercial services, domestic services, national administration, municipalities and Danish government institutions, education, health and social services agencies, associations and culture and other, uncategorised, total]. |
| Mynd I 19 / Figure I 19 | The number of employees (left) and the number of full-time unemployed (right), adjusted for seasonal trends, January 2008 to November 2019. |
| Mynd I 20 / Figure I 20 | Business trends indicator for construction June 2006 to January 2020 (orders, expected prices, expected labour needs, months of contracted work (right axis)). |
| Mynd I 21 / Figure I 21 | Business trends barometer for construction, June 2006 to January 2020: perceived limitations in production (none, demand, weather, labour, raw material/equipment, financial limitations, other). |

Mynd I 22 / Figure I 22 Government (i.e. public) consumption in DKK millions and yearly growth in government consumption in percent (right axis), 1999-2019.

Mynd I 23 / Figure I 23 Government comtrolled investment in DKK millions, 2003-2020 (central government, municipalities, and units controlled by the government).

Mynd I 24 / Figure I 24 Government controlled investment in DKK millions, and yearly growth in government controlled investment in percent (right axis), 2004-2020.

Mynd I 25 / Figure I 25 Central government financial results (central government budget balance) in DKK millions, 1998-2020. RLÚ1: ordinary; RLÚ2: extraordinary.

Mynd I 26 / Figure I 26 General Governmental (municipalities and social funds included) financial results 1998-2020.

Mynd I 27 / Figure I 27 Net public debt, 1998-2020, in DKK millions, (excluding equipment) (central government, municipalities, social funds).

Mynd I 28 / Figure I 28 Export of three types of fish products, calculated as 12-month rolling total, January 1994 to December 2019, in DKK millions (salmon, pelagic fish, demersal fish).

Mynd I 29 / Figure I 29 Unit prices in the exports of salmon, based on 12 months rolling total, January 95 to December 2019.

Mynd I 30 / Figure I 30 Unit prices in the exports of mackerel and herring, based on 12 months rolling total, January 95 to December 2019.

Mynd I 31 / Figure I 31 Unit prices in the exports of demersal fish (cod, haddock and saithe), based on 12 months rolling total, January 95 to December 2019.

Mynd I 32 / Figure I 32 Salmon farming slaughter (live weight), 1998-2020, million tonnes.

Talva I 6 / Table I 6 Faroese quotas for pelagic fish (mackerel, herring and blue whiting) and demersal fish, for the years 2019 and 2020

Mynd I 33 / Figure I 33 Values of landed catch of mackerel, herring and blue whiting, in DKK millions, 2000-2019

Mynd I 34 / Figure I 34 Export of pelagic fish, calculated as 12-month rolling total, January 2000 to December 2019, in DKK millions (mackerel, herring, blue whiting, fishmeal and fish oil).

Mynd I 35a / Figure I 35a Cod in Faroese waters: estimated stock and catches (in tonnes) and fishing intensity 1959 to 2019

Mynd I 35b / Figure I 35b Haddock in Faroese waters: estimated stock and catches (in tonnes) and fishing intensity 1957 to 2019

Mynd I 35d / Figure I 35d Saith in Faroese waters: estimated stock and catches (in tonnes) and fishing intensity 1961 to 2019

Mynd I 36 / Figure I 36 Export of fish products, calculated as 12-month rolling total, January 2000 to December 2019, in DKK millions.

Mynd I 37 / Figure I 37 — Balance of foreign trade (goods only) calculated as 12-month rolling total, January 1994 to December 2019, in DKK millions (ships excluded, ships included).

Mynd I 38 / Figure I 38 — Import and export of goods (ships excluded) calculated as 12-month rolling total in DKK millions, January 1994 to December 2019, (imports – red, exports – blue).

Talva I 6 / Table I 6 — Faroese banks: deposits from and loans to Faroese units, 2014 – 2019 (Dec).

Appendix to Chapter I

Talva I 7 / Table I 7 — Real estate prices per $m^2$ in DKK in the Faroe Islands 2018 and 2019.

Mynd I 39 / Figure I 39 — Real estate prices per $m^2$ in DKK in the Faroe Islands 1985 to 2019.

Talva II 1a / Table II 1a — Increase in networth plus paid dividend in pelagic fisheries in mill DKK 2009-2018

Talva II 1b / Table II 1b — Increase in networth plus paid dividend in salmon farming in mill DKK 2009-2018

Talva II 2a / Table II 2a — Return on networth in % in pelagic fisheries 2008-2018

Talva II 2b / Table II 2b — Return on networth in % in salmon farming 2008-2018

Talva II 2d / Table II 2d — Return on networth in % in other industries 2008-2018

Talva II 2e / Table II 2e — Return on networth in %: Bakkafrost compared to BankNordik 2008-2018

Talva II 3a / Table II 3a — Return on assets in % in pelagic fisheries 2008-2018

Talva II 3b / Table II 3b — Return on assets in % in salmon farming 2008-2018

Talva II 3d / Table II 3d — Return on assets in % in other industries 2008-2018

Appendix to Chapter II

Talva II 4 / Table II 4 — Estimation of governmental incomes from fishing license fees in tDKK in 2020.

# Orðalisti

Orðalistin er ein lýsing av nøkrum av búskaparligu hugtøkunum, sum verða nýtt í frágreiðingum Búskaparráðsins.

**Almenn nettoskuld**
Almenna nettoskuldin fevnir um alla fíggjarliga skuld og áogn í almenna geiranum. Almenna nettoskuldin er øll fíggjarlig skuld í almenna geiranum frádrigið alla fíggjarliga áogn. Fíggjarliga áognin fevnir millum annað um tøka gjaldførið og aðrar fíggjarognir.

**Almenn nýtsla**
Almennar nýtsluútreiðslur fevna um almennar rakstrarútreiðslur til millum annað fólkaskúlan, heilsuverkið og almannaverkið. Almennu lønarútreiðslurnar vóru umleið 3/4 av almennu nýtsluni í 2011. Afturat hesum er almenn nýtsla keyp av vørum og tænastum.

**Almennar útreiðslur tilsamans**
Størsti parturin av almennu útreiðslunum er almenn nýtsla og veitingar til húsarhald, fyritøkur og feløg. Harafturat eru almennu útreiðslurnar íløgur, rentuútreiðslur, stuðulsútreiðslur og aðrar útreiðslur.

**Almennir roknskapir**
Sí landsroknskapurin

**Arbeiðsfjøld**
Tey, sum hava arbeiði, og tey, sum eru arbeiðsleys samantald.

**Arbeiðsleys**
Tey, sum eru arbeiðsleys, men sum eru tøk á arbeiðsmarknaðinum og leita eftir arbeiði og sostatt eru partur av arbeiðsfjøldini.

**Arbeiðsloysi**
Arbeiðsleys í % av arbeiðsfjøldini.

**Arbeiðs-produktivitetur, sí framleidni**

**Arbeiðsvirkni**
Tey, sum eru arbeiðsvirkin, eru tey, sum eru í ella hava arbeiði (merkir tað sama sum danska orðið “beskæftigelse”)

**Automatiskir stabilisatorar**
Hesir minka um konjunktursveigg í niðurgangadi konjunkturum av tí at skattauppkrav hins almenna minkar, arbeiðsloysisstuðul og almannahjálp vaksa, samstundis sum eftirspuningurin frá almennu útreiðslunum (almenn nýtsla, veitingar og íløgur) er støðugur. Tilsvarandi minka hesir um konjunktursveigg í uppgangandi konjunkturum, tá skattauppkrav hins almenna veksur, arbeiðsloysisstuðul og almannahjálp minka, samstundis sum eftirspurningurin frá almennu útreiðslunum (almenn nýtsla, veitingar og íløgur) er støðugur.

**Avreiðingar**
Feskfiskaveiðan (av botnfiski og øðrum fiski) skrásett um avreiðingarskipanina. Mátað í virði ella í nøgd.

**Blokkstuðulskipan til at útjavna millum kommunur**
Stuðul til kommunur sum staturin fíggjar, og sum vanliga verður útroknaður og veittur eftir sonevndum objektivum kriterium.

**Bruttotjóðarúrtøka og tilknýtt tjóðarroknskaparhugtøk**
Bruttotjóðarúrtøka kann skilmarkast og ásetast tríggjar vegir:

(a) framleiðsluvegin ella virðisøkingarvegin (útboðsvegin) sum **bruttovirðisøkingin í støðisprísum (BVØ),**

(b) útreiðslu- ella eftirspurnarvegin sum **bruttotjóðarúrtøkan í marknaðarprísum (BTÚ),** ið kann bólkast sum privat húsarhaldsnýtsla + privatar íløgur + almenn nýtsla + almennar íløgur + (útflutningur av vørum og tænastum – innflutningur av vørum og tænastum. (BTÚ), og
(c) inntøkuvegin sum **bruttofaktorinntøkan í faktorprísum (BFI).**

Vanliga útgangsstøðið er (a), sum vanliga er grundarlagið fyri at finna hinar støddirnar.

BTÚ í marknaðarprísum verður ofta mett sum høvuðsmáti fyri búskaparligt virksemi. BTÚ er ikki fullkomið mát fyri inntøku ella framleiðslu í einum landi. T.d. leggur tað ikki upp fyri sliti av tilfeingi (náttúru- ella øðrum tilfeingi) ella útbúnaði. Eisini roynir BTÚ at máta allar vørur og tænastur til ein marknaðarprís, hóast allar vørur og tænastur ikki hava ein marknaðarprís, t.d. skúla- og heilsutænastur.

**(a) Bruttovirðisøking stytt BVØ í støðisprísum;**
Virði á allari vinnuligari framleiðslu (sum virðisskapan ella virðisøking) av vørum og tænastum í einum landi í einum ári, uppgjørd í støðisprísum. BVØ verður roknað við at draga virði á ráevnum og hjálpitilfari frá framleiðsluvirðinum í øllum vinnugreinum. BVØ verður roknað í støðisprísum.
Bruttovirðisøking verður ofta brúkt til at lýsa framleiðsluna býtta á vinnugreinar. Verður á enskum/donskum nevnt "gross value added (GVA)" ella "bruttoværditilvækst (BVT)".
(Samlaða bruttovirðisøkingin í støðisprísum er tað sama sum bruttotjóðarúrtøka í marknaðar-prísum frádrigið vøruskattir netto, sum fevna um meirvirðisgjald, punktgjøld og aðrar vøruskattir og vørustudningar.)

**(b) Bruttotjóðarúrtøka í marknaðarprísum, stytt BTÚ**
Bruttotjóðarúrtøka í marknaðarprísum er virðið í støðisprísum á samlaðari privatari og almennari framleiðslu frádrigið virðið á ráevnum, vørum og tílíkum, sum verða brúkt í fram-leiðsluni, plus vøruskattir netto, ið fevna um meirvirðisgjald, punktgjøld og aðrar vøru-skattir minus vørustudningar. Verður á enskum/donskum nevnt "gross domestic product" (GDP) ella "bruttonationalprodukt (BNP)".
BTÚ í marknaðarprísum kann síðan bólkast í útreiðslupartar (nýtsla, íløgur og nettoútflutning av vørum og tænastum).

**(c) Bruttofaktorinntøka, stytt BFI í faktorprísum**
Innkoman tilsamans til (samsýningin til) allar framleiðslufaktorarnar í einum landi í einum ári, uppgjørd í faktorprísum; BFI kann verða roknað sum: løn og "restinnkoma" (avskriving, rentur og avlop). Vanliga liggur lønarparturin millum 2/3 og 3/4. Ensku/donsku heitini eru eru "gross domestic income at factor cost" og "bruttofaktorinkomst".

**Bruttotjóðarinntøka, stytt BTI;**
Øll innkoma, sum íbúgvarnir í einum landi vinna í einum ári, um hon er vunnin innanlands ella uttanlands, uppgjørd í marknaðarprísum. BTI verður roknað við at leggja lønir, rentur og vinningsbýti úr útlondum aftur at BTÚ, og við at draga lønir, rentur og vinningsbýti til útlond frá BTÚ. Ensku/donsku heitini eru "gross national income" og "bruttonatinalindkomst".

**Bruttotjóðarinntøka tøk, stytt tøk BTI**
Bruttotjóðarinntøka, ið er javnað fyri gávur til útheimin og gávur frá útheiminum (m.a. donsku veitingarnar) og til dømis eisini fyri tryggingarendurgjøld millum land og umheim. Tøk BTI ella tøk bruttotjóðarinntøka er tann upphædd, sum samfelagið hevur at ráða yvir til nýtslu og uppsparing. Ensku/donsku heitini eru "gross national disposable income" og "disponibel bruttonationalindkomst".

**Bruttotjóðarúrtøka í føstum prísum**
Bruttotjóðarúrtøka í føstum prísum er uppgerð av BTÚ, har ið roynt verður at javna gongdina í BTÚ fyri prísvøkstri á ráevnum, vørum og tænastum. Vøksturin í BTÚ í føstum prísum verður vanliga

brúktur sum vísital fyri búskaparvøkstur millum lond. Vøkstur í BTÚ í føstum prísum vísir vøkstur í framleiðsluni í mongdum. Verður nevnt "Real GDP" ella "realt BNP".

**CIF** Virðið er íroknað "cost, insurance and freight" sum partur av veitingartreyt.

**Eftirspurningur**
Nøgdin av vørum og tænastum húsarhald, vinnan, tað almenna og umheimurin vilja keypa.

**Fíggjarkrav, netto**
Fíggjarkravið, netto, vísir fíggjarliga úrslitið av virkseminum í einum geira ella einum landi. Er fíggjarkravið til dømis minni enn 0, hevur tøka inntøkan ikki rokkið til at rinda fyri nýtsluna og íløguvirksemið, sum hevur verið í tíðarskeiðnum.

**Fíggjarpolitikkur**
Búskaparpolitisk tiltøk, ið hava sum endamál at stýra og minka búskaparlig sveiggj. Skilt verður vanliga millum at reka aktivan fíggjarpolitik (ekspansivan ella kontraktivan) og at brúka automatiskar stabilisatorar í passivum fíggjarpolitikki.

**Fíggjareffekt ("finanseffekt"):**

Eitt roknað mát fyri hvussu nógv fíggjarpolitikkurinn styðjar upp undir búskaparliga virksemið ella vøksturin í BTÚ. Ein positiv fíggjareffekt vísir at fíggjarpolitikkurin gevur eitt íkast til vøkstur í búskaparliga virkseminum (vøksturin í BTÚ). Ein negativ fíggjareffekt merkir at fíggjarpolitikkurin gevur eitt íkast til at tálma búskaparliga virksemið (vøksturin í BTÚ). Ein fíggjareffekt ið verður roknað til null merkir at fíggjarpolitikkurin hevur verið neutralur og uttan ávirkan á búskaparliga aktivitetin (vøksturin í BTÚ.

**Fíggjarligt ella búskaparpolitiskt haldføri**
Ein búskaparpolitikkur við givnum regluverki um skattainntøkur, almenna nýtslu, íløgu og inntøkuflytingar er haldførur, tá ið nútíðarvirðið av framtíðar almennu útreiðslunum svarar til nútíðarvirðið av framtíðar almennu inntøkunum (soleiðis at nettoskuld hin almenna verður óbroytt).

**Fløskuhálsur**
Knappur framleiðslufaktorur; fløskuhálsurin ger av hvussu nógv kann verða framleitt av vøruni.

**FOB** veitingartreyt er "free on board"; vøran er latin, tá hon er komin umborð á skipið, ið nevnt er aftan á "FOB", og keyparin rindar fyri víðari flutningin.

**Framleidni (produktivitetur)**
Framleidni verður vanliga uppgjørt sum bruttovirðisøking í føstum prísum fyri hvønn arbeiðstíma (tímaproduktivitetur) ella fyri hvønn løntakara í framleiðsluni (arbeiðsproduktivitetur).

**Framleiðsla**
Nýtsla av tilfeingi og útbúnaði at framleiða vørur og tænastur sum hava virði. Virðið á framleiðslu verður mátað í føstum prísum, t.e. eftir vanligan prísvøkstur.

**Føðitíttleiki samanlagt** Summurin av øllum 1-ára aldurstreytaðu føðitíttleikunum millum 15 og 50 ár.

**Gjaldsjavni**
Hagfrøðilig uppgerð ið tekur samanum allar búskaparligar flytingar hjá einum landi við umheimin eitt ávíst tíðarskeið og mátað í sama gjaldoyra. Mest nýtta konta í gjaldjavnanum er rakstrar-viðskifti gjaldsjavnans (current account), ið fevnir um vøruflytingar og tænastuflytingar umframt lønar- og inntøkuflytingar og rakstrarflytingar millum landið og tess umheim. (Sí annars um gjaldsjavnan í frágreiðingini).

**Haldføri: Sí fíggjarligt ella búskaparpolitiskt haldføri.**

**Haldføris-indikator**
Samanfatar við einum %-tali fíggjarligu haldførisgóðskuna hjá einum almennum geira. Negativt virði merkir minni gott haldføri, og positivt virði gott haldføri. Virðið á haldføris-indikatorinum í % vísir hvussu stór fíggjarpolitisk tillaging í % av BTÚ skal til, fyri at nettoskuld almenna geirans skal vera óbroytt.

**Handilsjavni**
Virðið á uttanlandshandli (t.e. inn- og útflutningi) av vørum hjá einum landi við umheimin. Mátað í sama gjaldoyra og eitt ávíst tíðarskeið. Javnin verður ofta uppgjørdur sum útflutningur minus innflutningur (t.e. nettoútflutningur).

**Inntøku-elastisitetur**
(Lutfalslig broyting í eftirspurningi/lutfalslig broyting í inntøku). Er inntøku-elastisiteturin størri enn eitt, er talan um luksusvøru; er inntøku-elastissiteturin millum eitt og null, er talan um neyðuga vøru; er inntøku-elastisiteturin negativur, er talan um "inferiøra" vøru. Sí prís-elastisitetur.

**Konjunkturar**
Stutttíðarsveiggj í búskaparligari framleiðslu og í arbeiðsloysi samsvarandi høvuðsgongdini yvir longri tíðarskeið. Vit skilja vanliga millum hákonjunktur og lágkonjunktur og stigini millum há- og lágkonjunktur

**Konjunkturjavnað alment úrslit**
Konjunkturjavnaða almenna úrslitið er staðfest alment úrslit javnað fyri ávirkanir frá konjunktur-støðuni á almennar inntøkur og útreiðslur og aðrar ikki varandi og serliga umstøður, til dømis oljuprísir ella serligar íløgur.
Konjunkturjavnaða almenna úrslitið gevur sostatt eina meira rættvísandi mynd av veruligu gongdini í almenna búskapinum sum heild sammett við staðfesta almenna úrslitið.
Konjunkturjavnaða úrsliti hjá almenna tænastugeiranum verður vanliga á enskum/donskum nevnt "cyclically adjusted budget balances" ella "strukturel saldo".

**Konjunkturjavnað framleiðsla**
Konjunkturjavnað framleiðsla vísir mettu bruttotjóðarúrtøkuna í eini støðu, har ið roynt verður at javna fyri ávirkanir frá konjunkturunum í samfelagsbúskapinum. Roynt verður sostatt at vísa bruttotjóðarúrtøkuna í eini støðu við normalkonjunkturi í samfelagnum. Í eini støðu við normal-konjunkturi verður ofta sagt, at gongdin í samfelagsbúskapinum samsvarar við javnan vøkstur í prísum og lønum. Í frágreiðingini verður bruttovirðisøking brúkt sum vísital fyri framleiðslu heldur enn bruttotjóðarúrtøku, men hetta hevur ikki stóran týdning fyri úrslitini ella niðurstøður. Verður á enskum/donskum nevnd "potential output", "potential GDP" og "strukturelt/potentielt output (BNP)".

**Konjunkturfrávik**
Konjunkturfrávikið er munurin millum staðfesta framleiðslu og konjunkturjavnaða framleiðslu. Er konjunkturfrávikið størri enn 0, kunnu vit siga, at hákonjunkturur er í samfelagsbúskapinum; trýst er sum oftast á arbeiðsmarknaðinum, lítið av tøkari framleiðsluorku er í samfelagnum, og prísvøkstur er á flestu marknaðum. Er konjunkturfrávikið minni enn 0, kunnu vit siga, at lágkonjunkturur er í samfelagnum, lítið trýst er á arbeiðsmarknaðinum, og tøk framleiðsluorka er í samfelagnum. Konjunkturfrávik verður á enskum/donskum nevnt "output gap" og "output gab".

**Kredittvirði**
Evnini hjá einum lántakara at rinda einum lánveitara lán aftur eftir lánitreytunum. Verður oftast mátað sum sannlíkindini, at ein lántakari fer at rinda lánið aftur eftir lánitreytunum. Kredittvirðið er avgerandi fyri, hvørja rentu og hvørjar treytir ein lántakari kann læna pening fyri.

**Landsroknskapurin**
Í almennnum roknskapum verða útreiðslur til løgur útreiðsluførdar (og ikki ognarførdar til seinni avskrivingar sum í virkisroknskapum). Sama er galdandi fyri útlán, ið verða útreiðsluførd og afturgjaldingar verða inntøkuførdar. Sostatt verður almenna roknskaparúrslitið roknað sum rakstrar-, íløgu- og útlánsúrslitið.

**Landskassaskuld**
Landskassaskuldin fevnir bara um skuld hjá landinum og harvið ikki um skuld hjá kommunum ella sosialum grunnum. Meginparturin av landskassaskuldini er lánsbrævalán. Landskassaskuldin er sum oftast ein bruttouppgerð av skuldini, har dentur verður lagdur á fíggjarligu skyldurnar hjá landinum (passivsíðuna á fíggjarjavnanum).

**Millumkommunal útjavning**
Útjavning til kommunur sum verður fíggjaður av kommunum sjálvum. Kommunur sum eru verri fyri enn miðalkommunan móttaka veitingar frá kommunum sum eru betri fyri enn miðal. Verður útroknað eftir sonevndum objektivum kriterium.

**Nettoflyting**
Tilflutt fólk frádrigið fráflutt fólk. Talan er um nettotilflyting, tá ið tilflutt fólk eru fleiri enn fráflutt.

**Nettokassaúrslit**
Uppgerð av muninum millum inngjøld til og útgjøld úr landskassanum, sum síggjast beinleiðis á fíggjarlógini. Sammett við RLÚ-úrslitið (sí niðanfyri) er at nettokassaúrslitið umboðar ein beinleiðis kassaroknskap, tað vil siga ein uppgerð av gjaldførinum hjá landinum. Nettokassaúrslitið svarar í stóran mun til broytingina í landskassaskuldini frá ári til ár.
Munurin millum RLÚ-úrslitið (sí niðanfyri) og nettokassaúrslitið stavar í stóran mun frá periodiseringum (tíðaravmarkingum), við tað at munur kann vera á, hvussu inntøkur ella útreiðslur verða bókaðar í landsroknskapinum og harvið ávirka RLÚ-úrslitið og hvussu ítøkiligu inn- og útgjøldini fara fram í tíð og harvið ávirka nettokassaúrslitið.

**Peningamongdin**
Skilt verður millum fleiri mát yvir peningamongdina. Tað mest einfalda er tað sum húsarhaldini og virkini hava av seðlum, myntum og innistandandi í peningastovnum. Viðhvørt er støddin á peningamongdini (og ikki rentan) mál fyri peningapolitikkinum í einum landi, ið kann reka peningapolitikk. T.d. í USA umleið 1980.

**Primerar vinnur**
Vinnur sum landbúnaður, fiskivinna og námsvinna, eisini kallað tilfeingisvinnur. Framleiða vørur úr náttúru tilfeingi. Sí sekunderar og tertierar vinnur.

**Prís-elastisitetur**
Lutfalslig broyting í eftirspurningi/lutfalsig broyting í prísi; er talið numeriskt størri enn eitt, er eftirspurningurin elastiskur; er talið numeriskt minni enn eitt, er eftirspurningurin prís-óelastiskur. Ein príslækking fyri prís-elastiskar vørur gevur vøkstur í søluinntøkum, og øvugt tá tað snýr seg um prís-óelastiskar vørur. Sí inntøku-elastisitetur. Marglætisvørur eru vanliga prís-elastiskar, og neyðsynjarvørur prís-óelastiskar.

**Prísvøkstur (inflasjón)**
Prísvøkstur merkir, at prísirnir á vørum og tænastum yvirhøvur hækka líðandi yvir tíð.

**Rentumunur**
Munurin millum inn- og útlánsrenturnar hjá peninga- og fíggjarstovnum í miðal. Rentumunurin er týdningarmesta inntøkukeldan hjá peninga- og fíggjarstovnum. Eisini kallað rentumarginalur.

**Rentuspennið**
Munurin millum rentuna í tveimum londum ella landabólkum. T.d. munurin millum rentuna Føroyar mugu gjalda í sambandi og lántøku, og rentuna Danmark má gjalda í sambandi við lántøku.

**RLÚ-úrslit**
Stytting fyri rakstrar-, løgu- og útlánsúrslit landskassans. RLÚ-úrslitið er munurin millum landskassans inntøkur og útreiðslur uppgjørt eftir meginreglunum í landsroknskapinum. RLÚ-úrslitið viðvíkur roknskapinum hjá landskassanum (sí landsroknskapurin). RLÚ 1 fevnir um vanligar postar. RLÚ 2a fevnir um vanligar og óvanligar postar, tó ikki flytingar til Búskapargrunn. RLÚ 2b fevnir um vanligar og óvanligar postar, herundir eisini flytingar til Búskapargrunn.

**Sekunderar vinnur**
Vinnur sum framleiða vørur, herundir byggarí og ídnaður. Sí primerar og tertierar vinnur

**Skattur og avgjøld**
Kravd gjøld til tað almenna uttan nakra ávísa ella serliga mótveiting frá tí almenna.

**Skuld**
Upphædd sum búskaparlig eind (t.d. fyritøka, persónur ella land) skyldar aðrari búskaparligari eind.

**Sosialir grunnar (Almannagrunnar)**
Arbeiðsloysisskipanin (eisini kallað ALS), Samhaldsfasti Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin (eisini kallaðar, AMEG, SAMEG ella AMG), Barsilsskipanin og Heilsutrygd.

**Staðfestur almennur grundrakstur**
Staðfestur almennur grundrakstur verður í hesum føri lýstur sum staðfest alment úrslit frádrigið nettorentuútreiðslur (rentuútreiðslur minus rentuinntøkur). Verður enskum/donskum nevnt "general government primary balance" og "faktisk primær saldo".

**Staðfest alment úrslit**
Almenna úrslitið vísir avlop ella hall hjá almenna tænastugeiranum og verður lýst sum munurin millum almennar inntøkur og útreiðslur. Uppgerðin fylgir teimum leiðreglum, sum tjóðarroknskapurin verður uppgjørdur eftir. Tað almenna fevnir um heimastýrisfyrisitingina, kommunufyrisitingina, ríkis-fyrisitingina og sosialar grunnar. Verður á enskum/donskum nevnt "general government overall balance" og "faktisk offentlig saldo".

**Staðfest framleiðsla**
Virðið á vørum og tænastum frá marknaðarligari framleiðslu, framleiðslu til egna nýtslu og aðrari framleiðslu, sum ikki er marknaðarlig. Framleiðsla er ikki tað sama sum søla. Til dømis er framleiðsluvirðið í handilsvirki ikki sølan, men sølan minus innkeyp av handilsvørum (brutto-vinningur). Í frágreiðingini verður bruttovirðisøkingin úr tjóðarroknskapinum nýtt sum vísital fyri framleiðslu. Bruttovirðisøking ella bruttotjóðarúrtøka verða sum oftast brúkt sum vísitøl fyri framleiðslu. Verður enskum/donskum nevnt "actual output" og "faktisk produktion".

**Strukturel saldo (yvirskot ella hall)**, sí konjunkturjavnað alment úrslit (cyclically adjusted budget balance), alment úrslit sum ikki er treytað av konjunkturi (er ein roknað stødd).

**Strukturelt arbeiðsloysi**, arbeiðsloysi sum ikki er treytað av konjunkturi (er ein roknað stødd).

**Strukturelt arbeiðsvirkni**, arbeiðsvirkni sum ikki er treytað av konjunkturi (er ein roknað stødd).

**Tað almenna**
Landið (landskassin), kommunurnar, sosialir grunnar, ríkisfyrisitingin, almenn og kommunal partafeløg. Tað almenna fevnir sostatt um heimastýrisfyrisitingina, kommunufyrisitingina, ríkis-fyrisitingina og sosialar grunnar. Heimastýrisfyrisitingin fevnir um landsstovnar, meðan kommunufyrisitingin fevnir um kommunurnar og kommunustovnar. Ríkisfyrisitingin fevnir um donsku ríkistovnarnar í Føroyum, og sosialu grunnarnir eru Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðs-marknaðar-eftirlønargrunnurin, Barsilsskipanin og Heilsutrygd.

**Tertierar vinnur**
Vinnur sum framleiða og selja tænastur, herundir tað mesta av almenna geiranum. Sí primerar og sekunderar vinnur.

**Tøk bruttotjóðarinntøka**
Sí frágreiðingina undir bruttotjóðarúrtøka

**Uppsparing**
Munurin millum inntøku og nýtslu hjá ávísari búskaparligari eind (t.d. einum húsarhaldi ella eini fyritøku).

**Útboð**
Vørunøgdin tilsamans og tænastur, ið eru tøk at keypa hjá húsarhaldum, vinnuni, almenna tænastugeiranum og umheiminum. Í makrobúskapi: framleiðslukapasiteturin (útboðskapasiteturin) í búskapinum.

**Virðisøking**
Munurin á virðinum á framleiðsluni og virðinum á nýtslu í framleiðsluni.T.e. tað virðið, ið verðru lagt afturat virðinum á nýtsluni (t.d. rávøru) við góðsking í framleiðsluni. Sí Bruttovirðisøkingin (BVØ) í støðisprísum.

## Tíðindaskriv og samandráttur frá Búskaparráðnum hin 2. mars 2020

Fyri 2020 metir Búskaparráðið saman við Hagstovuni vøksturin í BTÚ í leypandi prísum at verða 7,0%. Harumframt hevur Búskaparráðið, sum víst í niðanfyristandandi yvirliti, endurmett vøksturin í BTÚ í leypandi prísum fyri 2019 til 9,0%. Broytta metingin er stór fyri 2019 vegna óvæntaða stóra tøku í alivinnuni. Hetta hevur samband við nýggj háttaløg, har fiskurin er størri, tá hann fer á sjógv, og at hann veksur skjótari.

| | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mettur BTÚ-vøkstur í leypandi prísum: | 6,9% | 3,3% | 3,0% | 9,0% | 7,0% |

**Nettoogn landskassans ov lítil**
Nettoogn landskassans er í 2020 mett til slakar -500 mió. kr. Tá mált verður eftir nettofíggjarogn uttan útbúnað hevur landskassin í krónum eina verri fíggjarstøðu í 2020 enn í 2007. Hetta er ein avbjóðing fyri førleika landskassans at halda eina støðuga útreiðslugongd í komandi lágkonjunkturi.

Tá talan er um fortreytir fyri at reka konjunkturpolitik, er tað fíggjarstøðan og kreditvirðið hjá landskassanum, sum hevur týdning. Landsstýrið og løgtingið hava ábyrgdina av konjunkturpolitikkinum og mugu gera tær fyriskipanir, sum eru neyðugar í hesum samanhangi. Fíggjarstøðan hjá øðrum geirum enn landsstýrinum, hevur lítið at siga fyri virkisfrælsið hjá landsstýrinum viðvíkjandi konjunkturpolitikki, tí um landsstýrið skal til aðrar geirar eftir pengum við skatti ella á annan hátt, verður keypsorka tikin frá hesum geirum, og soleiðis mótarbeiðir eitt tílíkt átak tí konjunkturpolitikki, sum rættur er at reka. Tí er fíggjarstøðan og kreditvirðið hjá landinum avgerandi fyri konjunkturpolitikkin og ikki støðan hjá øðrum geirum.

Fíggjarogn landskassans skal annaðhvørt vera so stór, at hallini kunnu berast uttan lántøku, ella skal fíggjarstøðan vera so mikið góð, at kredittvirðið er nóg gott til at læna til hallini í einum lágkonjunkturi. Í tíðarskeiðinum 2008 til 2015 økti landsstýrið skuldina við samanlagt 2,7 mia. kr. Í hesi tilgongd lækkaði metingarfyritøkan Moody's kredittmetingina. Hetta merkir, at tað ikki var nógmikið, at nettoognin hjá landskassanum var null í 2007, beint undan fíggjarkreppuni í 2008, fyri at megna tey komandi árini við halli uttan at missa eitt stig í kredittmetingini.

Við verandi konjunkturstøðu, við metlágum arbeiðsloysi átti yvirskotið á fíggjarlógini tí at verið væl størri fyri 2020.

**Fult veiðigjald økir produktivitetin og bøtir um haldførið**
Til at fremja produktivitetsvøkstur í fiskivinnuni, er avgerandi at rindað verður fyri serrættin at fiska. Í langa siktinum er tað bert øktur produktivitetur, sum kann skapa økta vælferð í Føroyum. Tí eiga ásetingar í vinnulóggávu ikki at taka burtur kappingar-elementið, sum eggja til øktan produktivitet, men at avmarka seg til fyrisitingarmál og til at basa bágar í marknaðarmekanismuni, ið seta natúrliga kapping úti av spælinum.

Produktivitetsvøkstur í privatum vinnum loysir vanliga ikki ein haldføristrupulleika, tí lønargongdin í almenna geiranum plagar at fylgja við lønargongdini í privata geiranum. Í fiskivinnuni er tað kortini galdandi at produktivitetsvøkstur kann minka um haldføristrupulleikan, um tilfeingisrentan verður kravd inn við gjaldi. Hetta tí fiskivinnan vegna minkaðan stuðul verður meira tilskundað til at gera kappingarfremjandi og produktivitetsmennandi íløgur, ið ikki høvdu havt hægri lønarlag við sær í fiskivinnuni, tí tilfeingisrentan tilfellur landskassan og ikki reiðaríum og manningum.

Somuleiðis er ein øktur produktivitetur avgerandi, tá vit skulu møta haldførisavbjóðingini, tí hann styðjar upp undir eitt hægri inntøku- og tænastustøði, ið kann eggja ungum fólki til at búseta seg í Føroyum, eins og produktivitetsvøksturin skapar rúmd fyri nýmenning og arbeiðsplássum í øðrum vinnum.

# English Summary

The Economic Council and Statistics Faroes Islands estimate the growth in GDP for 2020 in current prices at 3.6 %. The Economic Council has also, as indicated in the table below, adjusted its estimate for the growth in GDP for 2019 in current prices at 9.0 %. The estimate for 2019 has been adjusted significantly due to unexpectedly high salmon harvests. The growth is salmon farming is the result of new farming methods—the smolt let into farming cages is larger and the fish grow faster.

| | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| Estimated growth of GDP in current prices: | 6.9% | 3.3% | 3.0% | 9.0% | 7.0% |

**The Exchequer Net Assets Are Too Low**

The Exchequer net asset in 2020 is estimated at almost DKK -500 million. When measured in net financial assets, without material-equipment assets, the national accounts in DKK are worse off in 2020 than in 2007. Therefore, the Exchequer will face a challenge to maintain stable expenditure levels in a coming economic down cycle.

Considering the conditions for implementing business-cycle policies (fiscal policy), the Exchequer's balance sheet and credit rating are crucial factors. The responsibility for business cycle policies (fiscal policies) lies with the Faroese government and parliament, and they must implement the necessary measures in these contexts. The financial state of sectors other than the Exchequer have little bearing on the power of the government to implement business-cycle policies, for if the government seeks to generate income from other sectors through taxes or other fees, the spending power of these sectors is lessened. Therefore, such measures counteract good (fiscal) business-cycle policies. Thus, the Exchequer balance sheet and credit rating are crucial for fiscal policy, not the financial state of other sectors.

Either the Exchequer's financial assets need to be of such a size that it can finance deficits without taking out loans or it needs to be financially sound enough to maintain a good credit rating, making it possible to finance deficits during an economic down cycle through loans. Between 2008 and 2015, the government increased its debts with a total of DKK 2.7 billion. In this period, Moody's, the credit rating agency, lowered the country's credit rating. With the onset of the financial crisis in 2008, the Exchequer´s net asset in 2007, which was zero, was not sufficient to finance the following years' deficits without losing a point in the credit rating.

Considering the current economic up cycle, with record low unemployment, the Exchequer surplus for 2020 ought to be far greater.

**Fees for Fishing Rights will Increase Productivity and Strengthen long-term Fiscal Sustainability**

If increased productivity in fisheries is to be encouraged, fees for the right to fish must be levied. In the long term, it is only increased productivity that can further bolster welfare in the Faroe Islands. Therefore, provisions in trade legislation ought not to hinder the competitive elements that lead to increased productivity. Rather, such legislation should be limited to procedural issues and to removing obstacles that counteract natural competitive market mechanisms.

Increased productivity in private enterprises do not usually solve challenges to fiscal long-term sustainability, because the wages in the public sector normally follow the trends in the private sector. However, in fisheries, increased productivity might lessen challenges to financial sustainability if fees are levied for the right to fish, and the resource rent consequently collected. If the fishing industry, receiving less subsidies, is forced to make investments that increase productivity and competitive power, this would not result in higher wage level in the fishing sector, since the resource rent would fall to the Exchequer and not to the shipowners or their crews.

Concurrently, increased productivity is decisive in meeting the challenges to fiscal long-term sustainability, because it sustains a higher income level and a higher service level, which may encourage young people to settle in the Faroe Islands, just as increased productivity gives space to innovation and job creation in other industries.

## Áður gjørdar búskaparfrágreiðingar

**Frágreiðing 2020**

- Búskaparfrágreiðing várið 2020 (.pdf)
- Tema: Nýskipanir í Fiskivinnuni

**Frágreiðing 2019**

- Búskaparfrágreiðing heystið 2019 (.pdf)
- Tema: demografiski drátturin og avbjóðingarnar fyri búskapin

- Búskaparfrágreiðing várið 2019 (.pdf)
- Tema: Um íløgur almenna geirans

**Frágreiðing 2018**

- Búskaparfrágreiðing heystið 2018 (.pdf )
  Tema: greining av tættum í búskapi almenna greiðans

- Búskaparfrágreiðing várið 2018 (.pdf)
- Tema 1: Aldur, arbeiðsvirkni og skattgjaldarar
  Tema 2: Framhaldandi tillagingar við nýskipanum

**Frágreiðing 2017**

- Búskaparfrágreiðing heystið 2017 (.pdf)
  Tema: Greining av serligum viðurskiftum í konkunkturgongdini

- Búskaparfrágreiðing várið 2017 (.pdf)
  Tema 1: Inntøkubýti
  Tema 2: Fíggjarpolitiskt haldføri

**Frágreiðing 2016**

- Búskaparfrágreiðingin heystið 2016 (.pdf)
  Tema 1: Um raðfestingar í arbeiði Búskaparráðsins
  Tema 2: Kommunubúskapurin

- Búskaparfrágreiðing várið 2016 (.pdf)
  Tema 1: Greiningar viðvíkjandi arbeiðsmarknaðinum
  Tema 2: Greiningar viðvíkjandi kommunum

**Frágreiðing 2015**

- Búskaparfrágreiðing heystið 2015 (.pdf)
  Tema: Greiningar viðvíkjandi almennum íløgum og viðvíkjandi eldraøkinum

- Búskaparfrágreiðing várið 2015 (.pdf)
  Tema: Fíggjarliga haldførið hjá almenna geiranum

- Týðing til danskt av kap. II í Búskaparfrágeiðingini 1. mars 2015 (útrokning búskaparráðsins av fíggjarliga haldførnum) (.pdf)

**Frágreiðing 2014**

- Búskaparfrágreiðing heystið 2014 (.pdf)
  Tema 1: Demografiskar broytingar og fíggjarligar avleiðingar
  Tema 2:Búskaparrenta og tilfeingisrenta

- Búskaparfrágreiðing várið 2014 (.pdf)
  Upprit um "búskaparrentu" og "tilfeingisrentu" í føroyska búskapinum (pdf)

**Frágreiðingar 2013**

- Búskaparfrágreiðing heystið 2013 (.pdf)
  Tema: Bygnaðarligar umskiftingar í búskapinum

**Frágreiðingar 2012**

- Búskaparfrágreiðing heystið 2012 (.pdf)
- Búskaparfrágreiðing várið 2012 (pdf)

**Frágreiðingar 2011**

- Búskaparfrágreiðing heystið 2011 (pdf)
- Búskaparfrágreiðing várið 2011 (pdf)

**Frágreiðingar 2010**

- Búskaparfrágreiðing heystið 2010 (pdf)
- Búskaparfrágreiðing várið 2010 (pdf)

**Frágreiðingar 2009**

- Búskaparfrágreiðing (pdf)

**Frágreiðingar 2008**

- Búskaparfrágreiðing (pdf)
- Temafrágreiðing um kommunala útjavning (pdf)

**Frágreiðingar 2007**

- Búskaparfrágreiðing (pdf)

**Frágreiðingar 2006**

- Búskaparfrágreiðing, desembur (pdf)
- Búskaparfrágreiðing, januar (pdf)

**Frágreiðingar 2005**

- Temafrágreiðing (pdf)

**Frágreiðingar 2004**

- Búskaparfrágreiðing (pdf)
- Temafrágreiðing (pdf)

**Frágreiðingar 2003**

- Búskaparfrágreiðing (pdf)

**Frágreiðingar 2002**

- Búskaparfrágreiðing (pdf)

**Frágreiðingar 2001**

- Búskaparfrágreiðing (pdf)

**Frágreiðingar 2000**

- Búskaparfrágreiðing, heystið (pdf)
- Búskaparfrágreiðing, várið (pdf)
- Temafrágreiðing (pdf)

**Frágreiðingar 1999**

- Búskaparfrágreiðing (pdf)

**Frágreiðingar 1998**

- Búskaparfrágreiðing, heystið (pdf)
- Búskaparfrágreiðing, várið (pdf)